

ÁRSRIT

# 2022

TJÓÐSAVNIÐ

FAROE ISLANDS NATIONAL MUSEUM

NATURE AND CULTURE

**TJÓÐSAVNIÐ** Ársrit 2022
Lagt til rættis: Savna
Snið og uppseting: Pætur Eyðunsson Jensen / Droym.fo
Prent og liðuggerð: Føroyaprent
Forsíða: Gulltráður

Svanamerktur prentlutur 541 705

# ÁRSRIT 2022

## INNIHALDSYVIRLIT

### FRAMSÝNING OG MIÐLAN


8 Stuðulstiltak fyri neyðstødd í Ukreina
9 Ferðaleiðaraútbúgving 2022
10 "Broytingar í føroysku náttúruni"
11 Havleikur 2022
11 Vitjan av katólskum biskupi
12 Savnandi savnsdagur
13 Føroysk klæðir
14 20 ára hátíðarhald hjá Vikmar
15 Fjøruskeið fyri lærarum og námsfrøðingum
16 Savnsfagnaðurin 2022
18 Føroyski báturin
19 Tjóðsavnið á G!


### SAVNIÐ OG MENTAN


20 Ringur funnin í tunnu í Stokkastovuni á Tinganesi
26 Niðri á Bakka á Velbastað
30 Lendisskrásetingar og eftirlit við grevstrararbeiðum
34 Formar og gipsstoypingar av prýðissteinunum í Múrinum í Kirkjubø
35 Fornlutir úr Kirkjubø og skipsvrak 3D-skannað
36 Brimverja í Kirkjubø
37 Nýtt dren norðanfyri Múrin
38 Dagbøkurnar hjá Kenneth Williamson
40 Gáva Føroya Løgtings og Føroya Landstýrisins til hennara hátign Margrethu drotning II
42 Føroyski báturin – bátasmíð, siðir og brúk
50 Mentanarsøgulig skip endurskoðast
51 Bátar hjá Tjóðsavninum
52 LIVIND verkætlanin
54 Kanónundirløgini á gomlu kanónunum á Skansanum umvæld
55 Fornminnisnevndin 2022
56 Tjóðsavnið vitjar í Porkeri
57 Myllan í Kvívík umvæld
58 Friðaðu kirkjurnar og kirkjur 100 ár og eldri
61 Myndagoymslan á Tjóðsavninum
62 Livandi mentan


### SAVNIÐ OG NÁTTÚRA


63 Føroyskt ross flett
64 Tjóðsavnið við í LIFEPLAN
66 Hvannlistafluga skrásett fyri fyrstu ferð í Føroyum
67 Kanning av vatnklukkum og bátsmanstekum í føroyskum tjørnum og vøtnum
68 FishFAR skjalfestir broytingar í vistfrøði og fiskastovnum í vøtnum eftir 22 árum
72 Fuglateljingar á Ramsaroyggjum
74 Fuglaráðgeving í Vága Floghavn 2022
75 Grágásateljing
76 Undankoman tann minsta higartil
78 Fuglakrím
79 Fulkubbakanning á vetri 2021-2022
80 Ringmerking í Føroyum 2022
82 Ryggleys dýr í Koltri
84 Landslagsarkitektar vitja í Koltri
85 Fuglakanningar í Koltri 2022
86 Plantukanningar
87 Aage V. Jensens Naturfonde í Føroyum
89 Lendisbati – Tryggjar, endurbøtir og styrkir føroysku náttúruna
91 Vitjan av fólki frá hagapartinum Stóriryggur á Kalsoynni
92 Urtagarðar Tjóðsavnsins
93 Á danska skjalasavninum (Rigsarkivet) at leita eftir gomlum skipsbókum
94 70 tunnur av djóratilfari
95 Hvíti sandurin í Koltri
96 Føroysk skordýrafrøði í heimshøpi
97 ODM Formidlingsseminar 2022
98 Plantudeildin vitjar Landgræðsluna í Íslandi
99 Vitjan í Lille Vildmose í Norðurjyllandi
100 Starvsfólkaútferð í Koltri
101 Skeið í viðlíkahaldi av múrverki
103 Vitjan í Svínoy í sambandi við bátasavn
104 Norðurlendsku UNESCO tjóðarnevndirnar hittast á Álandi
105 UNESCO stýrisbólkurin í Roskilde
106 Ráðstevnan Viking Congress
107 Norðurlendskur ríkisantikvarfundur 2022
108 Starvsfólkadagar í Suðuroy
109 Kunningarfundur og kveikingarferð í Danmark
110 Vitjan í prestagarðinum í Ónagerði
111 Ársfundur fyri ringmerkjarar í Danmark


### TJÓÐSAVNIÐ


112 Miðlan 2022 + útgávur, ráðstevnuframløgur og veggjaspjaldur
113 Tjóðsavnið í miðlunum 2022
114 Pat gandar frukt til listaverk
115 Vitjandi á framsýningunum 2022
116 Skúlavitjanir í 2022
117 Savnslærarin
118 Fráfaringarhald fyri Jóannesi Stephanssoni
119 Starvsfólk 2022
120 Minningarorð um Arne Edmund Thorsteinsson
122 Summary in English



*Mynd tikin norðarlaga á Kunoynni. Á hesum staði er seyður ongantíð sloppin til, og týðuligt er at síggja, hvussu øðrvísi vøksturin er her, enn í vanligu høgunum í Føroyum*



*Urtafluga á mýrisólju*

*“Sera nógu lívfrøðiligt virksemi í Koltri. Stóra lívfrøðiliga skrásetingin av allari floru og faunu gongur nú á triðja ári og verður væntandi liðug komandi ár”*





*Fjallagrasmølur, ein av teimum nýggjum skrásetingum fyri Koltri*



## FORORÐ

**2022 var aftur** eitt sera virkið ár hjá Tjóðsavninum. Tvey tey undanfarnu árini vóru nógv merkt av koronustøðuni, hóast sera nógv var á skránni hesi árini. Tí var gott, at umstøðurnar aftur blivu normalar á savninum í 2022. Korona merkti tó árið 2022 á tann hátt, at nógv var, sum skuldi heintast innaftur, t.d. altjóða ráðstevnur, fundir og vitjanir.

**Tjóðsavnið merkti væl,** at ferðafólkini komu aftur til Føroya, tí vitjanartalið setti met í 2022. Fyrst og fremst var tað talið á útlendskum ferðafólkum, sum vaks, men tað gjørdi talið á vitjandi føroyingum eisini. Hetta ber til at lesa meira um aðrastaðni í hesum riti.

**Tað er framvegis** sera nógv byggivirksemi kring allar Føroyar. Hetta merktu fornfrøðingar og lívfrøðingar okkara sera væl í 2022, tí nógvar kanningar og skrásetingar vóru gjørdar í sambandi við vegagerð, havnaútbyggingar, tunnilsarbeiði, útstykkingar og annað byggivirksemi.

**Eins og undanfarnu** ár er sera nógv lívfrøðiligt virksemi í Koltri. Stóra lívfrøðiliga skrásetingin av allari floru og faunu gongur nú á triðja ári og verður væntandi liðug komandi ár. Samstundis eru aðrar verkætlanir nú farnar í gongd í Koltri, m.a. Lifeplan, sum lesast kann um í ritinum.

**Verkætlanin Lendisbati byrjar** eisini at fáa skap. Verkætlanin snýr seg um at endurbøta skadda náttúru í Føroyum og at slóða fyri friðlendum í Føroyum. Í 2022 fóru fleri verkætlanir í gongd, m.a. eitt friðøki á Kalsoynni og arbeiðið við at endurbøta benið eftir eina skriðu – eisini á Kalsoynni.

**Fleiri nýgg andlit** eru at síggja á Tjóðsavninum. Hetta er náttúrlig útskifting, men eisini er ein vaksandi tørvur á starvsfólkum sum uppgávurnar vaksa, og verkætlanirnar gerast fleiri.

**Tjóðsavnið læt upp** nýggja fasta framsýning í Brekkutúni í 2022. Framsýningin er um føroysk klæði og tað siðbundna handverk, ið liggur aftanfyri. Fyri tveimum árum síðani læt nýggj framsýning upp um ull og seyðahald. Hesar báðar framsýningarnar lið um lið sýnast at stuðla hvørjari aðrari. Ein serframsýning var sett upp í 2022. Lutir, sum vóru grivnir út í Stokkastovuni í Tinganesi, vórðu sýndir fram. Stokkastovan verður nú umvæld, og í tí sambandinum var kjallarin grivin út. Framsýningin var uttandura og var samstundis eitt stuðulstiltak fyri flóttafólk úr Ukraina.

**Herleif Hammer**
*stjóri*



Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús og Helgi Dahl Michelsen taka ímóti

# STUÐULSTILTAK FYRI NEYÐSTØDD Í UKREINA

Saman við starvsfólkum á Løgmansskrivstovuni skipaðu starvsfólk á Tjóðsavnium fyri einum sjálvboðnum stuðulstiltaki til frama fyri neyðstødd í Ukreina. Hetta varð gjørt við einum tiltaki í Stokkastovuni í Tinganesi, har fornfrøðingar vóru í holt við ein útgrevstur í sambandi við høvuðsumvælingina av Stokkastovuni

Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús, Ph.d. fornfrøðingur

**Tiltakið var leygardagin** tann 26. mars 2022 frá kl. 11.00 til 13.00 ella fram til, at eingi vitjandi vóru eftir. Tiltakið, sum var ókeypis, var fyri øll, og høvið var at lata eina peningagávu til neyðstødd í Ukraina. Peningurin, ið kom inn, fór umvegis Reyða Kross óskerdur til hjálpararbeiðið í Ukraina.

Hvørt korter greiddu fornfrøðingarnir, Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús og Helgi Dahl Michelsen, frá útgrevstrinum í Stokkastovuni. Høvi var eisini at spyrja spurningar. Avmarkað pláss var til hvørja rundvísing. Uttan fyri Stokkastovuna varð skipað fyri framsýning við myndum, teksti og útvaldum lutum frá útgrevstrinum, har Rannvá Winkler, Rannvá Næs Hoydal og Andras á Lofti greiddu frá. Elsuba Olsen, Sanna Hansen, Helena Lassen og Solveig Hansen tóku ímóti vitjandi. Umframt hetta bjóðaðu starvsfólkini á Løgmansskrivstovuni ein kaffimunn.

Tiltakið var væl vitjað, og tey vitjandi lótu væl at tiltakinum. Inn komu 11.621 krónur, og peningurin varð latin Reyða Krossi tann 27. mars 2022 í sambandi við tiltakið *Stuðulskonsertin fyri Ukraina.*



*Framsýningin var uttandura í túninum hjá løgmanni*



*Her sæst Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús greiða frá útgrevstrinum í Stokkastovuni fyri vitjandi*







# FERÐA-LEIÐARA-ÚTBÚGVING 2022

Í sambandi við ferðaleiðaraútbúgvingina á Miðnámi í Vestmanna undirvístu fólk frá Tjóðsavninum komandi ferðaleiðarum í fornfrøði, um føroysk fornminni, í búsetingarsøgu, byggihættum og siðaarvi

Ann Sølvia Selmarsdóttir Púrkhús, Ph.d. fornfrøðingur

**Endamálið við undirvísingini** er, at ferðaleiðarar fáa eina grundleggjandi ástøðiliga vitan um føroyska fornfrøði og um arbeiðið hjá Tjóðsavninum innan fornfrøði. Sum partur av undirvísingini varð skipað fyri rundvísingum í Brekkutúni, á Hoyvíksgarði og í Kirkjubø. Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús, fornfrøðingur, stóð fyri undirvísingini í fornfrøði og vitjanini í Kirkjubø, og Tórarinn N. á Rípuni greiddi frá framsýningunum hjá Tjóðsavninum í Brekkutúni, á Hoyvíksgarði og á Hvalastøðini við Áir.

Tað er Maud Poulsen frá Miðnámi í Vestmanna, ið skipar fyri skeiðinum innan ferðavinnu, og er hetta skeiðið eitt sera spennandi og viðkomandi undirvísingartiltak.



*Kolbrún í Haraldsstovu, savnsvørður á Plantudeildini og Agnes-Katharina Kreiling, Ph.D. lívfrøðingur*

# "Broytingar í føroysku náttúruni"

## – tiltak á Listasavninum

Listasavnið læt upp eina serframsýning í apríl við heitinum "Landslagið í broyting". Skipað var fyri einum tiltaki við framløgum, har sjóneyka var sett á broytingar í føroysku náttúruni. Kolbrún í Haraldsstovu, savnsvørður á Plantudeildini á Tjóðsavninum, helt framløguna "Hvussu vilja vit broyta landslagið?"

Herleif Hammer, stjóri

**Framløgan var um,** hvussu menniskjaligt virksemi ávirkar og broytir landslagið í Føroyum ígjøgnum tíðina, og hvussu tað er við til at leggja trýst á náttúruna. Føroyska náttúran hevur verið fjølbroytt og gróðurrík, áðrenn menniskju búsettust her. Í dag er tað tað einsháttaða grøna graslendið, sum er vanliga ímyndin av føroyskari náttúru. At enda setti hon spurningin: "Halda vit fram at viðfara og broyta náttúruna í tann mun vit gera, hvussu fer náttúran í Føroyum tá at síggja út í framtíðini?"

Agnes-Katharina Kreiling, skordýrafrøðingur á Tjóðsavninum, legði síðani fram um "Landslagið í broyting – úr sjónarhorni skordýranna". Hon viðgjørdi, hvussu mikroskopiska landslagið er í støðugari broyting, hvussu skordýr broyta landslagið undir fótum okkara, uttan at vit leggja tað til merkis. Hon prátaði um, hvørjar hesar broytingar eru, og hvussu tær fara fram.

Fitt av fólki var til tiltakið, og fleiri spurningar vóru eisini havdir á lofti aftaná framløgurnar. Sum heild var tað eitt væleydnað tiltak, og Tjóðsavnið vónar at skipa fyri fleiri slíkum tiltøkum saman við Listasavninum. Listasavnið fer at útgeva eina bók um serframsýningina, har m.a. greinir, orðaðar útfrá framløgunum, eru við.



*Agnes-Katharina Kreiling vísir fram ymisk skordýr*



*Erland Viberg Sørensen, savnsvørður, greiðir frá*

# HAVLEIKUR 2022

## – mentanarsøguligt tiltak á Tjóðsavninum

Kristina Djurhuus Christiansen, savnsvørður

Landsdansifelagið Sláið Ring fyriskipaði tiltakið Havleikur 2022 í Havn í døgunum 12. - 17. juli

**Í hesum sambandi** skipaði fólkalívsdeildin fyri einum mentanarsøguligum tiltaki fyri luttakararnar, sum komu úr øllum Norðurlondunum. Á tiltakinum vóru fyrilestrar um føroyska siðsøgu. Noomi í Dali helt fyrilestur um ull og føroysk klæðir. Síðani hevði savnsvørður á fornfrøðideildini, Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús, ein fyrilestur um fornminni í Føroyum. Erland Viberg Joensen, savnsvørður á fólkalívsdeildini, endaði tiltakið við einari framløgu um føroyska róðrarbátin.



*Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús leggur fram*

# VITJAN AV KATÓLSKUM BISKUPI



*Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús greiðir frá um fornfrøði í Føroyum*

Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús, fornfrøðingur Ph.D.

**Í apríl 2022** hevði Tjóðsavnið forkunnuga vitjan av katólska biskupinum í Keypmannahavnar Bispadømi (Føroyar, Danmark og Grønland), Czeslaw Kozon, og prestinum, pater Peter Fleetwood, og diakoninum, Christian Gabrielsen. Pater Peter Fleetwood er katólskur prestur í Føroyum, og Christian Gabrielsen er diakonur í Føroyum. Teir vóru ógvuliga áhugaðir í føroyskari søgu og fingu eina rundvísing um fornfrøði og søgu í Føroyum. Harumframt fingu teir eina rundvísing um, hvussu fiskivinnan hevur ment seg í Føroyum.




Bergur Hansen heldur røðu í Kringvarpinum

Nýggja tiltakið hevur egið búmerki

# SAVNANDI SAVNSDAGUR

Tað var Kringvarp Føroya við Mass Hoydal á odda, sum tók stig til nýggjan tátt – nevnliga savnandi savnsdag, sum var hildin í forhøllini í Kringvarpinum seinnapartin 3. juni. Endamálið við degnum var at savna landssøvnini Tjóðsavnið, Kringvarpssavnið, Skjalasavnið, Listasavnið og Landsbókasavnið til ein almennan fakligan dag

Herleif Hammer, stjóri

**Ætlanin var at** hava fakligar framløgur, sum varpa ljós á tað arbeiðið, sum verður framt á søvnunum. Eisini skuldi kjak vera um týdningin, søvnini hava ella áttu at havt í samfelagnum.

Øll søvnini høvdu hvør sína framløgu. Fyri Tjóðsavnið var Jan Sørensen, sum tosaði undir heitinum: "Nyttan av djórasøvnunum lýst við dømi í koronukanningartøkni". Framløgan snúði seg um týdningin av at hava djórasøvn við serfrøðingum, sum prógv um, hvørji dýr liva um okkara leiðir. Serliga tá nýggj gentøkni verður nýtt at siga nakað um dýr út frá einari genetiskari slóð, og uttan at hava vitan um tey veruligu dýrini.

Tvær gestaframløgur vóru eisini. Bergur Hansen frá Fróðskaparsetrinum hugleiddi um ta talgildu avbjóðingina, søvnini hava, meðan Annika Sølvará hugleiddi um søvnini sum granskingaramboð.

Móti endanum á tiltakinum fekk Tjóðsavnið handað ein serligan lut, sum ímyndar koronutíðina og loysnir, ið vóru funnar við stuttum skotbráði. Tað var koronustongin við mikrofon og einari hálvhosu fyri at verja ljóðið ímóti vindi.



Jan Sørensen

Hetta var ein loysn, ið verturin Tórður Mikkelsen í sendingunum "Við Tórði á túri" fann beinanvegin, eftir at Kringvarpið setti umfatandi tiltøk í verk fyri at verja ímóti smittuni. Hendan loysnin slapp uttan um forboðið, Kringvarpið hevði sett um at fara út við mikrofon.

Herleif Hammer, stjóri á Tjóðsavninum, tók ímóti lutinum. Í hesum sambandi nevndi hann, at hetta var tann gripur á Tjóðsavninum, sum skjótast var komin í savnið, eftir at hann varð gjørdur, og at hetta var eitt dømi um, at okkara samtíð eisini er søga og verður skrivað alla tíðina.



Mass Hoydal hevur júst handað Tjóðsavninum serligu "Koronumikrofonina"



# FØROYSK KLÆÐIR

## – nýggj framsýning



Stakkastásið úr Skúvoy



Nýggju føroysku klæðini. Súsanna Joensen, konservator, við seinasta "finish"

15. juli læt nýggj framsýning upp í framsýningarhølum Tjóðsavnsins í Brekkutúni 6. Framsýningin er eitt tvørfakligt samstarv millum deildirnar fólkalív og miðlan. Framsýningin byggir á ta vitan, savnið hevur um føroysk klæðir, við at vísa á skrivligar keldur og søgur, tekningar og myndir umframt innkomnar lutir og klæðir

Rannvá Winkler, savnsvørður

**Í framsýningini eru** millum annað skreytlutir, eldri pløgg, filmar og myndir, umframt nýggj føroysk klæðir, við øðrum orðum, nakað av tí elsta og yngsta, Tjóðsavnið eigur, verður sýnt fram.



Skógvarnir hjá Skraddar Debes

Tað sæst í framsýningini, at føroysku klæðini eru ein livandi mentanararvur, har rák og tíð ávirka litir og snið av klæðunum. Fjølbroytnið í føroysku klæðunum, bæði nú og fyrr, er týðiligt.

Serstaka handverkið, ið er við til at skapa og mynda føroysku klæðini, hevur eisini fingið pláss í framsýningini undir heitinum "Siðbundið handverk".

Vónin er, at tann vitjandi fær eina grundleggjandi vitan um søguna hjá føroysku klæðunum við einum ynski um at læra meira.

Ætlanin er at gera fleiri serframsýningar um føroysk klæðir í framtíðini, har arbeitt verður meira við einstøkum lutum og evnum, ið taka útgangsstøði í verandi framsýning.



Siðbundið handverk



Føroyakort 1772

# 20 ára hátíðarhald hjá Vikmar

Á heysti í 2021 ringdi Jan Hammer Egholm, stjóri á Vikmar, til Tórarinn N. á Rípuni, savnslærara, og spurdi, um savnið hevði áhuga í at taka avrit av einum forkunnugum Føroyakorti, sum hann hevði fingið fatur í

Tórarinn N. á Rípuni, savnslærari

**Tað vildi Tórarinn** vegna savnið fegin, og fór hann saman við Guðrið R. Poulsen, savnsteknikara, ein túr oman til Vikmar. Har vóru hópin av kortum og málningum, sum stjórin hevði fingið hendur á ímillum ár og dag. Fleiri vóru forvitnislig, og øll høvdu tey tað til felags, at Føroyar onkursvegna vóru á teimum.

Kortið, sum talan var um at taka avrit av, er nokkso stuttligt. Christian Wollner hevur teknað tað av í 1772 eftir einum korti frá 1769. Har eru blýantstekningar á kortinum, so tað er skilligt, at kortið hevur verið brúkt. Fleiri akkerspláss eru merkt á kortinum, eins og boðar og sker.

Orsøkin til, at Jan Hammer Egholm ringdi til Tórarinn á Rípuni var, at hann stutt frammanundan hevði hoyrt savnslæraran í "Góðan morgun, Føroyar" greiða frá um kortini hjá Born kapteyni, sum kunnu síggjast á savninum.

19. august í 2022 bjóðaði Vikmar til opið hús í sambandi við, at tað vóru 20 ár, síðan felagið fór undir at veita tænastur til sjóvinnuna. Ein táttur í hesum hátíðarhaldinum var ein framsýning av øllum teimum forvitnisligu kortunum og málningunum. Aftur vendi Jan Hammer Egholm sær til Tórarinn á Rípuni, savnslærara, og spurdi, um hann kundi greiða frá um kortini fyri gestunum, sum vóru komnir saman.

Tann 13. oktober vóru Jan og Tórarinn í "Góðan morgun, Føroyar" og greiddu eitt sindur frá um kortini.



Hvalba. Kut úr kortinum



Tórarinn N. á Rípuni og verturin í "Góðan morgun, Føroyar"



Í bátahylinum á Signabø. Jan Sørensen greiðir frá um lættisopp

# FJØRUSKEIÐ FYRI LÆRARUM OG NÁMSFRØÐINGUM

**Endamálið við hesum skeiðum er at geva lærarum og námsfrøðingum eina viðkomandi vitan um fjøruna og lívið í fjøruni. Ikki so nógv ástøði, men meira "síggj og lær", har skeiðsluttakararnir ganga niðri í fjøruni, og so verður tosað um alt tað, sum er at finna júst tann dagin. Hetta kann vera slíkt, sum altíð er har, og slíkt, sum kemur rekandi ella er skolað upp á strondina**

Jan Sørensen, savnsvørður

**23. og 24.** august varð skipað fyri fjøruskeiði fyri lærarar og námsfrøðingar. Pláss var fyri tíggju fólkum, og níggju meldaðu til.

Av tí at øll hava eina telefon við myndatóli, so er bæði lætt og hent at avmynda alt tað, sum er at finna, og síðani goyma tað til at brúka í skúlanum ella í barnagarðinum.

Tað er eitt sindur ymiskt, hvørji støð verða vitjað. Støðini verða vald eftir, hvussu veður og vindur eru júst tann dagin. Á hesum skeiðinum varð gingið í fjøruni í Kaldbak millum bátahylin og Skriðubakka. Hetta økið er serliga gott til at vísa klettastrond. Eisini vóru vit inni í Kaldbaksbotni og hugdu at, hvat var skolað upp har, og at tí vøkstri, ið er fram við fjøruni.

Seinna dagin fluttu vit okkum norður í Sundalagið, har onnur fyribrigdi eru. Byrjað var í fjøruni við Norðskála, síðani var farið eitt sindur longur suður nakað norðanvert Grønhólm, og til síðst var farið á sandin í Kollafirði.



Igulker




Gjørt verður klárt á nýrasteinsverkstaðnum



Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús greiðir frá, hvussu fornfrøðingar leita eftir pissi

Børn royna seg við einum putlispæli

# Savnsfagnaðurin 2022

Undanfarnir savnsfagnaðir hava ofta tikið støði í evnunum, sum ST tekur upp. Tað valdu vit ikki at gera í ár. Evnið í ár var piss. Hetta komst einamest av, at tá ið vit arbeiddu við framsýningini "Ull er Føroya gull", løgdu vit til merkis, hvussu nógv piss ella land, sum vit vanliga kalla tað, varð brúkt í Føroyum

Tórarinn N. á Rípuni, savnslærari

**Sjálv skráin var** meinlík teirri í fjør. Savnið læt dyrnar upp klokkan 11, og eitt korter seinni var leikurin hjá Heiðu (huldugentan sum býr á Tjóðsavninum) á skránni; í ár æt hann "Náttpotturin hjá Heiðu". Klokkan 13 læt savnið aftur. Dyrnar lótu upp aftur klokkan 14. Fyrsti fasti tátturin á skránni var granskarasøgan. Mánadagin hevði Jón Aldará, lívfrøðingur, eina framløgu um, hvørt fuglar munnu pissa. Tað var ein sera stuttlig framløga, og børnini sótu sum á nálum. Týsdagin hevði Meduna Dalsgaard, arkitektur, eina framløgu um, hvar vit pissaðu fyrr í tíðini. Mikudagin tosaði Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús, fornfrøðingur, um, hvussu fornfrøðingar leita eftir pissi í útgrevstrum. Kristina Djurhuus Christiansen, savnsvørður, hevði eina framløgu hósdagin um, hvussu vit vaskaðu í landi í gomlum døgum. Hetta hildu fleiri av børnunum vera sera "vemmiligt". Og sum rosinan í pylsuendanum greiddi Jan Sørensen, lívfrøðingur, frá, hví piss er gult. Granskarasøgurnar vóru sera væl vitjaðar, og bæði børn og vaksin fingu nógv burturúr.

Beint aftaná granskarasøguna kom ein Kahoot kapping, og hon var eisini sera væl umtókt.

Annars var nógv annað á skránni. Ein framsýning av gomlum náttpottum var sett upp, og beint við síðuna av stóð eitt nátthús, har mann kundi royna seg við veggjakrutli ella grafitti. Tá ið savnsfagnaðurin var at enda komin, var næstan ikki ein blettur av berum træi eftir. Alt var krutlað til.

Upplýsandi tekstir um land og piss hingu á veggjunum. Og til bar eisini at royna seg í røttum og rongum um piss. Eitt stórt putlispæl og pottakast var niðriundir. Har var eisini ein framsýning við vaskievnum gjøgnum árini, alt frá landi til grønsápu.

Nýrasteinsverkstaðurin var eitt tað best umtókta á øllum fagnaðinum. Har bar til at gera sær alt møguligt úr perlum og steinum.

William Simonsen hevði, eins og undanfarin ár, sjóneykur, har tað bar til at hyggja at smákyktum. Hóast hetta er afturvendandi, so er tað sera væl umtókt.

Heiða hevði eina framførslu, sum hon nevndi "Náttpotturin hjá Heiðu". Hon greiddi frá um piss og land, og um, hvat fólk millum annað brúktu tað til fyrr í tíðini. Børnini sluppu eisini at stinga nøsina niður í "piss". Summi tordu ikki, men tey flestu mannaðu seg upp og kláraðu tað. Leikurin endaði við, at Heiða deildi áskoðararnar í helvt og læt teir kappast móti hvørjum øðrum í einari spurnakapping. Og so løgið tað ljóðar, endaði tað við javnleiki hvørja ferð.

Uppgávuhefti varð eisini gjørt til fagnaðin. Nakrar uppgávur skuldu loysast á savninum, meðan aðrar kundu loysast heima, um mann hevði hug til tað.

Savnsfagnaðurin var avbera væl vitjaður. Vitjandi skuldu melda seg til ígjøgnum Visit Tórshavn, men nøkur fólk komu tó uttan tilmelding.



Til bar at royna seg í pottakasti



Framsýning við lutum, sum blivu brúktir til at vaska við í gomlum døgum



Granskarasøgurnar vóru sera væl vitjaðar



# FØROYSKI BÁTURIN

## – bátasmíð, siðir og brúk

Armgarð Weihe, aðalskrivari í føroysku UNESCO-nevndini, setur tiltakið

Fult av fólki var savnað, tá Tjóðsavnið saman við Fróðskaparsetri Føroya og føroysku UNESCO-nevndini skipaði fyri einum tiltaki um føroyska bátin. Tiltakið varð fyriskipað í sambandi við, at føroyski báturin er komin á UNESCO-listan yvir umboðandi siðaarv hjá mannaættini

Kristina Djurhuus Christiansen, savnsvørður

**Nógv góð hugskot** komu fram á tiltakinum, sum Tjóðsavnið savnar saman, so ein ætlan kann leggjast fyri, hvørjar skipanir og tiltøk kunnu verða sett í verk, fyri at menna brúkið av føroyska bátinum, so at føroyskum bátasmíði kann verða lív lagað.

### MILLUM GÓÐU HUGSKOTINI, IÐ KOMU FRÁ FULLSETTA SALINUM, VÓRU:

- at skipa bátaumhvørvi, har bátaeigarar og onnur hava møguleika at hittast og vera saman um føroyska bátin
- kommunur skipa fyri umstøðum at umvæla bátar
- føroyskir bátar fáa frammíhjárætt til bátapláss
- fuglaveiðilógin kann verða broytt, so at tað til ávísa veiðu bert er loyvt at veiða frá føroyskum báti
- bátasmiðjur kunnu verða stuðlaðar, so at møguleiki verður at seta lærlingar við
- ferðavinna, søvn og bátasmiðjur kunnu verða samskipað fyri at fáa sum mest burturúr

**Verður gongd sett** á eitt miðvíst arbeiði, har feløg, einstaklingar, land og kommunur á hvør sínum øki gera sítt til at skapa føroyska bátinum og føroyskum bátasmíði livilíkindi, so átti tað at borið til at ment brúkið av føroyska bátinum, og harvið føroyskum bátasmíði, so at hesin vakri bátur, hetta mætasta listaverk, ið føroyingurin hevur skapað, ikki hvørvur heilt úr myndini í bátahyljunum kring landið.



*Herleif Hammer endaði tiltakið við at seta gongd á eitt hugarok um, hvussu vit tryggja bátinum lívføri fyri komandi ættarliðini*



*Hanus Jensen greiðir frá um sítt yrki sum bátasmiður*






*Kolbrún í Haraldsstovu og Jón Aldará í "Fjósinum"*

Kolbrún í Haraldsstovu, savnsvørður og Jón Aldará, lívfrøðingur

# Tjóðsavnið á G!

**Tað var eitt heldur øðrvísi tiltak á ársins G! festivali í Syðrugøtu, tá lívfrøðingarnir á Tjóðsavninum, Agnes-Katharina Kreiling, Jón Aldará og Kolbrún í Haraldsstovu høvdu fyrilestrar um Koltur, skordýr og Lendisbata á tí annars tættpakkaðu tónleikaskránni**

**Agnes-Katharina Kreiling prátaði** um, hvussu mikroskopiska landslagið broytist, tá skordýr sleppa at standa á odda, og Jón og Kolbrún prátaðu um Koltursverkætlanina og náttúrugranskingina, sum fer fram har um summarið. Eisini tosaði Kolbrún um náttúruendurbøtingarverkætlanina Lendisbati, har høvuðsdentur varð lagdur á tær báðar verkætlanirnar í Kalsoy – skriðuna á Syðradali og hagapartin Stóriryggur, sum er gjørdur til náttúrufriðlendi.

Tiltakið við granskingarfyrilestrunum var partur av einum samstarvi millum Jón og Kolbrún á Tjóðsavninum, jarðfrøðingin Una Árting frá Jarðfeingi, leirlistakvinnuna Guðrið Poulsen, rithøvundin Kim Simonsen og myndlistamannin Jón Sonna Jensen, sum er fyriskipari. Hesin arbeiðsbólkur er knýttur at einum altjóða listafólka- og granskarasambandi, ið nevnist SOTAN (State of the Art Network).

Føroyski arbeiðsbólkurin stóð fyri at bjóða útlendskum listafólki úr SOTAN til Føroya at uppliva samanspælið millum føroyska list og náttúru, og samstundis høvdu tey sjálv framløgur og tiltøk fyri almenninginum. Umboðini frá Tjóðsavninum vístu teimum vitjandi nøkur náttúruøki í Føroyum, og hóast ætlanin eisini var at fara til Kolturs, so bleiv tað avlýst fyri veður.



*Sune Strøm og Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús tosa um steinsetta gólvið*
MYND: TJÓÐSAVNIÐ

# RINGUR FUNNIN Í TUNNU Í STOKKASTOVUNI Á TINGANESI

Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús, fornfrøðingur Ph.d.

Í fornfrøðiliga útgrevstrinum í Stokkastovuni á Tinganesi, Tórshavn, varð ein ringur funnin í einari tunnu. Tað verður greitt nærri frá fundinum í greinini, men fyrst eitt sindur um Stokkastovuna og útgrevsturin

**Stokkastovan stendur við** sjóvarmálan út móti Eystaruvág á Tinganesi í Tórshavn. Hon er bygd av stokkum (viðarbulum) samangroyptum á hornunum. Í mong ár var Stokkastovan brúkt sum goymslubygningur. Í Stokkastovuni er eisini eitt loft, ið nevnist Hosuloftið, og við síðuna av Stokkastovuni var eitt bøkjarí. Í einum bøkjarí gjørdi mann stavíløt, til dømis tunnur, kerøld og kør. Í løtuni fer ein høvuðsumvæling av Stokkastovuni fram, og sum liður í høvuðsumvælingini var ein fornfrøðiligur útgrevstur í Stokkastovuni. Núverandi Stokkastova varð bygd nøkur fá ár eftir ógvusliga eldsbrunan á Tinganesi í januar 1673, ið oyðilegði øll tey eldru handilshúsini á Tinganesi. Í eldinum fóru fleiri hús, ið hoyrdu til handilin, harumframt krambúðin, tríggjar stokkastovur og landsins tinghús. Nøkur hús bjargaðust undan eldinum á Tinganesi; tey vóru millum annað Munkastovan og Leigubúðin. Nakað eftir eldsbrunan varð farið at byggja húsini á Tinganesi uppaftur; tað var í Gablatíðini, tá ið Gablafeðgarnir høvdu Føroyar í len frá 1655 til 1709, at núverandi Stokkastova varð bygd. Nýggjar tíðarfestingar av stokkunum í Stokkastovuni vísa, at hesir eru av granni og eru høgdir um veturin 1683 og á vári 1684 í Suðurnoregi. Stokkastovan er tí ein av elstu bygningunum á Tinganesi. Eftir Gablatíðina í 1709 bleiv Stokkastovan yvirtikin av kongaliga einahandlinum. Staðsetingin av Stokkustovuni liggur væl í lendinum tætt við sjóvarmálan, gamla tingstaðin og handilsstaðin. Tað var tí lætt hjá handilsskipum at flyta vøru úr skipum á land og inn undir tak. Nógv virksemi hevur tí verið her, ið hevur verið knýtt at Stokkastovuni.

Sostatt var hetta ein sera forvitnisligur og spennandi útgrevstur, ið fornfrøðingarnir fóru í gongd við í januar 2022. Fyrsta stigið var, at gólvið varð tikið av, soleiðis at fornfrøðingar sluppu undir gólvið at grava. Í mai mánaði 2022 varð síðsti parturin av útgrevstrinum liðugur, og í juni 2022 vórðu síðstu skrásetingarnar gjørdar. Eftirarbeiðið er ikki liðugt enn, men her verður í høvuðsheitum greitt frá ymiskum forvitnisligum, ið er komið undan kavi í útgrevstrinum.

Fornfrøðiliga arbeiðið í Stokkastovuni kann í høvuðsheitum býtast upp í høvuðsstig. Eftir at eldra gólvið varð tikið av og skrásett, var farið í gongd við at skráseta tilfarið, ið lá undir gólvinum. Undir gólvinum var hella og tað, ið líktist einum lítlum krúpikjallara. Ein lítil og smøl inngongd er til krúpikjallaran og fyri at koma inn, má ein krúpa inn gjøgnum inngongdina. Undir gólvinum og í hesum krúpikjallaranum lá nógv ymiskt tilfar. Tilfarið lá eisini leyst oman á helluni og



*Tilfar, múrsteinar, jarn og annað, ið lá undir gólvinum*



*Tunnan undir gólvinum*

á moldini. Nógv av tilfarinum var knústir múrsteinar, gamalt jarn og viður. Her var nógv spennandi at finna, millum annað ein múrsteinur við merkinum "K", múrsteinar við fingramerkjum, trækol, skifer til tak, goggur og hvalvápn. Og tað var júst undir hesum gólvinum, at omanfyrinevnda tunnan stóð millum alt tilfarið. Hon var sett inn um tær lítlu og smølu dyrnar í krúpikjallaraum á nakrar skiferplátur og múrsteinar, ið eisini lógu runt um sjálva tunnuna. Innan tunnan kundi takast út, var neyðugt at kanna, hvat var í tunnuni. Við tíðini var ymiskt dottið í hana, til dømis funnu fornfrøðingar beinagrindir av fleiri rottum, tí at hesar, tá ið tær vóru dotnar í tunnuna, ikki sluppu upp aftur.



*Steinsetta gólvið í Stokkastovuni*



*Ringurin*



*Uttanfyri Stokkastovuna. Á myndini Rannvá Næs Hoydal og Andras á Lofti*
MYND: TJÓÐSAVNIÐ

Eisini vóru spønir og støv í tunnuni. Tá ið alt hetta var hegnisliga grivið út, gjørdust fornfrøðingarnir sera ovfarnir, tí í tunnuni funnu fornfrøðingarnir eina lítla tunnu afturat, ið stóð í botninum á teirri stóru tunnuni. Tað var í tilfarinum, ið lá undir tunnuni, at ringurin varð funnin. Hvussu ringurin er endaður her, ber ikki til at siga við vissu, men onkursvegna er ringurin mistur og á ein ella annan hátt endaður í tunnuni. Í hesum sambandi er sjálvandi áhugavert at gita og ímynda sær, hvat er hent við bæði tunnuni og ringinum.

Umframt hetta vóru fleiri smærri lutir funnir, til dømis var eitt modell til eitt gebiss funnið, eitt "1 øre" frá 1940, har á stendur "Kongen af Danmark" og petti av brotnum fløtum frá nýggjari tíð. Eisini vóru kritpípuleivdir funnar í einum lítlum bunka og leikapetti (brotin fløt), ið kunnu tíðarfestast til 1700talið. Hesir lutir eru helst fluttir, tá ið rørarbeiði er gjørt undir gólvinum. Gjøgnum allan útgrevsturin var eisini nágreiniliga hugt eftir, um manngjørd merkir vóru at síggja á helluni.

Í næsta stigi varð farið undir at grava fláirnar, ið nú komu til sjóndar. Fláirnar vóru týðiligar oman á helluni, og í summum støðum vóru fláirnar rættiligar djúpar. Í hesum stiginum vórðu framvegis nógvir múrsteinar funnir, tó nú lógu teir í moldini og tóktust vera eldri enn teir knústu múrsteinarnir úr fyrsta stigi. Eisini varð nógvur viður funnin, tá ið grivið varð, tó var tilfarið so fúnað, at ikki bar til at



*Ymiskir lutir, sum Petur Hansen fann undir gólvinum. Eisini síggjast djórabein*
MYND TJÓÐSAVNIÐ

varðveita tað. Nógv forvitnisligt varð funnið, millum annað fleiri nøtir, ein múrsteinur við tølum, børkur, eitt band og tveir myntir. Á øðrum myntinum sæst árstalið 1815. Tess longur niður, ið grivið varð, tess týðiligari gjørdist, at farið varð longur aftur í tíðina. Lutirnir, ið nú komu undan kavi, kundu leysliga tíðarfestast til 1700-talið, her vóru millum annað kritpípuleggir og ein brotin kritpípa við skeljamynstri.

Í triðja stigi varð komið fram á eitt steinsett gólv við malargróti og í støðum við størri steinum. Hetta var ein sera vøkur steinseting. Steinsetingin varð tulkað sum upprunagólvið í Stokkastovuni frá 1683-84. Sum vera man, vóru fornfrøðingar sera fegnir um steinsetta gólvið. Ikki einans var tað vakurt, men við gólvinum varð ein hædd løgd afturat Stokkastovuni. Ætlanin er, at steinsetta gólvið skal varðveitast. Út frá lutunum, ið nú komu fram, varð týðiligt, at farið varð longur aftur í tíðina, til 1600- og 1700-talið. Hetta sæst við at kanna leirílatabrotini, har eitt brot av einum íl ati er av týskum steintoyi úr Westerwald eystan fyri Rínánna og eitt brot av einari skeggabbakannu. Hesar kannur vóru serliga gjørdar í Frechen, stutt frá Köln, og tí vórðu hesi búnýti innflutt til Føroya sjóvegis. Tey eru vanliga at finna í hesum tíðarskeiðinum og eru eisini funnin aðrastaðni á Tinganesi og í Skandinavia.

Lutirnir, ið eru funnir, vísa, at tað hevur verið neyvt samband millum Føroyar og útheimin í 16. og 17. øld og fram til dagin í dag. Umframt hetta vóru fleiri kritpípuleggir funnir og eitt vakurt brýni við útskering í øðrum endanum. Brýnið hevur møguliga verið brúkt sum beltisbrýni at hava tætt við hondina, tá ið arbeitt var.

Nógv av tí, ið funnið varð, vóru djórabein. Djórabeinini eru ymisk til støddar, og tess longri niðri í moldini tey liggja, tess myrkari verða tey ofta á liti. Tey størru beinini eru lættari at síggja, tá ið mann grevur. Djórabeinini vísa millum annað, hvørjum fólk hava livað av, hvørji djór vóru her, til dømis, at tey veiddu fugl, høvdu seyð og fiskaðu. Umframt hetta varð ein kettuskøltur funnin, so ketta hevur eisini verið í Føroyum fyrr í tíðini.

Hetta var sostatt ein sera spennandi og viðkomandi útgrevstur, sum varð væl vitjaður av fólki. Fleiri bólkar vóru eisini og vitjaðu útgrevsturin og fingu eina framløgu um Stokkastovuna og útgrevsturin. Tey, sum stóðu fyri útgrevstrinum, vóru Helgi Dahl Michelsen, útgrevstarleiðari, Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús, fornfrøðingur, og Hákun Andreasen, savnsteknikari, øll frá Tjóðsavninum. Harumframt vórðu hesi sett sum fornfrøðingar til hesa verkætlanina: Rannvá Næs Hoydal, Andras á Lofti og Peter Hansen. Á útgrevstrinum fingu fornfrøðingar eisini góða hjálp frá næmingum, ið vóru í starvsvenjing á Tjóðsavninum. Hesi vóru Lea Olivia Eldevig og Fríði av Kák frá Nám X og Jóannes Olsen frá Føroya Eftirskúla á Tvøroyri.



# NIÐRI Á BAKKA Á VELBASTAÐ

Ein reyðlitt perla úr steinslagnum karneol og ein fínur vovin gulltráður. Tað vóru tveir av serstakliga áhugaverdu forngripunum, ið komu fram í fornfrøðiliga útgrevstrinum niðri á Bakka á Velbastað síðsta summar. Slíkir víkingaaldargripir er ongantíð áður funnir í Føroyum

Helgi Dahl Michelsen, savnsvørður

## REYÐLITTA PERLAN ÚR KARNEOL

**Perlan úr karneol** varð funnin beint vestan fyri bønhústoftina í forna ringleitta kirkjugarðinum. Tá perlan varð funnin, var beinanvegin greitt, at talan var um ein serstakan og eksotiskan grip.

Karneol er ein sonevndur hálvgimsteinur, eitt frábrigdi av silikatmineralinum kalcedon ella eldtinnu. Hóast hon hevur ligið í moldini síðani víkingaøld, er fleirhyrnta, blanka perlan við sínum reyðgula liti enn líka vøkur.

Tílíkar perlur vórðu fluttar eftir fornaldarligu handilsleiðunum, sonevnda Silkivegnum, ið var eitt net av handilsleiðum úr Asia til Miðeuropa. Tá víkingarnir fóru at ferðast suðureftir og eystureftir eftir áunum til Kaspiska havið og Svartahavið og niður til Konstantinopel ella Miklagarð, komu teir til hesar gomlu handilsleiðir og fingu atgongd til eksotiskar vørur, eitt nú karneolperlur.

Svenski fornfrøðingurin, Johann Callmer, sum í 1970unum kannaði rúgvismikla perlutilfarið úr skandinaviskum víkingaaldargravum, metir, at karneolperlurnar komu til Skandinavia í 800 árunum, og at tær vóru hægsti móti millum víkingar í seinnu helvt av 800 árunum. Fleiri líknandi perlur eru funnar við handilsmiðstøðirnar hjá víkingum, eitt nú Kaupang í Noregi og Birka í Svøríki.

Tíðarskeiðið 800 til 900 árini passar væl við C14-tíðarfestingarnar á útgrevstrinum á Velbastað. Í 2016 varð ein gyltur krossmerktur fingurringur funnin, ið varð leysliga tíðarfestur til 1050-1250, harumframt var ein sjáldsamur anglosaksiskur silvurmyntur úr víkingatíð funnin við eina grøv, sum varð tíðarfestur til árini 910-15. Hugsandi er, at karneolperlan kann vera komin til Føroya við víkingum í 800 ella 900 árunum.



*Reyðlitta perlan úr karneol er vinstrumegin. Hin Perlan er úr rav, eisini funnin í útgrevstrinum á Velbastað*

Kanningar av víkingaaldargravum í Miðnoregi vísa, at karneolperlur eru at finna í kvinnugrøvum, og oftast eru tær partur av einum hálsprýði. Menn brúktu eisini hálsprýði, men tá ofta við glasperlum, ið vóru meira vanligar og ikki so virðismiklar. Karneolperlur í mansgrøvum verða oftast funnar við mjadnarnar, har tær helst hava verið í einum pungi í beltinum. Hetta verður tulkað sum, at karneolperlur hava havt virði sum býtisvøra, eins og silvurstykkir og myntir. Ymisku perlurnar úr víkingatíð høvdu óivað eisini symbolskt virði, bæði sum statussymbol og átrúnarliga ella andaliga. Skap, litur og tilfar høvdu týdning í hesum høpi. Enn vita vit ikki hvønn týdning ella leiklut, eksotiska karneolperlan á Velbastað hevur havt.



Ann Sølvia, Hákun og Rannvá ein góðveðursdagur í útgrevstrinum niðri á Bakka á Velbastað

## GULLTRÁÐURIN

**Fíni vovni gulltráðurin** varð funnin beint við inngongdina á vestursíðuni á bønhústoftini. Tá tveir steinar vórðu tiknir upp beint við inngongdina, skein gullið sum eitt lítið korn í moldini. Hetta vísti seg at vera ein fínur vovin ella snaraður gulltráður. Gulltráðurin varð varliga tikin upp saman við moldini kring hann. Hann varð reinsaður fram undir sjóneyku á Tjóðsavninum av Súsonnu Joensen, konservatori.



Gulltráðurin

Talan vísti seg at vera um ein minni enn 1 mm breiðan, flatan gulltráð.

Tílíkur gulltráður er ikki funnin í Føroyum áður, men hann er funnin aðrastaðni, eitt nú í gravum við víkingaaldarstaðirnar Kaupang í Noregi og Birka í Svøríki. Í teimum førunum er gulltráðurin vovin ella snaraður kring ein tekstil- ella silkitráð. Gulltráðurin er ofta partur í sonevndum brikkabondum ella spjaldravovnum bondum. Hesi spjaldravovnu bondini við gulltráði vórðu í víkingaøld ofta nýtt sum rendur á fínum klæðum. Í summum førum koma tey fyri sum pannubond ella partar av høvuðprýði. Vit vita ikki, um gulltráðurin av Velbastað er vovin um tekstiltráð, silkitráð, ella hann einaferð hevur verið partur av einum brikkabandi, tí tekstiltráðurin ella silkitráðurin er fúnaður burtur eftir so langa tíð í moldini. Vit vita heldur ikki, hvussu gulltráðurin er endaður millum steinarnar við dyrnar á bønhústoftini í kirkjugarðinum niðri á Bakka á Velbastað. Eingin ivi er tó í, at hesin fíni gulltráðurin hevur verið virðismikil í víkingaøld – ikki bara reina gullið, men eisini serkøna handverkið. Gulltráðurin hevur verið tekin um høgan status og nevnast kann, at tílíkur tráður er funnin við stórbæru víkingaskipsgrøvina í Gokstad í Noregi frá síðst í 800 árunum. Enn er gulltráðurin ikki liðugt viðgjørdur og kannaður, men vónandi fara kanningar at vísa, hvussu nógv karat gullið er, um tráðurin er vovin um silki- ella tekstiltráð, og hvaðani gulltráðurin stavar.



## FORNFRØÐILIGI ÚTGREVSTURIN

**Tjóðsavnið gjørdi fyrstu** fornfrøðiligu royndarveitina niðri á Bakka í 2014. Royndarveitin varð grivin tvørtur um eina vallaða høvd í miðjum kirkjugarðinum. Veitin staðfesti, at høvdin goymdi leivdir av einari eystur-vesturvendari bønhúsella kirkjutoft. Síðan 2016 hevur fornfrøðiligur útgrevstur verið á staðnum nakrar vikur hvørt summar. Grevstrarfeltið er síðani víðkað til meginpartin av forna kirkjugarðinum, og bønhústoftin er grivin fram øll, sum hon er.

Í 2022 varð mest grivið í vestara enda á kirkjugarðinum. Grivið varð niður við kirkjugarðslaðingini. Her varð komið niður á øskufláir, við eitt nú brendum kornum, djórabeinum og hitasprongdum malargróti frá eldstaði. Ringleitti kirkjugarðurin er bygdur oman á hesar øskufláir og er sostatt yngri. Sýni av hesum øskufláum hava lívfrøðiligt tilfar í sær, ið er sent niður á Moesgaard Museum,



Rannvá grevur øskuflá upp í posar sum sýni

á deildina fyri konservering og náttúruvísind, har føroyingurin, Mads Bakken Thastrup, greinar plantuleivdirnar og velur út tilfar, so sum brend korn, til kolevnis-14 tíðarfestingar. Vónandi fara hesar kanningar at svara spurningum um, nær ringleitti kirkjugarðurin varð bygdur og um virksemið á staðnum.

Eisini varð grivið í bønhústoftini, har partur av ovasta skifti av veggjalaðingini varð tikin burtur, og byrjað varð at taka næsta stigið av gólvinum upp.

Útgrevstrararbeiðið var darvað av vánligum veðri. Grivið var í seinnu helvt av juli og aftur í seinnu helvt av august og nakað inn í september. Nógva regnið gjørdi, at tíð varð til inniarbeiði, so sum at reintekna, talgilda tekningar, gera GIS-dátugrunn og spjaðingarkort yvir gripirnar og at skipa fláirnar kronologiskt í sonevnda Harris Matrix-skipanina. Eisini vórðu øll moldsýnini flotsoldað.

Grevsturin á Velbastað er ein sonevndur granskingargrevstur, har tað ikki er ein byggiverkætlan, ið er avgerðandi fyri, hvar grivið verður, og nær grevsturin skal verða liðugur. Staðurin er hóttur av veðri og vindi, ið máar meira og meira av fornleivdunum í bakkanum, og fornleivdirnar eru eisini hóttar av salti frá briminum og sjórokinum, ið fer niður í moldina og fær niðurbrótingina at ganga skjótari. Hendan niðurbrótingin sæst aftur í gravunum, ið komið er fram á í forna kirkjugarðinum, har at kalla bara tennirnar ella emaljan á tonnunum eru varðveittar. Ein týðandi liður í granskingarverkætlanini á Velbastað er eisini at menna fornfrøðiligu tøknina á Tjóðsavninum. Mentanarlandsløgini kring toftirnar eru skrásett í 3D við dronu, og lendið er skannað við georadara ella GPR (Ground Penetrating Radara). Tey, ið luttóku á grevstrinum á Velbastað í 2022, vóru Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús, Hákun Andreasen, Rannvá Næs Hoydal, Andras á Lofti og Helgi Dahl Michelsen, grevstrarleiðari.



Andras leggur fipurtetxdúk á fyri at verja feltið



Dronuskráseting av lendi og neystatoftum við Eiði í Svínoy

# LENDIS-SKRÁSETINGAR OG EFTIRLIT VIÐ GREVSTRAR-ARBEIÐUM

Helgi Dahl Michelsen, savnsvørður

Tjóðsavnið ger á hvørjum ári fornfrøðiligar lendisskrásetingar og hevur fornfrøðiligt eftirlit við grevstrararbeiðum kring landið. Nývelting við stórum maskinum og ymiskar byggiverkætlanir hjá landi, kommunum og privatum hava við sær, at søguligu lendini við forn- og mentaminnum so líðandi hvørva. Hesi fornu sporini eftir menniskjum eru ómissandi søgulig virði. Tí er umráðandi at skráseta og skjalfesta tey, áðrenn tey verða grivin burtur.

## ÚTBYGGINGAR Í VESTMANNA

**Útbyggingar verða gjørdar** í sambandi við grøna orkuskiftið, og í hesum sambandi gjørdi Tjóðsavnið tvær fornfrøðiligar lendisskrásetingar fyri SEV í 2022. Tann fyrra var í Heygadali og á Mýrunum í Vestmanna í sambandi við eina ætlaða pumpuskipan hjá SEV. Verkætlanin inniber m.a., at yvirskotstilfar, ið stendst av tunnilsspreingingum, verður nýtt til at fylla í millum vegin og ánna Heljareygað í Heygadali og uppi á Mýrunum. Endamálið við fornfrøðiligu lendisskrásetingini var at kortleggja og lýsa mentanarlandslagið og tey forn- og mentaminni, ið møguliga verða ávirkað av verkætlanini. Fornfrøðiliga skrásetingin fór fram við at ganga lendið ígjøgnum saman við heimildarmanninum Tummasi í Niðristovu, fyrrverandi festara. Forn- og mentaminni, ið sóust í lendinum, vórðu lýst við myndum, mátum og ætt. Staðsetingin varð gjørd við hondhildnum GPSara. Vanliga kortleggur Tjóðsavnið eisini við dronumyndum. Í hesum føri hevði Bergur Viderø frá LBF longu gjørt dronumyndir av Heygavatni, parti av Heygadali og á Mýrunum. Staðarnøvn, topografisk kort og søguligt kort vórðu fingin til vega frá Umhvørvisstovuni. Alt tað talgilda og staðsetta korttilfarið varð síðani lagt inn í GIS-skipan á Tjóðsavninum. Í GIS-skipanini vórðu staðsettu fornminnini løgd í ein geo-dátugrunn og greinað eftir slagi. Hetta er vanliga mannagongdin í tílíkum lendisskrásetingum á Tjóðsavninum.

Fornfrøðiliga eru tað serliga staðarnøvnini Dalhús og Jaspurstoft, ið benda á, at húsatoftir eru í økinum. Tílíkar húsatoftir eru friðaðar við lóg. Við Dalhús er eitt ból og ein toft, ið tó liggur uttanfyri økini, ið ætlandi verða uppfylt. Við Jaspurstoft er eitt ból, nevnt Bólið á Jaspurstoft. Bólið er helst bygt á eldri húsatoft, nevnd Jaspurstoft. Jaspurstoft liggur innan fyri markið fyri uppfyllingina. Her má markið fyri uppfyllingina flytast einar 20 metrar eystureftir á staðnum, har Bólið á Jaspurstoft er. Annars má ein fornfrøðilig rannsókn gerast, áðrenn toftin møguliga kann vera loyst úr friðing.

Av øðrum mentaminnum vóru tað serliga ból í sambandi við seyðahald og kráir í sambandi við torvskurð, ið vórðu skrásett. Í økinum, har ætlanin er at fylla út uppi á Mýrunum, vórðu eingi mentaella fornminni skrásett.


Heimildarmaðurin Tummas í Niðristovu greiðir frá við bólið á Mýruni í Heygadali


Dronuskráseting av lendi og toft í Svínoy


Skráseting av krógv sunnan fyri Eiðisvatn við hondhildnum GPS'ara

## GRØNA ORKUSKIFTIÐ VIÐ EIÐISVATN

**Seinna fornfrøðilga lendisksráseting** í sambandi við grøna orkusikftið var sunnanfyri Eiðisvatn oman fyri Ljósáir, har SEV hevur ætlanir um at seta vindmyllur upp. Sama háttalag varð nýtt sum í Vestmanna. Hóast økið var stórt, vóru bert einstakar kráir og ból og ein gróthústoft skrásett. Niðurstøðan var, at fornminni ikki eru til hindurs fyri, at vindmyllur verða settar upp í hesum økinum.

Eisini varð ein fornfrøðilig skráseting gjørd á sama hátt í sambandi við ætlan um nývelting í haganum á Glyvrum, frá Glyvragjógv og norður móti Grinkilsá.

## NEYSTATOFTIR Í SVÍNOY

**Annað, sum hevur** kravt, at Tjóðsavnið ger fornfrøðiligar skrásetingar, er tá fólk hava ynski um at byggja gróthústoftir og neystagrundir uppaftur av áhuga. Í teimum førum verður rátt til, at Tjóðsavnið fær høvi at gera eina 3D skráseting av toftunum, áðrenn endurbyggingin fer í gongd. Sum dømi um hetta kann nevnast, at Tjóðsavnið var í Svínoy og skrásetti allar neystatoftirnar á Eiðinum í Svínoy, har fólk hava ætlanir um at byggja gomlu neystini uppaftur. Í samráð við stiðtakararnar var semja funnin um, at nøkur neyst fáa frið at standa sum órørd fornminni. Á túrinum í Svínoy varð eisini ein toft í neystaumhvørvinum í bygdini 3D-skrásett við dronu. Her hevur áhugafelag ætlanir um at taka húsatoftina niður og byggja nýtt neyst til gomlu bátarnar í bygdini og at gera felagshús í ovaru hædd.


Andras á Lofti við georadaranum (GPR) við Eirikstoftir í Miðvági



## SØGULIGIR BÝLINGAR OG FORNFRØÐILIGAR LEIVDIR

**Kring landið verða** veitir grivnar gjøgnum søguligar býlingar, har fornminni fjala seg í lendinum, hetta í sambandi við kaðalveiting og rørleiðingar so sum spillivatnskipanir. Um boðað verður frá arbeiðinum, fer Tjóðsavnið út og hevur fornfrøðiligt eftirlit við grevstrinum og skrásetur fornleivdirnar, ið eru at síggja í veitunum. Sum dømi um hetta kann nevnast arbeiðið niðri við Kongabrúnna í Havn í sambandi við nýggja kloakering frá Nólsoyarstovu og fram við Fútastovu. Her beyðst høvið at skráseta ein skurð, ið vísti søguligu gongdina fra núverandi veghædd og niður til upprunaliga sandin í ósanum, har Havnará rann út.

Partur av lendiskrásetingunum er at nýta georadara (GPR) fyri at síggja, um fornfrøðiligar leivdir fjala seg undir svørðinum. Í 2022 vórðu tílíkar georadarkanningar eitt nú gjørdar við Eirikstoftir í Miðvági.

Fornfrøðiligt eftirlit við greystri sunnan fyri Fútastovu

# Formar og gipsstoypingar av prýðissteinunum í Múrinum í Kirkjubø

Í døgunum 5. – 9. desember var Anne Prejsz, konservator og steinhøggari, í Føroyum, og var upprunaliga ætlanin, at hon skuldi hyggja eftir og møguliga royna at líma steinar, ið vóru dotnir niður úr Múrinum, upp á pláss aftur. Tá tað var liðið so mikið út á árið, so broyttist uppgávan til eitt annað arbeiði, ið leingi hevur ligið á láni

Súsanna Joensen, konservator og Helgi Dahl Michelsen, savnsvørður

**Sumrini 1991 og** 1993 var E. Benner Larsen, konservator, í Føroyum og gjørdi silikonformar av prýðissteinum og serligum bygningapørtum/-steinum í Múrinum. Gipskopiir av prýðissteinunum vórðu stoypt í nakrar av formunum beinanvegin. Í 1997 helt Tobias Sørensen, konservator, áfram við gipsstoypingini, men varð ikki liðugur at stoypa í allar formarnar.

Í Múrinum í Kirkjubø eru prýðissteinar og bygningssteinar, sum eru høgdir/tilevnaðir úr bleytari gróti. Hetta tilfarið er ikki so haldbart sum teir vanligu bygningssteinarnir. Veður og vindur máa steinin. Tað eru hesir steinar, ið formar eru gjørdir av, og sum tað varð farið undir at stoypa gips í. Í mun til skanningar so kunnu gipsavstoypingar vísa høggmerki, slit v.m. og geva eina fasta tíðarmynd av steinunum, tá teir vórðu stoyptir. Tað eru longu gott 30 ár síðani, fyrstu stoypingarnar vórðu gjørdar. Við at samanbera gipsstoypingarnar og 3D skanningar, ið verða gjørdar nú og í framtíðini, ber til at eygleiða slit og broytingar og seta varðveitingartiltøk í verk, tá tað er neyðugt. Umframt til vísindaliga kanningar eru slíkar gipsstoypingar ógvuliga væl egnaðar í undirvísingar- og framsýningarhøpi.


*Anne Prejsz, konservator og steinhøggari, kannar royndarstoyping*

Ein formur er í tveimum løgum, fyrst eitt lag av silikon og so ein kappi av gipsi uttaná, so innari formurin kann halda skapið. Besti máti at goyma tílíkar formar sum longst er at stoypa eitt kopi, sum verður goymt í forminum. Um formurin liggur tómur, so kann hann snara sær á ella skrædna. Formurin er serliga viðbrekin, um hann er stórur, og gipskappin er í fleiri pørtum. Tað er av størsta týdningi at hava nógva og holla vitan, so tískil varð mett, at hon eisini skal fáast úr hesum formunum.

Uppgávan hjá Anne Prejsz var eisini at kanna, um formarnir enn kunnu brúkast at stoypa í. Anne Prejsz gjørdi nakrar royndir, og vístu tær, at í fleiri førum ber til at stoypa meira enn eitt kopi. Í øðrum førum eru formarnir so viðbreknir, at tað helst bara kann gerast tann eina útstoypingin.

Hóast nýggja tøkni, sum eitt nú 3D skannarar, so er "gamla" skrásetingin – dokumentatiónin – avgjørt ein stuðul og eitt amboð at skilja og kanna gamalt handverk. Fyri at fáa mestu vitan úr formunum, so má stoypast í allar gjørdar formar sum skjótast, eins og metast má um, um fleiri formar og stoypingar eiga at verða gjørdar.

Ætlanin er, at hetta arbeiði heldur fram í 2023.






*Petur Hansen 3D-skannar ein kirkjubøstól*

# FORNLUTIR ÚR KIRKJUBØ OG SKIPSVRAK 3D-SKANNAÐ

**Í 2021 ognaði Tjóðsavnið sær tveir neyvar hondhildnar 3D skannarar. Fyrsta árið varð steinasavnið í Kirkjubø 3D-skannað. Arbeiðið at 3D-skanna ymiskar gripabólkar helt fram í 2022, og aftur var serligur dentur lagdur á gripir úr Kirkjubø**

Helgi Dahl Michelsen, savnsvørður og Petur Hansen, fornfrøðingur

**Fýra skanningarverkætlanir vóru** í farna árinum. Tríggjar vóru við gripum úr Kirkjubø og tann fjórða við viðarlutum av skipsvraki úr Sørvági.

Lagt varð fyri á Tjóðsavninum við at skanna bygningslutir úr viði, ið komu undan kavi í fornfrøðiliga grevstrinum í 1950unum niðri á Dunga í Kirkjubø. Hesir hava ligið á goymslu og eru ongantíð veruliga skrásettir. Hetta vóru 59 lutir. At bygningslutirnir nú eru 3D-skannaðir, fer at lætta um, tá finnast skal útav, hvat slag av bygningum stóðu á Dunga í miðøld.

Í sama viðfangi sum Dungatilfarið varð 3D-skannað, vórðu 25 trælutir av einum skipsvraki úr Sørvági eisini skannaðir. Hesar skipslutir vórðu grivnir upp við gravmaskinu, tá Sørvágs kommuna legði kaðalar til sjóhitaskipan til skúlan í 2011. Morten Gøthche, serfrøðingur á Roskilde Vikingeskibsmuseum, hevur síðani gjørt nýggja meting av skipsvrakinum út frá 3D-skanningunum. Morten Gøthche tíðarfestir skipið til eldri enn 1850, men ikki eldri enn 1600, hetta tí at tað einans eru nýttir trænaglar at halda bond og klæðing saman við. Hann metir, at talan er um eitt 15-20 m langt far, ið er bygt á vanligan hátt, t.v.s. sum ein "jagt", og ikki flatbotnað sum tey hálendsku.

Í kjallaranum í bóndahúsunum í Kirkjubø hava ymiskir áhugaverdir viðarlutir ligið leingi, tað mesta fornt bygningstilfar og innbúgv. Á sumri 2022 vóru hesir viðarlutir fingnir niðan í fjósið í Kirkjubø, har teir síðani vórðu 3D-skannaðir. Flestu av hesum lutum hava helst sín uppruna í bóndahúsunum, áðrenn tey vóru umvæld í 1950unum. Granskarar hava tó mett, at nakrir av bygninglutunum kunnu stava frá øðrum miðaldarbygningum í Kirkjubø, og nú lutirnir eru skannaðir í 3D, verður lættari at kanna hesar lutir nærri.

Í desember varð farið undir at 3D-skráseta kirkjubøstólarnar og hartil hoyrandi trægripir, so sum Madonnustandmyndina, bispastólin og halgikrossin. Hetta arbeiðið varð gjørt inni í framsýningini, so vitjandi fingu møguleika at eygleiða skanningararbeiðið.

At hesir gripir, 151 í alt, úr 4 ymiskum verkætlanum, nú eru skannaðir í 3D, merkir, at vit nú hava nágreiniligar og mátfastar uppmátingar av gripunum, ið granskarar og onnur áhugað hava atgongd til gjøgnum alnótina.

Alt, sum er skannað í 2021 og 2022, er nú tøkt ella verður tøkt í næstum á sketchfab-vanganum hjá Tjóðsavninum https://sketchfab.com/Savn


*Øll hava atgongd til 3D-myndlarnar hjá Tjóðsavninum á alnótini*



*Gamla dekkið niðanfyri kirkjuna. Vánaligi standurin, ið dekkið var í, sæst týðiliga*



*Arbeitt verður við at forskalla og binda jarn. Til høgru á myndini síggjast klettarnir, ið eru lagdir uttanfyri og bundnir saman við ketu*

# BRIMVERJA Í KIRKJUBØ

Í 2022 var brimverjan undir sóknarkirkjuni í Kirkjubø umvæld og styrkt. Hetta er eitt framhald av arbeiðinum, sum hevur verið gjørt seinnu árini at tryggja fornminnini í Kirkjubø móti brimi. Arbeiðið byrjaði undir Líkhúsi, har verandi múrur varð styrktur og nýggjur múrur stoyptur sunnanfyri verandi

Herleif Hammer, stjóri

**Tað var Jóannes** Patursson, bóndi, sum laðaði verjugarð undir sóknarkirkjuni í sínari tíð. Síðani varð henda verja víðkað, men nú var hildið, at tíðin var komin at gera eina størri umvæling, samstundis sum fleiri onnur átøk skuldu fremjast. Ágangurin frá brimi tykist bert at økjast í Kirkjubø. Sama skilið er á flest øðrum brimplássum í Føroyum, og eru ógvusligu veðurlagsbroytingarnar, vit uppliva, orsøkin til hetta.

Umvælingarnar fevndu um at skifta partar av stoypta verjugarðinum. Somuleiðis varð dekkið niðanfyri kirkjuna skift. Sokkul varð eisini stoyptur undir verandi verjugarð fyri at verja undirstøðið. At enda vórðu stórir klettar lagdir uttanfyri og leinkjaðir saman, hetta fyri at taka megina úr aldubrotunum.

Tá slíkt arbeiði verður gjørt, er neyðugt at vera sera varin, tí tað, ið gjørt verður, skal helst skemma sum minst, so virðið og upplivingin ikki versnar hjá teimum, ið búgva har, og teimum, ið vitja. Tí verður altíð roynt at finna loysnir, sum til ber at at taka burtur ella betra uttan at skaða tað, ið roynt verður at verja. Sagt verður, at loysnirnar skulu verða "reversiblar". Næsti liður í arbeiðinum í Kirkjubø er at tryggja lendið millum sóknarkirkjuna og Líkhús.



*Ein illveðursdag í november var henda myndin tikin. Her sæst, at verjan tykist rigga eftir ætlan*



# Nýtt dren norðanfyri Múrin

Sera vátt hevur verið inni í Múrinum í langa tíð. Serliga er tað vatn, sum hevur seyrað inn í sakrestiið frá eystursíðuni og norðursíðuni. Hetta gjørdi, at tað kundi vera sera ónossligt hjá fólki at ganga inni í Múrinum, men verri var, at henda seyringin av vatni undir og gjøgnum Múrin ikki var góð fyri hann

Herleif Hammer, stjóri

**Fleiri royndir hava** gjøgnum tíðina verið gjørdar at fáa vatnið burtur, men tær hava ikki riggað nóg væl. Í 2022 var so ein nýggj roynd gjørd, og hesaferð skuldi farast meira gjølla til verka; har varð grivið og brekkað fyri at fáa vatnstreymin burtur frá Múrinum, og síðani var dren lagt í. Fyrst var drenað á eystursíðuni. Tað hjálpti heilt væl, men enn seyraði inn í sakrestiið frá norðursíðuni. Her hevði verið roynt at drena fyri fáum árum síðani, men hetta eydnaðist ikki. Nú varð grivið niður á hellu, ein renna brekkað niðurí, og drenrør løgd í rennuna.

Hesi átøk sýnast at roynast sera væl og styrkja munandi um varðveitsluna av Múrinum. Harafturat ber nú til at gera ymisk átøk inni í Múrinum, m.a. ein útgrevstur av gólvinum í sakrestinum og ein partvís álegging av gólvi inni í Múrinum og sakrestinum.

Tað var Ólavur Reinert, sum stóð fyri arbeiðinum.



*Arbeiðið liðugt á norðursíðuni*



*Á norðursíðuni. Grivið varð niður á hellu. Síðani varð ein renna brekkað, og drenrør løgd niðurí*



*Eystanfyri Múrin rennur sera nógv vatn. Her var neyðugt at brekka eitt sindur av helluni, so vatnið varð leitt út frá Múrinum og síðani í eina veit*



*John Debes Jacobsen á Tjóðskjalasavninum greiðir frá, hvussu dagbøkurnar verða skannaðar*

# DAGBØKURNAR HJÁ KENNETH WILLIAMSON

Í krígsárunum 1940-1945 var kendi fuglafrøðingurin Kenneth Williamson í hertænastu í Føroyum. Umframt sínar herskyldur fekst hann nógv við at gera lívfrøðiligar og samfelagsfrøðiligar rannsóknir, har hann lýsti náttúru og fólk í Føroyum

Jón Aldará, lívfrøðingur

**Niels J. Arge** skrivaði um Williamson, at "*...fleiri ferðir fór Kenneth ikki til Bretlands at halda frí sum hinir hermenninir. Hann fór heldur at ferðast í Føroyum at hitta fólk, sum kundu greiða honum frá, hvussu samfelagið var lagað og virkaði.*" Bókin "The Atlantic Islands" kom í 1948 burturúr vitanini, sum hann hevði nomið sær.

Williamson gifti seg við Esther Louise Rein úr Havn. Í Føroyum fingu tey eina dóttir, Hervør, og síðani fluttu tey til Fair Isle í Hetlandi, har Williamson grundlegði eina fuglaeygleiðingarstøð. Seinni fingu tey sonin, Robin, og fluttu til Onglands, har tey búðu restina av lívinum.



*Kenneth Williamson*

## TÍGGJU DAGBØKUR UM KRÍGSÁRINI

**Í mars 2022** setti Robin Williamson seg í samband við Tjóðsavnið og onnur í Føroyum um tvær dagbøkur hjá pápa sínum, sum hann ikki visti um áður, og sum hann hevði funnið fram úr búgvinum, sum mamman, Esther, legði eftir seg í 2015. Umframt hesar báðar dagbøkurnar vóru átta aðrar, sum Robin fyrr hevði latið bókasavninum, The Chris Mead Library, hjá bretska fuglafrøðifelagnum British Trust for Ornithology (BTO), ið er fyrrverandi arbeiðsgevarin hjá pápanum. Robin ynskti, at hesar bøkur vórðu talgildar og atkomiligar hjá almenninginum.



*Tvær síður úr einari av dagbókum Kenneth Williamsons, sum lýsa ein túr um Hvalvíksskarð*



*Frá vinstru: Lesley Hindley, Maria Heradóttir, Jón Aldará og Chris, maður Lesley*

Tær tíggju dagbøkurnar fevndu tilsamans um øll krígsárini, tá Kenneth Williamson gjørdi sínar rannsóknir í Føroyum, og vóru helst grundarlagið undir "The Atlantic Islands". Nógv týðandi vitan finst í hesum dagbókum um bæði náttúru- og samfelagssøgu Føroya, og var mett, at tær hava stórt virði fyri landið. Tjóðsavnið játtaði tí Robin at skipa fyri hesum talgildingararbeiðinum.

## FØROYAVITJAN

**Í november 2022** bjóðaði Tjóðsavnið skjalavørðinum hjá BTO, Lesley Hindley, til Føroya at vitja saman við manninum Chris, og hevði hon allar 10 dagbøkur Kenneth Williamsons við sær úr Bretlandi. Avtala varð gjørd við John Debes Jacobsen, skjalavørð, at Tjóðskjalasavnið tók sær av innskanning av bókunum. Tær eru nú skrásettar á Tjóðskjalasavninum, og avrit eru latin Tjóðsavninum, BTO og familjuni hjá Kenneth Williamson.

Áðrenn Lesley Hindley kom til Føroya, fekk hon samband við Mariu Heradóttir, sum er familja hjá Williamson húskinum, og sum hevur havt gott samband við tey í mong ár. Jón Aldará frá Tjóðsavninum hitti, saman við Lesley og Chris, Mariu, sum greiddi frá sínum upplivingum við Kenneth, Robin og øðrum.

Umframt at gera tær uppgávurnar, sum snúðu seg um nevndu dagbøkurnar, so vitjaðu Lesley og Chris eisini aðrastaðni á Tjóðsavninum, og Lesley hevði áhugaverda framløgu um skjalasavnið hjá BTO fyri øllum starvsfólkunum í Kúrdali.

Tíverri andaðist Robin Williamson hin 4. september í 2022, og fekk hann tí ikki møguleikan at frætta, at dagbøkur pápans komu á rætta stað. Vit takka honum fyri, at hann við einari av síðstu gerðum sínum læt bøkurnar til almenningin at nýta og njóta. Friður veri við minninum um Robin.

# Gáva Føroya Løgtings og Føroya Landstýrisins til hennara hátign Margrethu drotning II

Herleif Hammer, stjóri

14. januar 2021 vóru 50 ár liðin, síðani hennara hátign Margretha gjørdist drotning í danska kongaríkinum. Í hesum sambandi vóru nógv minningarhald og tiltøk hildin um alt Danmark í 2022. Eisini almennu Føroyar heilsaðu drotningini, og á tiltaki í Fólkatinginum 14. januar 2022 handaði Bárður á Steig Nielsen, løgmaður, drotningini gávu frá Føroya Løgtingi og Føroya Landsstýri



Ein av arktisku pílunum var "settur upp" í glaskúlu fyri at ímynda gávuna



*Bárður á Steig Nielsen, løgmaður, heilsar uppá drotningina eftir, at hann hevur hildið røðu og handað hennara hátign gávuna*

MYND: SCANPIX

**Bert eitt hálvt** ár frammanundan hevði løgmaður handað drotningini gávu frá Føroyum í sambandi við, at drotningin fylti 80 ár. Henda gávan skuldi handast í 2020, men orsakað av koronustøðuni tá, var hetta útsett til árið eftir.

Løgmansskrivstovan, formansskapurin í Løgtinginum, Uttanríkis- og Mentamálaráðið (UMMR) og Tjóðsavnið samstarvaðu um at framleiða føroysku gávuna. Gávan var ein eftirgjørdur prónur úr gulli frá víkingatíð, sum var funnin á útgrevstri í Tjørnuvík. Orsakað av stóra áhuganum, drotningin hevði fyri fornfrøði, og tí at drotningin sum prinsessa vitjaði í Tjørnuvík í 1971, var hetta ein hóskandi gáva til drotningina.

Hesa ferð var eisini heitt á Tjóðsavnið um, saman við Løgmansskrivstovuni, formansskapinum í Løgtinginum og UMMR at samstarva um eina gávu til drotningina. Hesaferð ynskti mann frá politiskari síðu at geva eina gávu, sum tók støði í veruleikanum í dag, og sum samstundis peikaði frameftir.



*Ein snotiligur faldari var framleiddur í heilt fáum eintøkum, sum stutt lýsti verkætlanina í Koltri og gávuna. Hesin var handaður drotningini 15. januar 2022 í sambandi við hátíðarhaldið á Christiansborg. Myndin er av heilsanini, Løgtingið og Landstýrið góvu drotningini á síðu 3 í faldaranum*





*Gávan var eitt bil sýnd fram í framsýning Tjóðsavnsins í Brekkutúni í Hoyvík*

Úrslitið varð, at gávan gjørdist ein partur av ætlan Tjóðsavnsins í Koltri. Eitt av endamálunum í "Koltursætlanini" er at endurskapa frumnáttúru á ávísum økjum í Koltri. Við at taka seyðin av og planta frumplantur, sum annars seyðurin vanliga týnir, er ætlanin, at ávís øki skulu kunna vísa, hvussu føroyska nátturan kann hava sæð út, áðrenn seyður kom til oyggjarnar.

Vitandi at drotningin seinastu mongu árini hevur víst náttúruni og umhvørvinum stóran ans, og at hon og forfedrar hennara altíð hava ynnað Koltur, var hetta mett at vera ein sera væl hóskandi gáva.

Drotningin fekk 50 tær fyrstu pílaplanturnar av slagnum arktiskur pílur í gávu. Planturnar standa í dag í urtagarði Tjóðsavnsins í Hoyvík. Har verða tær standandi til summarið 2024 ella 2025, tá tær verða fluttar út í Koltur.

*Mynd tikin norðarlaga á Kunoynni. Á hesum staði er seyður ongantíð sloppin til, og týðuligt er at síggja, hvussu øðrvísi vøksturin er her enn í vanligu høgunum í Føroyum. Á myndini síggjast nógvar ymiskar plantur, og arktiski pílurin er sera væl umboðaður*

MYND: PÓL SUNDSSKARÐ



*Føroyskir bátar á Kongabrúnni í Havn*
MYND: ÓLAVUR FREDERIKSEN

# FØROYSKI BÁTURIN

## BÁTASMÍÐ, SIÐIR OG BRÚK

Tiltak á Tjóðsavninum 17. november 2023

Kristina Djurhuus Christiansen, savnsvørður

**UNESCO-sáttmálin um verju av siðaarvi frá 2003 varð settur í gildi í Føroyum í oktober 2018 og varð latin Tjóðsavninum at umsita í 2020. UNESCO-sáttmálin bindir limalondini at seta mannagongdir og skipanir í verk, sum tryggja siðaarvinum livilíkindi, harundir at kveikja nýtt lív í partar av siðaarvinum, har tað er tørvur á tí**

**Ein partur av** sáttmálanum snýr seg um verju av siðbundnum handverki. Føroyski báturin kom á UNESCO-listan fyri umboðandi siðaarv hjá mannaættini í desember 2021, og harvið hava vit eina serliga skyldu til at tryggja bátinum livilíkindi. Skal handverkið bátasmíð, og harvið føroyski báturin, tryggjast fyri framtíðina, er neyðugt at kanna, hvørji tiltøk kunnu setast í verk til frama fyri bátasmíð og brúkið av bátinum.

Tiltakið *Føroyski báturin – bátasmíð, siðir og brúk* var tað fyrsta almenna tiltakið í einari røð av tiltøkum við tí endamáli at viðgera, hvørjar skipanir kunnu setast í verk fyri at verja føroyska bátin.

Stór undirtøka var til tiltakið, og hetta vísir, at har er ein stórur áhugi í og vilji til at varðveita bátasiðvenjuna í Føroyum.

## BAKGRUND

**UNESCO-innskrivingin av norrønu** súðubygdu bátunum er ein felags norðurlendsk innskriving, sum Norðurlond hava samstarvað um síðani 2015. Tað var norska áhugafelagið Forbundet Kysten, sum samskipaði norðurlendska samstarvið. Í Føroyum vóru umboð fyri bátafeløg, søvn og bátasmiðir við í verkætlanini frá byrjan, og Mentamálaráðið samskipaði tað formliga arbeiðið við umsóknini í Føroyum, sum í mars 2020 varð latin UNESCO.

Langt áðrenn tað kom uppá tal at innskriva bátin á UNESCO listan, hevur nógv verið prátað um at varðveita føroyska bátin og føroyskt bátasmíð. Í 2001 skrivaði Regin Debess, fyrrverandi savnslærari á Tjóðsavninum, í áheitan til táverandi Undirvísingar- og mentamálastýrið, at "okkurt má gerast fyri at verja føroyska bátasmíðið". Í áheitanini var uppskot um at seta ein bólk at gera tilmæli um føroyskt bátasmíð. Málið fekk góða undirtøku, men tað gingu tó nøkur ár, áðrenn ein arbeiðsbólkur í 2011 varð settur at skriva álit um føroyskt bátasmíð. Álitið varð útgivið í 2012, og hevði heitið *Føroyskt bátasmíð – álit um at skapa føroyskum bátasmíði livilíkindi*. Har vóru nógv góð tilmæli í, men fá eru tó sett í verk.

At tað hevur verið so torført at fáa nakrar ítøkiligar loysnir settar í verk, kemst allarhelst av, at hetta ikki er eitt lætt mál at loysa. Hóast tað tykist drúgt, so munnu tey flestu vera samd í, at føroyski báturin, bátasmíð og brúkið av bátinum hava mentanarlig virði, ið eiga at verða varðveitt.



*Greipur á regatta 2019*
MYND: JENS KRISTIAN VANG

## TILTAKIÐ

**Skráin til tiltakið** var fjølbroytt og lýsti føroyska bátin úr nógvum ymiskum sjónarhornum. Gjøgnumgangandi í framløgunum var, at føroyski báturin hevur dygdir, sum hava nakrar serstakar upplivingar við sær, eitt nú nærleika við sjógvin og náttúruna. Harafturat vístu framløgurnar, hvussu fjølbroytt brúkið av bátinum er. Føroyski báturin er væl skikkaður til ferðavinnuvirksemi, ítrótt, frítíð og undirvísing.

## SKRÁIN

*Armgarð Weihe*, aðalskrivari í føroysku UNESCO-nevndini, setti tiltakið og greiddi frá um tilgongdina at fáa føroyska bátin á UNESCO listan.

*Hanus Jensen*, bátasmiður á Vikingeskibsmuseet í Roskilde, greiddi frá um hansara lívsyrki sum bátasmiður. Millum annað greiddi Hanus Jensen frá um tað serstaka í føroyskum bátasmíði í mun til bátasmíð í eitt nú Danmark, Norra og aðrastaðni.

*Tóta Árnadottir*, Ph.d. lesandi á Føroyamálsdeildini, helt ein fyrilestur um avbjóðingar við at innskriva siðaarvin á UNESCO-listan. Ein vandi er, at siðaarvurin verður fastlæstur í einari tíðarmynd, heldur enn at hann er livandi og broytiligur.

*Samson Højgaard* frá Boat.fo segði frá sínum virksemi innan ferðavinnuna, har hann m.a. hevur familjutúrar og fiskitúrar í føroyskum bátum.

*Maybritt við Strond* frá bátafelagnum Knørri greiddi frá um motiónsróður, har miðalaldurin liggur á umleið 50. Dentur verður lagdur á felagsskapin og tær góðu løturnar í náttúruni.

*Jóguan Henriksson*, lærari í Sankta Frans skúla, greiddi frá, hvussu hann brúkar føroyska bátin í undirvísingini, og hvussu væl báturin er egnaður til serflokkar.


*Motiónsróður*
MYND: RÓÐRARFELAGIÐ KNØRRUR



*Hvalastøðin við Áir*

*Herleif Hammer*, stjóri á Tjóðsavninum, endaði kvøldið við at vísa á, at føroyski báturin er við at hvørva úr bátahyljunum kring landið, og hann setti síðani gongd á hugarok um, hvat kann gerast fyri at venda gongdini. Her vóru nógv góð hugskot millum luttakararnar.

## UPPSKOT TIL VARÐVEITING AV FØROYSKA BÁTINUM

**Tað finst ikki** bara ein loysn, sum loysir avbjóðingarnar hjá føroyska bátinum, men heldur ein teyggja av smáum og størri til- og átøkum, sum kunnu skapa føroyska bátinum og bátasmíði livilíkindi. Fyrst og fremst mugu vit gera bátin viðkomandi aftur, soleiðis at hann verður eftirspurdur, og soleiðis at bátasmiðir fáa smíðað fleiri bátar.

## ÓKEYPIS BÁTAPLÁSS

**Kommunur kunnu hjúkla** um tey, sum fáast við føroyska bátin í frítíðini, og lata teimum, sum hava føroyskan bát sleppa framum í bíðirøðini at fáa bátapláss og lata hesi ókeypis. Sjálvandi er treytin tann, at bátaplássið verður brúkt til endamálið.



*Bátaumhvørvi á Glyvrum*

## BÁTAUMHVØRVI

**Bátaplássini skulu liggja** væl fyri, so at fólk fáa gleði av umhvørvinum. Har eru høli til at bátar kunnu verða tiknir upp til umvælingar, og til at bátafelagsskapir kunnu hava ein felagsskap. Onnur vinna kann verða knýtt at, eitt nú smærri handilsfyritøkur, søvn og matstovur. Harafturat kann vera møguleiki hjá fólki, sum ikki hava atgongd til bát, at læna/leiga bát fyri at fara á flot.

Kommunurnar kunnu skipa fyri, at høli eru tøk til privatfólk at umvæla og viðlíkahalda sínar egnu bátar. Hølini kunnu vera partur av einum størri bátaumhvørvi, har tað er møguligt.



*Drátturin á gjónni í Norðradali*

Kommunur skulu hava serlig øki, har bert føroyskir bátar hava atgongd. Økið skal verða undir hálvtaki og brúkast til at halda bátar við líka og til at hava bátar standandi á hávetri.

## BÁTAUMHVØRVI VIÐ ÁIR

**Ein depil fyri** føroyskar bátar og bátasmíð kundi ligið við Áir. Tað eru fá støð í Føroyum, sum eru so trygg í mun til streym, veður og vind. Ætlanin er at skipa Hvalastøðina við Áir sum savn, og at økið sunnan fyri hvalastøðina verður ment við tænastum til ferðavinnu, bátaumhvørvi og annað. Eitt nú kundi hugsast, at neyst verða bygd, ið ferðafólk kunnu leiga.

## UNDIRVÍSING Í FÓLKASKÚLANUM

**Brúkið av føroyska** bátinum hóskar væl til undirvísing. Jógvan Henriksson, lærari í Sankta Frans skúla, hevði eina framløgu um, hvussu væl skikkaður báturin er til undirvísing, serliga í serflokkum. Meðan tey rógva út, práta tey um skipini, havnina, hvat er á bátinum og um tað, tey síggja. Harafturat kunnu tey práta um hugtøk í málinum, t.d. "at hava gott áralag", "at hava stavnhald í lívinum", og hvat tað merkir at "leggja lunnar undir okkurt". Tað er sera gott fyri næmingar í serflokkum, sum hava trupulleikar við at hugsavna seg, tí tá teir eru úti í bátinum, er einki órógv, og teir kunnu hugsavna seg til fulnar.

Føroyski báturin kundi verið tikin við í viðkomandi námsætlanir og settur í fólkaskúlalógina, eins og føroyski dansurin er.

## BØRN OG UNG

**Børn og ung** eiga at hava atgongd til føroyska bátin. Báturin eigur at vera sjónligur, børn kunnu vitja bátasmiðir, og báturin kann vera á spæliplássum (við møguligari tillaging fyri trygd). Fyri ikki so langari tíð síðani var vanligt, at ein gamal føroyskur bátur lá á einum spæliplássi ella í barnagørðum, men tað eru fá spælipláss og fáir dagstovnar, sum hava ein føroyskan bát nú.

## KVØLDSKÚLATILBOÐ

**Tórshavnar kvøldskúli skipar** fyri skeiði í bátasmíði. Á ymsum kvøldskúlum kring landið kann mann taka eina dugnaskaparroynd, har undirvíst verður í siglingarlæru, sjómansskapi og veður- og streymviðurskiftum. Afturat hesum kundu kvøldskúlar skipað fyri skeiði í at brúka og halda føroyska bátin. Skeiðið kundi fevnt um at rógva, sigla, fiska við siðbundnum reiðskapi, um mið og siðbundna vitan um brúk av føroyska bátinum.

## DRÁTTIR OG LENDINGAR

**Dráttir og lendingar** eiga at verða væl røkt. Á teimum støðum, har ikki er møguligt at hava bátahyl, verða dráttir og lendingar nýtt í staðin. Hetta merkir, at bátarnir skulu dragast upp eftir brúk. Her er føroyski báturin serliga skikkaður, og verða tí næstan bara føroyskir bátar nýttir á hesum støðum. Tað er tí av stórum týdningi, at dráttir og lendingar kring alt landið verða væl røkt, so møguleiki framvegis verður at hava bát á hesum støðum.

## STUÐULSJÁTTAN

**Ein árlig játtan** kundi verið sett av til bátasmíð, bæði nýbygging og umvæling. Tey, sum kunnu fáa stuðul, eru fólk, sum ynskja at keypa ein bát ella eiga ein bát, sum skal umvælast. Tað kann t.d. vera ein upphædd ímillum 10-30.000, sum verður veitt út frá einari meting av, hvat skal gerast. Hendan játtanin kann vera umsitin av Tjóðsavninum.



*Báturin Sunnba*
MYND: ÓLAVUR FREDERIKSEN



*Ferðafólk á rundferð í føroyska bátinum*
MYND: BOAT.FO

## TILFAR

**Tilfar sum t.d.** serliga bátaseymur og viður átti altíð at verið á goymslu í Føroyum. Sølan hevur seinni árini verið hjá áhugaðum privatfólki, tí timburhandlarnir hava ikki havt áhuga í hesum, tí ov lítið fæst burturúr søluni.

Ein tílík skipan kundi verið umsitin á Tjóðsavninum, har ein handil longu er við savnslutum. Tá ein bátaverkstaður er skipaður, kundi sølan verið flutt hagar.

## EITT LIVANDI BÁTASAVN

**Føroyski báturin er** væl varðveittur og skjalfestur sum savnslutur, men verri er tó við sjálvum handverkinum at smíða bát og siðvenjuni at nýta bát. Í okkara grannalondum gera tey nógv fyri at varðveita handverkið. Til dømis hava tey bátasmiðir knýttar at savninum í Vikingeskibsmuseet í Roskilde og Hardanger fartøyvernsenter í Norra, og tey seta lærlingar við. Har eru fleiri bátasøvn í Føroyum, sum hava ynski um at hava eina bátasmiðju knýtta at sær, soleiðis at tað verður eitt livandi bátasavn.

Um eftirspurningurin eftir føroyskum bátum ikki verður nóg stórur, kundi landið tryggjað fíggingina og latið nakrar bátar verða smíðaðar um árið.

## SKIPA ÚTBÚGVING TIL BÁTASMIÐ SUM YRKISÚTBÚGVING

**Um eitt livandi** bátasavn hevði verið sett í verk, kann ein bátasmiður vera settur í fult starv, og hann kann hava lærlingar. Útbúgvingin til bátasmið eigur at verða skipað sum ein yrkisútbúgving, og samstarv við ein útlendskan stovn kann setast í verk. Vikingeskibsmuseet í Roskilde er ein upplagdur samstarvspartnari, tí tey hava bátasmiðir í starvi og lærlingar og ikki minst, tí føroyski bátasmiðurin, Hanus Jensen, hevur starvast har í ein mansaldur.

## FERÐAVINNA OG FØROYSKI BÁTURIN

**Føroyski báturin riggar** væl til ferðavinnuna. Fleiri ferðafólk leita eftir hugdýpandi náttúru- og mentanarupplivingum, og hetta riggar føroyski báturin sera væl til. Á tiltakinum greiddi Samson Højgaard (Boat.fo) frá um familjutúrar, fiskitúrar og útferðir og fortaldi um serstakar náttúruupplivingar, sum túrarnir hava.

## FUGLAVEIÐULÓG

**Nógv verður tosað** um, at sjófuglastovnar okkara – serliga hjá svartfuglunum – eru í støðugari minking. Torført er at fáa eitt veiðiforboð, tí veiðimentanin liggur djúpt í føroyinginum.

Vit hoyra eisini javnan um, hvussu skjóttgangandi bátar stima fugl upp, til hann ikki orkar meira. Somu bátar kunnu stima allar Føroyar runt uppá ein seinnapart, meðan leitað verður eftir fugli. Hetta er ikki burðardygg veiða.

Ein loysn kundi verið, at heldur enn at banna fuglaveiði, so ber til at seta serligar treytir við, hvussu fuglurin kann veiðast. Hetta kundi verið at avmarka stødd og ferð á bátum, sum hava loyvi at skjóta fugl. T.d. kundi lógin sagt, at bert er loyvt at veiða fugl við siðbundnum føroyskum bátum, sum ikki kunnu sigla skjótari enn 8 míl.

Á henda hátt hevði veiðan framvegis verið gjørlig, hugurin at hava føroyskan bát hevði vaksið og sum tað týdningarmiklasta, so hevði fuglurin verið vardur.

## MOTIÓNSRÓGVING

**Róðrarfeløgini skapa góðar** umstøður fyri motiónsrógvarar. Motiónsrógving kunnu flest øll vera við í, men miðalaldurin liggur um 50 ár. Motiónsróður er tekniskt lættur og styrkir bæði sinn og skinn. Róð verður alt árið, og gevur tað luttakarunum eitt náttúrligt samband við bátin. Harafturat er hesin róðurin, sum jú er alt árið, við til at gera føroyska bátin sjónligan.

## BÁTASØLU VIÐ FRAMSÝNING AV BÁTUM, SUM ERU TIL SØLU

**Vanligt er, at** tá ein skal fáa ein nýggjan bát smíðaðan, at ein vendir sær beinleiðis til ein bátasmið og bíleggur ein bát. Hetta riggar væl, men ein møguleiki átti at verið afturat. Tað átti at verið eitt ella fleiri støð, har nýggir bátar, sum vóru til sølu, vórðu sýndir fram. Kanska á sama hátt sum vit kenna sýnisgluggarnar hjá bilasølunum.

Á henda hátt kundi mann kveikt áhuga millum fólk, ið ynskja at keypa, ella bert eru forvitin.

## SKIPAÐ KAPPSIGLING

**Kappsiglingarnar verða uppafturtiknar** og lagdar í fasta legu summarhálvuna. Segl hoyrir til føroyska bátin, og tað hevur týdning, at brúkið av seglinum ikki verður gloymt.

## SKÓTAR (SJÓSKÓTAR)

**Skótarørslan ger eitt** megnar arbeiði millum tey ungu. Tey læra m.a. um neyðhjálp, tjalding, at matgera og binda knútar. Eisini læra tey um náttúruna, og gulu skótar eiga eisini føroyskan bát.

Kanska kundu vit í Føroyum havt serligar sjóskótar, har føroyski báturin er í fokus.

## RÁÐSTEVNA

**Bygdasøvn kundu saman** við Tjóðsavninum skipað fyri ráðstevnum um føroyska bátin annaðhvørt ár.

Her kundi støðan hjá føroyska bátinum verið tikin upp, og hvat av týdningi er hent síðani seinast. Skipast skal fyri tiltøkum sum fyrilestrar, bátasmíði, tiltøkum fyri børn og ung, at lata heiðurslønir o.s.fr. fyri at heiðra føroyska bátin á ymiskan hátt.

Ráðstevnurnar kundu verið partur av grundarlagnum fyri teimum frágreiðingum, ið skulu latast UNESCO 6. hvørt ár.

## SAMANUMTIKIÐ

**Tað er ikki** bara eitt tiltak, sum fer at bjarga bátinum, men heldur ein røð av tiltøkum, sum á sín hátt kundu verið við til at tryggja, at føroyski báturin, bátasmíð og brúkið av bátin er ein partur av livandi mentanini í Føroyum, eisini í framtíðini. Nøkur tiltøk at verja siðaarvin eru lætt at seta í verk, og onnur tiltøk krevja meira.

Myndugleikar, søvn, felagsskapir og einstaklingar mugu á hvør sínum øki gera sítt fyri, at brúkið av føroyska bátinum mennist, so hann verður vanligur í brúki aftur.

Tað, sum hevur týdning, er at gera føroyska bátin viðkomandi aftur, soleiðis at eftirspurningurin veksur, og vit harvið fáa fleiri bátar smíðaðar.

Í álitinum um føroyskt bátasmíð frá mars 2012 var ein røð av tilmælum um, hvat kann verða gjørt fyri at skapa føroyskum bátasmíði livilíkindi. Eitt av átøkunum, ið vórðu nevnd, er rokkið, nevniliga at UNESCO-sáttmálin um verju av siðaarvi er settur í gildi fyri Føroyar.

**Hini átøkini, ið vórðu nevnd, eru enn líka viðkomandi:**

- Karmar verða skaptir fyri skipan av livandi søvnum innan føroyska savnslóggávu
- Róðrarsamband Føroya í sínum regluverki tekur atlit at aðalreglunum í upprunasniðinum á føroyska bátinum
- Játtan verður sett av á fíggjarlógini til frítíðarfeløg, ið eru um tann siðbundna føroyska bátin
- Útbúgving í siðbundnum bátasmíði verður skipað sum yrkisútbúgving
- Skeið í bátasmíði verða fyriskipað á tekniskum skúla í samstarvi við Tjóðsavnið
- Samstarv verður skipað millum skúla og søvn um livandi savnsvirksemi
- Samstarv verður skipað millum ferðavinnu og bátasmíð

## MEN HVUSSU KOMA VIT NÚ VÍÐARI?

**Fyritreytin fyri at** vit koma víðari er, at tann politiska skipanin tekur eina miðvísa avgerð um, at føroyski báturin skal varðveitast.

Tjóðsavnið hevur førleikarnar til at samskipa gongdina. Eitt nú kann Tjóðsavnið savna eina arbeiðsbólk við viðkomandi umboðum fyri bátafeløg, bátasmiðir, kommunur, stovnar, ferðavinnu, útbúgvingarstovnar og onnur, har vit í felag kunnu leggja eina ætlan fyri, hvørji tiltøk og átøk skulu fyriskipast fyri at tryggja komandi ættarliðum føroyska bátin, føroyskt bátasmíð og -brúk.

Tjóðsavnið kann kanna, í samstarvi við myndugleikar og áhugafeløg, hvørjir møguleikar eru fyri at skipa fyri einum livandi bátasavni. Eitt livandi bátasavn í einum maritimum øki, sum liggur tætt við miðbý, tætt við matstovur og handlar, kann skapa lív og trivnað og gera bátin og handverkið sjónligt. Hetta hevði verið til gleði fyri øll – borgarar, ferðafólk, bátasmiðir, barnagarðar, skúlaflokkar og onnur áhugað.

Tiltakið *Føroyski báturin – bátasmíð, siðir og brúk* á Tjóðsavninum 17. november 2022 var tað fyrsta í røðini við tí endamáli at viðgera, hvørjar skipanir kunnu setast í verk fyri at verja føroyska bátin. Tjóðsavnið fer framyvir at skipa fyri fleiri viðkomandi tiltøkum um føroyska bátin.





*Umborð á Johonnu. Siglt var úr Vági til Tvøroyrar henda góða heystardag í oktober. Frá vinstru: Kaj Suni Toftum, Hans Jakke Bech, Jes Kroman og Gudmundur Jacobsen*

*Gæsa stendur í eini høll á Eiði. Sum sæst er langur vegur eftir, áðrenn klárt er at flota bátin. Frá vinstru: Arni Petersen, Óli Jákup Tvørfoss og Jes Kroman*

# MENTANARSØGULIG SKIP ENDURSKOÐAST

## Jes Kroman, skipsarkitektur, vitjar

Tey skip, sum eru við í almennu stuðulsskipanini í sambandi við mentanarsøgulig skip, skulu sambært kunngerð endurskoðast 7. hvørt ár. Fyri at ráðgeva Tjóðsavnið í hesum arbeiði og arbeiðinum at gera nýggjar átekningar, var heitt á Jes Kroman, skipsarkitekt, um at virka sum ráðgevi

Herleif Hammer, stjóri

**Jes Kroman er** í dag farin frá við eftirløn, men hevur drúgvar royndir við varðveitslu av gomlum træskipum. Jes hevur starvast sum skipsarkitektur m.a. á Nationalmuseet og var dagligur leiðari í Skibsbevaringsfonden frá 1990 - 2014. Jes vitjaði á savninum dagarnar 17. – 21. oktober, og ferðast var um alt landið hesar dagarnar.

Gøtumenn eru farnir undir at umvæla deksbátin Gæsa, sum Jógvan Hansen í Vestmanna bygdi í 1919. Teir hava søkt um at fáa átekning sum mentanarsøguligt skip, og áðrenn hetta kann latast, krevst ein neyv endurbyggingar- og viðlíkahaldsætlan. Tjóðsavnið var tí saman við Jes og skoðaði skrokkin, og prátað var við fólk handan verkætlanina um arbeiðið.

Annars var vitjað umborð á hesum skipum: Thorshavn, Johonnu, Westward Ho, Norðlýsinum og Draganum. Ætlanin er, at Jes skal vitja aftur í 2023. Tá verður m.a. farið at hyggja eftir øðrum smærri deksførum.



*Umborð á vælhildna skipinum Dragin í Klaksvík*



*Deksbáturin Ólavur í Vestmanna stendur á landi. Hann er í vánaligum standi, men til ber at bjarga honum*





*Bátar á goymslu í Brekkutúni*





*Bátar á goymslu í hølum savnsins í Brekkutúni*



*Áttamannafarið Knørrur. Hesin báturin vann mangar kappróðrar í 80- og 90árunum*

# Bátar hjá Tjóðsavninum

Julianna Mørkøre Dalbø, goymsluvørður og Súsanna Joensen, konservator

## Á Tjóðsavninum eru umleið 30 bátar – 5 hava verið sýndir fram seinastu 70 árini, meðan hinir hava verið á goymslu í Havn og í fjargoymslu í Rituvík. Tá Tekniski Skúli flutti úr Smiðjugerði eydnaðist at fáa eina arbeiðshøll, sum varð uppstigað og broytt, soleiðis at hon kann hýsa bátum savnsins

**Í 2022 var** komið so mikið áleiðis, at til bar at fyrireika flutning av 10 bátum úr Rituvík til Havnar. Í hesum sambandi skuldi goymslan í Smiðjugerði vera rein, ruddilig og innrættað til bátagoymslu. Harafturat skuldi veðrið eisini vera til vildar at koyra suður. Tíverri vóru ikki allir bátar neyvt skrásettir av fyrstan tíð, og eisini vóru flestu teirra rættiliga skitnir, so avgjørt var at skráseta, merkja, avmynda og reinsa hvønn einasta bát, nú høvið var til tess. Ætlanin er at brúka sama leist, tá bátarnir í Brekkutúni verða fluttir út í Smiðjugerði.

Slíkur flutningur og reingerð, ið helst skal gerast uttandura, kann bert gerast í hampiliga góðum veðri. Vónandi eru allir bátar og alt arbeiði í sambandi við teir liðugt áðrenn summarfrítíðina í 2023.



*Í juni hittust samstarvspartarnir í Helsinki til eina verkstovu, har siðaarvur og heimsmálini um mentanarliga, sosiala, vistfrøðiliga og búskaparliga burðardygd blivu viðgjørd. Vitan og royndir innan siðaarvsarbeiðið vórðu deild, og arbeitt varð við at leggja til rættis lokalar pilotverkætlanir. Fyri Tjóðsavnið luttók Kristina Djurhuus Christiansen*




*Sissal Kristiansen greiðir frá um sítt virksemi*

# LIVIND VERKÆTLANIN

LIVIND — Creative and Living Cultural Heritage as a Resource for the Northern Dimension Region

Kristina Djurhuus Christiansen, savnsvørður

## Í byrjanini av 2022 bleiv fólkalívsdeildin partur í norðurlendsku og baltisku verkætlanini LIVIND (Creative and Living Cultural Heritage as a Resource for the Northern Dimension Region). Øll londini, sum eru við í verkætlanini, hava viðtikið UNESCO-sáttmálan um verju av siðaarvi frá 2003

**Endamálið við LIVIND** verkætlanini er at samantvinna livandi mentan og burðardygga menning og at skapa samstørv millum stovnar, vinnurekandi og privatpersónar í norðurlendska og baltiska økinum. Finnish Heritage Agency fíggjar og samskipar verkætlanina.

Samstarvið tvørtur um landamørkini gongur í høvuðsheitum fyri seg talgilt gjøgnum netbornar verkstovur og gjøgnum talgilda samstarvsportalin Howspace. Lokalt hevur verið arbeitt við at eyðmerkja mentanarlig sermerki, rák og møguleikar fyri menning. Í Føroyum blivu ullarvirkan og torvskurður í Svínoy tættir í verkætlanini. Búnaðarstovan og Útoyggjafelagið hava fingið fígging til pilotverkætlanir, sum verða settar í verk í næstum. Tilsamans verða góðar 20 pilotverkætlanir settar í verk í øllum norðurlendska og baltiska økinum.



*Ullarverkstova á Búnaðarstovuni í Kollafirði*

### ULLARVERKSTOVA

**Í sambandi við** LIVIND verkætlanina skipaðu Búnaðarstovan og fólkalívsdeildin í felag fyri einari verkstovu – "Ull er livandi mentan". Hóast ull ikki hevur somu funktión, sum hon hevði fyrr í tíðini, er ullin eitt burðardygt tilfeingi og hevur eitt stórt mentanarligt virði. Møguleikarnir fyri at skapa eitt breiðari grundarlag fyri ullina í Føroyum blivu viðgjørdir á verkstovuni.



Tær fýra vøkru bronsukanónirnar á Skansanum á nýggju lavettunum. Fremst stendur sekspundskanónin, ið er tann størsta. Ein sekspundskanón skjýtur kúlur, ið viga 6 pund

# Kanónundirløgini á gomlu kanónunum á Skansanum umvæld

Á innara vollanum á Skansanum í Havn standa fýra gamlar kanónir. Talan er um eina sekspundskanón og tríggjar trýpundskanónir

Herleif Hammer, stjóri



Monogrammið hjá Kristiani VII á sekspundskanónini



Niðasta hædd í Evensens Pakkhúsi var nýtt til verkstað

**Kanónirnar eru allar** stoyptar á Fredriksværk á Norðursælandi – tvær í seinnu helvt av 18. øld og tvær í fyrru helvt av 19. øld. Allar fýra kanónirnar eru stoyptar úr bronsu. Trýpundskanónirnar viga uml. 290 kg hvør, meðan sekspundskanónin vigar 625 kg. Í 1970árunum vóru nýggi undirløg ella lavettir gjørd til hesar kanónir, men nú vóru lavettirnar í so ringum standi, at okkurt skuldi gerast. Avrátt var at umvæla tær gomlu heldur enn at gera nýggjar. Heitt var á royndu handverkararnar Inga Tórgarð og Martin Mørk um at standa fyri arbeiðinum.



Eitt timburstillads var bygt fyri lættari at fáa tungu kanónirnar av og á undirløgini. Á myndini síggjast Martin Mørk og Ingi Tórgarð



Summar av lavettunum vóru í sera ringum standi

# FORNMINNIS-NEVNDIN 2022

**Virksemið hjá Fornminnisnevndini var eitt sindur minni í 2022, enn tað hevur verið seinastu árini. Tó vóru tríggir fundir, harav tveir vóru ástaðarfundir. Fyrsti fundurin var ein ástaðarfundur 23. mars í Stokkastovuni í Tinganesi. Næsti fundurin var 2. mai, og seinasti fundurin var ástaðarfundur í Hvalvík, hin 15. september 2022**

Herleif Hammer, stjóri

**Ástaðarfundurin í Stokkastovuni** var ein kunningar- og eftirlitsfundur av arbeiðinum við útgrevstrinum av kjallaragólvinum, sum var gjørdur í sambandi við, at Stokkastovan skuldi umvælast.

Fyrsta málið á fundinum 2. mai var nýggj byggisamtykt í Svínoy. Klaksvíkar kommuna hevði gjørt uppskot til nýggja byggisamtykt fyri Svínoy. Millum annað vóru fleiri øki løgd út til bygging og vinnu. Í nøkrum av økjunum var eyðkent mentanarlandslag við nógvum toftum, t.d. í økinum Úti á Bø og eystureftir. Fornminnisnevndin mælti til, at kommunan setti treytir við byggingina her, sum tóku atlit til søguligu leivdirnar.

Annað málið var úr Hvalvík. Í Hvalvík stendur eitt gamalt landfesti ella pullartur í neystaøkinum nærhendis bátahylinum. Sambært heimildarmanninum, Jógvan Djurhuus í Hvalvík, er landfestið gjørt av kleynusmiði á Oyri. Landfestið er frá 17. øld og líkist tí, vit finna á Krambatanga í Trongisvágsfirði. Kommunan hevði fingið umsóknir um at fáa landfestið flutt, so neyst kundu byggjast beint við og gerast størri. Tá Fornminnisnevndin seinni var á ástaðarfundi, var staðfest, at talan var um fornminni, og at tað skuldi fáa frið. Tó var tikið undir við øðrum uppskotum, sum partvís kundu ganga umsøkjararunum á møti.

Triðja málið var umsókn frá avvarandi av Snepputoft í Hamrabyrgi. Ynskt var at seta skelti upp, sum greiddi frá Sneppuni. Her var ein skilagóð loysn funnin, sum allir partar vóru glaðir fyri.

Seinasta málið var ein skúrur frá seinna heimsbardaga, sum er eitt vart kríggsminni. Skúrurin stendur inni á privatum øki, og eigarin hevur ynskt at fáa skúrin burtur, tí hann er illa hildin og skemmar urtagarðin. Mælt var til, at um til bar, skuldi skúrurin flytast á øki hjá kommununi nærhendis.

Afturat hesum málum var kunnað um ymisk mál, m.a. SEV ætlanirnar at tyrva í Bjarnadali, víðkan av seyðahúsi í Saksun, umvæling av Pakkhúsi 18 á Tvøroyri og broyting av fiskastykkinum omanfyri Thomsen á Tvøroyri í sambandi við vegagerð.



Landfest í Hvalvík frá 17. øld, møguliga smíðað á Oyri



Uni Næs, Herleif Hammer, Rúni Abrahamsen og kirkjuráðið í Porkeri

# TJÓÐSAVNIÐ VITJAR Í PORKERI

**Tað hevur leingi verið eitt ynski hjá kirkjuráðnum í Porkeris kirkju at betra um atkomuna til kirkjuna og umstøðurnar í kirkjuni**

Herleif Hammer, stjóri

**Eins og í** so mongum øðrum bygdum, har kirkjurnar eru gamlar og ikki samsvara nútíðarkrøvum, ynskja tey í Porkeri, at kirkjan fær vesi og betri pláss í forkirkjuni. Vesi er eitt krav í dag á almennum støðum, har fólk savnast, men spurningurin er, hvussu fær mann gjørt vesi uttan at skaða kirkjuna. Somuleiðis verður ofta ynskt at fáa betri pláss í forkirkjuni og breiðari hurð millum forkirkju og kirkjuskip, so berarar ótarnaðir kunnu bera líkkistur inn og út úr kirkjuni í sambandi við jarðarferðir.

Í Porkeri eru hesi ynskini eisini, men harafturat er atkoman til kirkjuna ein avbjóðing hjá rørslutarnaðum og illa gongdum fólki. Kirkjan liggur sera lágt í mun til vegin. Hetta ger, at neyðugt er at ganga gjøgnum trappur fyri at koma inn í kirkjuna.

Kirkjuráðið hevur tí ynskt at hækka grundina, so kirkjan kemur umleið ein metur hægri upp, og samstundis byggja upp í vestara skjøldurin, har ynski er um nýggja inngongd og vesihentleikar. Eisini var ynskt at gera nýggja og breiðari hurð inn í kirkjuskipið og at flyta prædikustólin út móti norðursíðuni, so hann ikki skuggar fyri altarinum, og so at betri pláss verður á fremsta beinki.

Fleiri av ynskjunum krevja stór inntriv í verandi kirkju, og ivi er um, hvørt kirkjan er nóg sterk at verða lyft. Tí vóru ein arkitektur (Meduna Dalsgaard) og stjórin frá Tjóðsavninum (Herleif Hammer), ein arkitektur (Rúni Abrahamsen) frá próstaskrivstovuni og dómprósturin (Uni Næs) á vitjan fyri at skoða kirkjuna og at tosa við kirkjuráðið.



Eftir skoðanina var farið í skúlan at tosa saman; har legði Rúni Abrahamsen fram hugskot til loysnir, ið kundu betra um viðurskiftini. Í høvuðsheitum varð skotið upp, at heldur enn at hækka kirkjuna fyri at betra um atkomuna, varð leið gjørd eystureftir yvir um ánna móti krambúðini til rørslutarnað, og heldur enn at byggja upp í kirkjuna vestureftir, varð eitt lítið hús bygt vestanfyri leyst frá kirkjuni til vesi. Við slíkari loysn hevði kirkjan sloppið næstan órørd. At gera nýggja hurð og at flyta prædikustólin var hildið at verða gjørligt, um farið varð fram við lagaligheit. Tó var ein avbjóðing mett at vera í sambandi við at breiðka hurðina, tí vektin av kirkjutorninum liggur niður á annan durakarmin.

Eingin avgerð varð tikin í sambandi við vitjanina, men allir partar vóru samdir um, at fundurin hevði verið góður og framhyggjandi.

*Tíð var eisini at gera eitt stutt rend suður til Sumbiar at hyggja at serstøku kirkjuni har*



*Vakra kirkjan í Porkeri liggur lágt í mun til vegin*

*Her við vesturendan á kirkjuni er ynski um at byggja út fyri at fáa vesihentleikar*





*Ein stutt vitjan var eisini gjørd í kirkjuni í Hovi. Her hyggur Meduna Dalsgarð at klædninginum saman við Rúna Abrahamsen og Delmari Tausen, kirkjuráðsformanni í Hovi*



*Gamla myllan áðrenn umvælingina*

# MYLLAN Í KVÍVÍK UMVÆLD



**Tað er Tjóðsavnið, ið varðar av gomlu vatnmylluni í Kvívík. Á sumri 2022 var farið undir at umvæla mylluna, tí hon var nakað illa farin. Veggir, gólv og tekja skuldu umvælast**

Herleif Hammer, stjóri

**Heitt var á** Inga Tórgarð og Martin Mørk um at taka sær av umvælingini og á Ólav Reinert at hampa økið rundanum og taka sær av laðingararbeiðinum. Tá arbeiðið var liðugt, varð tekjan skift, klædningurin umvældur, undirsløgini undir gólvinum skift, og vatnhjólið gjørt av nýggjum. Harafturat var nakað av laðingararbeiði gjørt í øðrum skjøldrinum.





*Húsasmiðirnir til arbeiðis*

*Snøggað varð bæði niðanfyri og omanfyri mylluna*

# FRIÐAÐU KIRKJURNAR OG KIRKJUR 100 ÁR OG ELDRI

Í februar í 2022 varð settur arkitektur á Tjóðsavnið í hálvtíðarstarv burturav at taka sær av kirkjumálum í samband við tær kirkjurnar, sum Tjóðsavnið umsitur fyri fólkakirkjuna. Kirkjurnar, sum koma undir hetta starv, eru hundrað ár og eldri, og útvaldar eru friðaðar

Meduna Dalsgaard, arkitektur

**62 kirkjur og** 3 bønhús eru í Føroyum, sum hoyra undir fólkakirkjuna. Av teimum eru 21 kirkjur hundrað ár og eldri, og 19 kirkjur eru friðaðar. Hesar tekur Tjóðsavnið sær av í samband við byggimál. Tað kann vera í samband við varðveiting, viðlíkahald, umbygging og uppíbygging.

## KIRKJUR, SUM ERU FRIÐAÐAR OG KIRKJUR ELDRI ENN 100 ÁR

**Tá kirkjur eru** friðaðar ella 100 ár og eldri, verður arbeitt út frá eini restaureringsfatan. Innan byggilist verður hetta nevnt bygningsrestaurering, og er hetta karmur um, hvussu arbeiðið verður framt. Hesin karmurin liggur undir teimum avgerðum, sum verða tiknar í sambandi við arbeiðið, og tey tilmæli ella frámæli, sum verða givin. Munur er á, hvørt talan er um friðing, ella um kirkjan er 100 ár og eldri.

## FRIÐING OG ALDUR

**Friðing verður framd** á ávísum grundarlagi, alt eftir hvussu bygningurin er, og hvat hann umboðar í einum bygningasøguligum høpi. Ávísar orsøkir eru til, hví akkurát hesin ella hasin bygningurin er varðveitingarverdur.

Er bygningurin 100 ár og eldri, er tað aldurin, sum avger, um hann skal varðveitast og haldast á ávísan hátt.



*Húsini í Depli eru dømi um nýtt og gamalt samantvinnað*

## FLOKKING

Kirkjurnar verða bólkaðar eftir byggihátti í 5 bólkar:

1. **Gamlar trækirkjur**
   a) óklæddar
   b) við grótveggjum
   c) við træklædningi
2. **Yngri trækirkjur**
3. **Grótkirkjur, laðaðar**
4. **Betongkirkjur**
5. **Eindømir**

## SERSTØÐA

**Kirkjurnar í Føroyum** hava ta serstøðu at umboða tað besta innan føroyska byggilist og standa tí fremst í einum føroyskum søguligum samanhangi. Har mann í útlondum hevur aðrar bygningar sum t.d. harragarðar, borgir, slott o.a., hevur mann í Føroyum kirkjurnar og festigarðarnar.

## PARTAR

**Í byggimálum, sum** koma undir hetta málsøkið, eru fleiri partar. Partarnir eru kirkjuráðið á staðnum, próstadømisráðið, stiftsstjórnin og bygningadeild Tjóðsavnsins. Byggimál byrja í hvørjum einstøkum kirkjuráði, har tey hava ymisk ynskir í samband við kirkjuna.

## BYGNINGADEILDIN

**Bygningadeildin á Tjóðsavninum** eigur servitan um antikvariskar bygningar, byggisiðir, gamalt handverk og byggitilfar í hesum sambandi.

## ARBEIÐI

**Bygningadeildin savnar inn** vitan, skrásetir, varðveitir, granskar og miðlar føroyskan byggisið. Arbeitt verður eftir reglum, sum t.d. løgtingslógum, kunngerðum og ásetingum (anordningar).

## ARBEIÐSØKIÐ

**Arbeiðsøkið er millum** annað at mæla til ella frá ymiskum arbeiðum, sum kirkjuráð, stift og próstadømisráð søkja um at fáa gjørt. Tilmælini ella frámælini eru grundaði á, um rætt verður gjørt sambært restaureringssiðum og restaureringsvitan í samband við antikvariskar bygningar.

## SERVITAN

**Servitan liggur undir** hesum siðum. Servitanin er innan ymisk økir, bæði handalig og ástøðilig. Servitanin er um antikvariskar bygningar, byggisiðir, handverk og byggitilfar í hesum sambandi. Aftrat hesum er eisini servitan innan konservering, sum t.d. temperaturi og luftnýggjan. Hetta serliga í samband við byggitilfar og haldføri (og eisini innbúgv og lutir).

## TÍÐIN

**Galdandi fyri allar** bygningar – eisini kirkjur – er, at frá tí ein kirkja, sum bygningur, verður bygd til samtíðina, verður ymiskt við tíðini lagt aftrat og skift út. Tá verður gamalt og nýtt samantvinnað, og tað nýggja verður við tíðini eisini gamalt og tað gamla enn eldri ella fánar burtur.

Hvør bygningur er bundin at tíðini, hann varð bygdur í, bæði við atliti at hvussu handverkið var tá, hvussu tilfarið var, og hvat tilfar var til taks. Mann kann siga, at ein tíðarbundin logikkur er bundin at bygninginum.

## BROYTINGAR

**Tíðirnar broytast og** eisini byggisiðir, handverk, amboð og tilfar. Kanska til okkurt sum líkist og kanska til okkurt heilt annað. Viðhvørt eru hesi so ymisk, at tey passa ikki saman longur. Eitt dømi kundi verið, at plastikkmáling, sum er mest vanlig at mála við í dag, ikki sampakkar við tjøru, linolju ella oljumáling, sum var vanlig at brúka fyrr. Bygningurin og tilfarið, mann roynir at verja, verður ikki vart á rættan hátt, og úrslitið er, at bygningurin forferst.

## VARÐVEITING

**Fyri at ein** restaurering skal eydnast, er av størsta týdningi, at mann dugir at undirleggja seg "gamla logikkin", bygningurin er bygdur í, bæði í hugskoti, byggihátti og byggitilfari. Hetta fyri at kunna varðveita tað, sum mann av fyrstantíð varðveitti og segði hava virði, og fyri ikki at gera seg inn á bygningin og tilfarið. Við tí í huganum, at varðveitt verður til framtíðar ættarlið og eftirtíðina.

## MANNAGONGD

**Mannagongdin í samband** við friðaðar kirkjur og kirkjur, sum eru 100 ár og eldri, er í praksis soleiðis, at kirkjuráðið á staðnum sendir umsókn við uppskoti, sett saman av serkønum ráðgeva (arkitekti), til próstadømisráðið. Próstadømisráðið sendir umsóknina til Tjóðsavnið. Tjóðsavnið mælir til ella frá og sendir próstadømisráðnum tilmæli ella frámæli. Próstadømisráðið sendir síðani umsóknina til stiftsstjórnina, sum sendir próstadømisráðnum játtandi ella noktandi svar. At enda sendir próstadømisráðið kirkjuráðnum endaligt svar.

## MÁL

**Mál í 2022,** sum byggideild Tjóðsavnsins varðar av, eru Bíggjar kirkja, Gøtu kirkja (eldra), Hests kirkja, Hvalvíkar kirkja, Oyndarfjarðar kirkja, Eiðis kirkja og Viðareiðis kirkja. Aftrat hesum hava verið próstasýn, har Tjóðsavnið hevur verið við. Kirkjusýn eru vanliga við jøvnum millumbilum eina ferð um árið. Umleið 3 ár eru ímillum fyri hvørja kirkju sær, sum lógin um bygningar fólkakirkjunnar ásetur.

Í Bígjjar kirkju eru gomlu upprunavindeyguni í kirkjuni umvæld. Gøtu kirkja, (eldra) søkti um at umvæla gólvið í kirkjuskipinum, og tilmæli er givið.







*Umvælingararbeiðið í stigum:*
*Fyrsta myndin vísir vindeyga undan restaurering.*
*Næsta myndin vísir vindeyga, har mann hevur tikið timbur burtur, har bøtast skal, og triðja myndin vísir vindeyga, har málingin er tikin burtur. Vindeygaglas, sum er brotnað, er skift, og nýtt glas sett í aftur. Nýggja glasið, sum er sett í, er sama slag sum tað gamla.*

Hests kirkja er málað uttan. Hvalvíkar kirkja hevur fingið umvælt prædikastólin av serfrøðingum. Oyndarfjarðar kirkja hevur fingið umvælt stormskaða. Eiðis kirkja hevur trupulleikar av leka í trapputorninum, og undanarbeiðið at skifta úthurðar og restaurera gomlu veingjahurðina í forkirkjuni og seta gomul hongsl í stand er fyrireikað. Viðareiðis kirkja hevur trupulleikar við fukti og hitabroyting, og mátitól eru sett upp fyri at skráseta verandi viðurskiftir, soleiðis at røtt loysn verður funnin og sett í verk.

Í øllum málunum hevur leiðreglan verið at gera umvælingar og kanningar soleiðis, at umvælingarnar verða gjørdar samsvarandi meginreglunum fyri restaurering, sum nevnt omanfyri.

## VINDEYGA ÚR BØ

**Vindeyguni í Bíggjar** kirkju eru nú sum fyrsta dagin, og undir allari málingini, sum var smurd á gjøgnum ár og dag, sæst nú upprunaprofilurin týðiliga í trænum. Relieffið og skuggin arbeiða saman, sum ætlað var av fyrstantíð. Eisini veit mann nú, at timbrið, tey eru gjørd burturúr, er avbera gott og kann halda fleiri ættarlið aftrat. Hóast timbrið er gamalt, er góðskan haldgóð og betri enn nógv tilfar, sum fæst í dag.

## VITAN

**Nýggj afturfunnin vitan** fekst undir allari málingini. Nú veit mann meira um hesi vindeyguni. At góðskan var nógv betri enn hildið, og at haldførið er nógv betri enn í nýggjum nútímans vindeygum. Upprunaútsjóndin er komin undan kavi aftur.



Liðugt restaurerað vindeyga



Myndin vísir støðuna undan restaureringsarbeiðinum



Myndin vísir úrslitið av restaureringsarbeiðinum. Profilurin sæst illa á fyrru myndini, har sum hann sæst væl á seinnu myndini

## HORNASTEINAR

**Í varðveitingararbeiði er** vert at nevna nakrar hornasteinar, økir ella heitir, mann arbeiðir innanfyri við ávísum framferðarhátti:

- Upprunatilfar, lutir og upprunasamanseting og umhvørvið, tey eru í.
- Kanningar á staðnum
- Skráseting, sum kann vera tekningar, myndatøka, skanning á staðnum við og uttan uppmáting o.a.
- Bygningasøga/byggilistasøga/arkivstudiir
- Originalitet (sermerkt eindømi)
- Autensitet (ektað)
- Identitet (samleiki)
- Narrativitet (søga)
- Reversibilitet (at mann kann føra aftur til tað, sum var upprunaliga)

**Hornasteinarnir kunnu sigast** at vera varðar í arbeiðinum at halda seg til. Í fyrireikandi arbeiðinum arbeiðir mann við at greina og vita, hvørji virðir eru varðveitingarverd, viðkvom og ómissandi fyri okkum og komandi ættarliðini. Alt hetta við neyvari kenslu fyri serstøku byggilistini og tí serstaka í tí, sum varðveitast skal.

Arbeiðið við friðaðum og varðveitingarverdum bygningum krevur neyvan kunnleika og innlit í søguliga byggitøkni og siðbundið byggitilfar eins og kunnleika um lógir og kunngerðir.

## KARMAR

**Tjóðsavnið, við síni** servitan innan varðveitingarøki, kannar og eftirkannar umsóknir við omanfyri nevnda sum grundarlagi og ger síðani tilmæli ella frámæli.

## ORSØKIR

**Orsøkir at varðveita** eru fleiri. Kirkjurnar fortelja søgu okkara og eru serlig hús og bygningar, sum fortelja um føroyska samfelagið, hvussu mann hevur bygt og livað í felag. Tær siga eisini nakað um tøkni, og hvussu byggitilfar háttar sær í Føroyum yvir fleiri hundrað ár – og ikki at gloyma – hvat heldur væl og leingi.

Vert er at nevna, at mesta byggitilfarið, sum brúkt verður nú, er ikki royndt og kannað í mun til føroysk viðurskiftir og veðurlag yvirhøvur.

## VITAN

**Gamlir bygningar kunnu** samanlíknast við søvn, har mann kann síggja spor, mentan, gamla vitan og tøkni í eini heild.

## SAMLEIKI

**Bygningar vísa eisini** samleika við tað, at har sæst, at soleiðis hevur mann gjørt her í Føroyum, har mann hevur gjørt øðrvísi aðrastaðni.

## SERSTØÐA

**Kirkjan er serlig,** og har verður unt øllum í samfelagnum at síggja, uppliva og royna gamla mentan, siðaarv og vakurleika. Í bygningin og handverkið er løgd nógv orka, góðska og nærlagni, sum vit í dag eru heppin at sleppa at fáa gleði av til ymisk høvi sum kirkjugongd, kirkjukonsert ella í lívsritualum sum t.d. barnadópi, ferming og jarðarferð.

## HØPI

**Gamlir bygningar seta** eisini okkara egnu tíð og umhvørvið í eitt høpi við tað, at mann kann samanlíkna, hvussu var tá, og hvussu er nú.

## HVAT KANN HETTA BERA VIÐ SÆR?

**Gomul vitan kann** t.d. endurfinnast og føra til nýskapan og nýggja tøkni sum t.d. vistfrøðiliga bygging, endurnýtsluhættir og burðardygd – og enn fleiri ónýttir møguleikar liggja í dvala til komandi ættarlið at finna, varðveita og fáa íblástur av.





Jesper Stub Johnsen kannar myndatilfar



Henriette Berg kannar myndaalbum

# MYNDAGOYMSLAN Á TJÓÐSAVNINUM

**Tað var ein ordans hvøkkur, tá ein einnýtisgrill summarið 2020 festi í ruskílat og útvegg í Løðuni í Hoyvík, har m.a. myndagoymslan hjá Tjóðsavninum er. Hetta varð umrøtt í ársritinum 2020. Tíbetur hendi onki við myndasavninum, og síðani er góð, nýmótans ávaringarútgerð sett upp í goymsluni. Men so kom spurningurin, hvussu er varðveitingarstandurin hjá myndatilfarinum, og hvussu eru goymsluumstøðurnar yvirhøvur?**

Súsanna Joensen, konservator

**Gjøgnum tíðina hava** glasplátunegativ, negativstrimlar og spælifilmar verið gjørd úr ymiskum tilfari, sum eldist og niðurbrýtist á ymsan hátt.

Tað er munur á glasplátunegativum, cellulosenitrat-negativum, celluloseacetat-negativum og polyesterbasenegativum. Harumframt er eisini munur á svørt-hvítum og litfototilfari. Okkurt av hesum fototilfari er sera eldfimt og skal goymast fyri seg annaðhvørt í køliskápi ella í frosti, annað slag avgassar kemisk evni, ið kunnu ávirka ella niðurbróta annað tilfar, og kunnu tí ikki vera á goymslu saman við øðrum lutum.

Í 1980unum var farið undir at umpakka negativ í sýrufrítt pakkitilfar, bæði negativbjálvar og goymslueskjur, fyri at betra um varðveitingar- og goymslustøðuna. Ongin okkara á savninum hevur ta serstøku vitanina, um hvussu myndatilfar forferst, hvussu skjótt ella hvat kann gerast, men tað hevur ein grafiskur konservator.

Fyri at fáa eina hylling á okkara støðu, varð kannað, um tað bar til at fáa ein tílíkan konservator til Føroya at gera eina kanning og meting av støðuni. Tað lukkaðist at fáa samband við Jesper Stub Johnsen, grafiskan konservator, ið hevur drúgvar royndir innan films-/fotoøkið og eisini hevur verið stjóri á Nationalmuseets Bevaringsafdeling, og við Henriette Berg, grafiskan konservator á Det Kongelige Bibliotek. Tað eydnaðist at fáa tey at koma higar í september 2022.

Tey vóru her tveir dagar, har tey kannaðu goymsluna og tóku stakroyndir.

## NEYÐUGT AT SKIPA SAVNIÐ

**Í einum stuttum** samandrátti meta tey, at myndasavnið er í góðum varðveitingarstandi, men at tað er neyðugt at umpakka, skilja ymsu negativ- og filmsløgini frá hvørjum øðrum og at skipa alt fototilfarið í einari myndagoymslu, møguliga kaldari sergoymslu. Regluliga er neyðugt at kanna inniklima, avgassing v.m. og annars halda eyga við, um nakrar broytingar henda.

Eisini er neyðugt at leggja eina ætlan um umpakking og talgilding av myndasavninum, sum ein lið í varðveitingini uttan tó at koyra upprunatilfarið burtur – tá tað er farið, kemst ikki afturumaftur, um eitthvørt hendir tí digitaliseraða savninum.

Tað er tíðar- og orkukrevjandi arbeiði, ið legst afturat dagliga arbeiðnum. Hóast støðan í myndasavninum ikki er mett at vera hættislig, so er hon somikið álvarslig, at fígging má finnast til hetta serstaka bjargingararbeiðið av einum stak týdningarmiklum parti av okkara mentanararvi.







# LIVANDI MENTAN

Skráin 'Livandi mentan' byrjar nú spakuliga at taka skap. Í 2022 komu Ull og ullarvirkan, Barnasangir á dagstovnum í Føroyum og Reinavelting á skrá

Kristina Djurhuus Christiansen, savnsvørður

## ULL OG ULLARVIRKAN

**Orðatakið "Ull er** Føroya gull" lýsir, hvussu stóran týdning, ullin hevur havt í Føroyum. Ullin er ikki Føroya gull longur, og nú verður størsti parturin av ullini burturbeindur. Men hóast tað, so er ullin og ullarvirkan ein týðandi siðaarvur í Føroyum, og enn eru bólkar og einstaklingar, sum virka ullina. Harumframt brúka sniðgevar og listafólk eisini føroysku ullina í teirra virksemi.

## BARNASANGIR, RÍMUR OG RAMSUR Á DAGSTOVNUM Í FØROYUM

**Barnasangir er ein** siðaarvur, sum altíð hevur verið partur av uppaling og siðmenning av børnum. Á dagstovnum verða barnasangir, vísur og ramsur sungnar við børnum í ymiskum samanhangum. Endamálið er at stimbra málið og innlæringsevnini hjá børnum og at læra børnini um teirra umhvørvi, um náttúru, djór, trúgv, veður, gerandislív og samfelagið.




Við at syngja sangir og siga rímur og ramsur læra børnini rútmur, og hetta er við til at menna teirra rørslu- og nervalag. Harumframt skapa sangløtur karmar um eina trygga og afturvendandi løtu.

## REINAVELTING OG VARÐVEITING AV FØROYSKU BYGGKORNSLØGUNUM TAMPAR OG SIGUR

**Reinavelting er siðbundin** kornvelting, sum var neyðug fyrr í tíðini fyri at fáa korn, men eisini fyri at halda bøin í góðum standi. Reinaveltingin helt uppat fyrst í 20. øld, so hvørt samhandilin við útlond mentist. Tá handilsskip fóru at sigla, og samhandil við onnur lond tók seg upp, loysti tað seg ikki at velta korn í Føroyum. Nú gjørdist mjøl og korn ein handilsvøra.

Reinaveltingin á Tjóðsavninum í Koltri verður gjørd eins og áður, tó bert sum royndarvirksemi. Endamálið við reinaveltingini í Koltri er einans at halda lív í byggkornsløgunum Tampar og Sigur og at halda teigalendið í hevd. Eisini er reinaveltingin í Koltri tikin uppaftur sum ein liður í gransking og læring um serstaka reinaveltiháttin.













*Myndirnar frá vinstru: Morten Terp Nielsen er byrjaður at fletta. Eyðun Joensen og Morten hava næstan fingið skinnið av. Hógvarnir verða loystir. Høvdið er tað seinasta, sum verður loyst frá skinninum*

# Føroyskt ross flett

Tjóðsavnið byrjaði í 2020 eina tilgongd at fáa øll vanlig føroysk húsdjór útstappað. Tá vórðu tvey lomb útstappað. Tey standa í dag í ullar- og seyðaframsýning savnsins í Brekkutúni í Hoyvík. Í oktober í 2022 fingu vit møguleikan at fletta eitt føroyskt ross, sum kortini skuldi avlívast

Herleif Hammer, stjóri

**Eins og í** 2020 var samstarv gjørt við fyritøkuna Hubertus Konservering, sum liggur í Vejen í Jútlandi. Avtalað var, at ein av teirra konservatorum skuldi koma til Føroya at standa fyri arbeiðinum at fáa skinnið av rossinum. Skinnið skuldi síðani sendast niður til Hubertus Konservering at garva og útstappa. At hjálpa okkum at avlíva rossið fingu vit Eyðun Joensen úr Kollafirði, sum hevur drúgvar royndir sum flettari.

Rossið var flutt í eitt av hølum Tjóðsavnsins í Kaldbak, har tað varð avlívað og flett. Ansast skuldi væl eftir at fáa skinnið av í einum petti. Hógvarnir og nøsin skuldu vera føst í skinninum. Einki annað av krovinum verður nýtt, tá útstappast skal, men avtala varð gjørd við Hotel Føroyar um at taka gongulimirnar, meðan restin var koyrd burtur.





*Skinnið er leyst og klárt at leggja saman. Síðani verður tað pakkað í eitt kuffert og klárt at taka við í flogfarið*





*Grágás, hara á náttartíð og krákuting – í Hoydølum eru oftani stórir krákuflokkar*

# TJÓÐSAVNIÐ VIÐ Í LIFEPLAN

## – eitt yvirlit yvir lívið á jørðini

Ein stórur partur av øllum lívfrøðiligum margfeldi er framvegis ókent. Samstundis hvørvur eitt ótal av sløgum av plantum og djórum. Tey hvørva somikið skjótt, at heimurin hevur ásannað, at vit eru mitt í einari lívmargfeldiskreppu

Agnes-Katharina Kreiling, Ph.d. lívfrøðingur

**Alstórur tørvur er** tí á at skilja tilgongdir og mynstur í náttúruni, og hvussu vit kunnu avmarka missin av lívfrøðiligum margfeldi – áðrenn tað er ov seint. Frægasti mátin at røkka hesum máli er at samstarva um skipaðar innsavningar av sýnum um allan heimin, so tað ber til at sammeta, hvør støðan er millum lond og øki.

LIFEPLAN er ein altjóða verkætlan undir leiðslu av Lærda Háskúlinum í Helsinki, og endamálið er at skipa fyri, at sýn vera innsavnað á sama hátt um allan heimin. Virksemið er fíggjað av Evropeiska Granskingarráðnum (ERC). Síðan 2020 eru 170 sýnistøkustøð sett upp runt heimin – frá Madagaskar til Svalbard. Tjóðsavnið kom við í 2022 fyri at veita føroyskar dátur til heimsumfatandi dátugrunnin.

Tíðliga síðsta ár var ein støð sett upp í Hoydølum, og hon varð vitjað tríggjar ferðir hvørja viku av lívfrøðingum á Tjóðsavninum. Nútímans skipanir, ið eru meira og minni sjálvvirkandi, verða nýttar til at skráseta ymsar tættir av lívfrøðiliga margfeldinum. Fuglar og súgdjór við myndatólum og ljóðupptøkutólum, sýnistøka av soppagrókornum og plantusáði úr luftini við einum "Cyclone sampler" og flúgvandi skordýr við eini „Malaise fellu". Savnaðu sýnini verða kannað við gentøkni og teldutøkni av altjóða granskarum.

Eitt annað endamál við LIFEPLAN verkætlanini er at samanbera lívfrøðiliga margfeldið í bygdum umhvørvi við náttúruumhvørvi. Tískil verður støðin í 2023 flutt til náttúruumhvørvið í Koltri eftir at hava savnað dátur og sýn í Hoydølum í eitt ár.

Toymið á Tjóðsavninum, sum hevur arbeitt við LIFEPLAN, bíðar í spenningi eftir úrslitunum frá kanningunum av tilfarinum, sum var innsavnað í 2022. Tó, longu nú eru áhugaverd úrslit at síggja. Vit vistu í hvussu er ikki, at tað vóru so nógvar harur at síggja í Hoydølum.



*Tjaldur*













*Skordýr eru savnað*



*Nýliga skrásetta slagið Hvannlistafluga Euleia heraclei (Linnaeus 1758)*

# HVANNLISTA-FLUGA SKRÁSETT FYRI FYRSTU FERÐ Í FØROYUM

Agnes-Katharina Kreiling, Ph.d. lívfrøðingur

Fleiri hvannlistaflugur *Euleia heraclei* (Tephritidae) vóru sæddar og savnaðar av Leivi Janusi Hansen og Agnes-Katharinu Kreiling í juni 2022. Flugurnar vóru funnar á bjargahvonn (*Angelica archangelica*) mitt í Tórshavn

**Hetta er fyrsta** skráseting av hesum slagnum í Føroyum, og er helst eisini fyrsta skráseting av listafluguættini (Tephritidae) uttandura. Eitt annað slag av listaflugu, miðjarðarhavslistafluga (*Ceratitis capitata*), er funnið í hvussu er tvær ferðir áður, men hon er komin við innfluttari vøru og hevur ikki nakran lívføran stovn í Føroyum.

Hvannlistafluga er vanlig um alt Evropa og er eisini í Norðurafrika og Asia. Ormverurnar eta bløð hjá plantum í skjólurtarættini (Apiaceae) og kunnu gerast ein plága í sellarí- og pastinakkídnaðinum. Í Føroyum eru, umframt hvonn, fleiri møguligar vertsplantur fyri hvannlistaflugu, m.a. bakkasløkja (*Angelica sylvestris*), skotsk meistaraurt (*Ligusticum scoticum*) og villikervil (*Anthriscus sylvestris*).

Tær flugurnar, sum eru frammi um summarið, eru sera litríkar við appilsingulum og gulum kropslutum, grøn-bláar um eyguni, og veingirnir hava eyðkent svart mynstur. Tá makingin er fyri, vísa kallflugurnar sínar góðu eginleikar við at dansa framman fyri kvennflugunum og lata tær síggja sínar vøkru veingir.






*Rípukálvur (Boreonectes multilineatus), sum var savnaður úr einari tjørn í Eysturoynni*

# Kanning av vatnklukkum og bátsmanstekum í føroyskum tjørnum og vøtnum

Granskarar á Tjóðsavninum hava granskað vatnklukkur og bátsmanstekur í føroyskum tjørnum og vøtnum. Teir kunnu staðfesta, at tað serstakliga er støddin og dýpið, sum avger, hvar sløgini koma fyri

Agnes-Katharina Kreiling, Ph.d. lívfrøðingur

**Fjølbroytni og samfeløg** vóru ávirkað av dýpi og stødd, men ikki av hvar tjarnirnar lógu ella hvussu avbyrgdar tær vóru frá øðrum tjørnum og vøtnum.

Granskararnir funnu fimm sløg av vatnkálvum (ættin Dytiscidae), eitt slag av vatnstígara (ættin Haliplidae) og tvey sløg av bátsmanstekum (ættin Corixidae). Tilsamans vóru 1522 skordýr savnað í 57 tjarnum og vøtnum á Streymoynni og í Eysturoynni. Toftavatn var tað størsta vatnið, sum varð kannað, og ein tjørn, ella hylur, í 400 metra hædd omanfyri Oyri, var minst.

Tjarnir og vøtn í Føroyum eru einfaldar livandi skipanir, har tað ber væl til at granska fjølbroytnið hjá feskvatnsskordýrum. Har kunnu vit lætt síggja, hvussu tað livandi samspælir við umhvørvið, og tað hjálpir okkum at skilja, hví lívmargfeldið er háttað, sum tað er. Endamálið við kanningini var at fáa vitan um fjølbroytni, samfeløg, útbreiðslu av sløgum og so eisini, hvussu hesi eru háttað samanborið við tað ólívrunna umhvørvið.

Úrslitið av kanningini, sum er grundað á tilfar, sum var innsavnað fyri 20 árum síðan, er útgivið sum ein “open access” grein í tíðarritinum “Insects” og er tøk her (*QR kotan*):




*Stødd og dýpi á tjørnum avgera, hvar sløgini koma fyri*

# FishFAR skjalfestir broytingar í vistfrøði og fiskastovnum í vøtnum eftir 22 árum

Agnes-Katharina Kreiling, Ph.d. lívfrøðingur

**Í Leynavatni er, umframt síl** *(Salmo trutta)*, **einasti upprunastovnur av bleikju** *(Salvelinus alpinus)* **í Føroyum. Í NORLAKE verkætlanini í ár 2000 varð bleikjustovnurin kannaður saman við øðrum tættum av vistfrøðini í Leynavatni og fýra øðrum vøtnum í Føroyum**



*Dýrdarveður við Toftavatn*



*Samstarv í felti – Tjóðsavnið og Háskólinn á Hólum*

**Broytingar eru farnar** fram hesi farnu 22 árini, eitt nú økt trýst á umhvørvið av mannaávum og avleiðingum av veðurlagskreppuni. Vøtnini í Føroyum eru lítil, vistskipanirnar einfaldar og tískil riggar væl at granska samanspælið ímillum sløg, og hvussu tey eru ávirkað av broytingum í umhvørvinum. Tjóðsavnið byrjaði í juni 2022 eina granskingarverkætlan, sum hevur til endamáls at samanbera støðuna hjá fiskastovnum og teirra føði við úrslitini frá 2000.

Granskingarráðið fíggjar FishFAR verkætlanina, sum er eitt samstarv ímillum granskarar í Føroyum, Íslandi og Danmark. Verkætlanin er undir leiðslu av Dr. Camille Leblanc (Háskólinn á Hólum) og Dr. Agnes-Katharina Kreiling (Tjóðsavnið). Aðrir luttakarar eru Dr. Bjarni K. Kristjánsson (Háskólinn á Hólum), Leivur Janus Hansen (Tjóðsavnið), Dr. Ragnhildur Guðmundsdóttir (Náttúrugripasafn Íslands), Dr. Hilmar J. Malmquist (Náttúrugripasafn Íslands), og Dr. Kirsten S. Christoffersen (Lærdi Háskúlin í Keypmannahavn). Tey bæði síðstu vóru eisini við í NORLAKE verkætlanini í 2000.

Arbeiðið var lagt til rættis soleiðis, at feltarbeiðið kundi byrja seint á sumri í 2022. Eftir at hava kýtt seg við fyrireikingum í nakrar vikur, var lagt til brots í fyrru helvt av august. Úr Íslandi komu fýra granskarar við tungari útgerð í førninginum. Teir skuldu arbeiða saman við Agnes og Janusi í eina viku. Arbeiðið, sum varð gjørt í 2000, skuldi endurtakast, og trý vøtn vóru vald til tað: Toftavatn, Saksunarvatn og Leynavatn. Í teimum trimum vøtnunum vóru gørn sett, sum skuldu standa náttina yvir. Við ymsum meskastøddum taka hesi gørnini ymsar støddir av laksafiskum. Fiskurin, sum var fingin, varð viðgjørdur á staðnum. Hetta bar til, tí við øll trý vøtn fingu vit loyvi at brúka ein skúr tætt við vatnið. Hetta var so okkara “Base Camp”. Har kundu vit, við taki yvir høvdið, máta og taka sýn av fiskunum. Vekt og longd varð tikin av øllum fiskum, teir vórðu avmyndaðir og kruvdir. Magin varð tikin fyri at síggja, hvat fiskurin hevði etið, nytrur fyri at vita, hvussu gamal fiskurin var, og vøddar til ílegukanningar. Tað vóru tó ikki einans fiskar, ið høvdu áhuga, men eisini, hvør føði var tøk í vøtnunum. Tískil savnaðu vit ryggleys djór frá ymsum búøkjum í vøtnunum. Eitt nú av steinum tætt við strendurnar, úr vatninum mitt úti á og úr botninum, har tað var djúpast.



*Feltarbeiðstoymið við Leynavatn*



*Janus kastar kombikkfellu*

Feltarbeiðið byrjaði í dýrdarveðri um kvøldið við Toftavatn og endaði í áarføri við Leynavatn. Íslendararnir vóru heilt hugtiknir av at síggja, hvussu skjótt Leynavatn fløddi. Hóast langar og vátar dagar, so var toymið sera væl nøgt við avrikið ta vikuna: um 4000 sýn og mátingar til samans! Tað fer at taka fitt av tíð at kanna øll sýnini. Tað verður ein starvsstovuteknikari á Hólum, sum byrjar tað arbeiðið í januar 2023. Vónandi kemur ein lesandi har at taka lut í tí arbeiðinum.

Hóast verkætlanin væntandi koyrir komandi tvey árini, so síggja vit longu nú nøkur áhugaverd úrslit. Talið á sílum í Toftavatni var næstan tað sama í 2000 og 2022, ávíkavíst 90 og 76. Tó, í Saksunarvatni vóru fleiri enn 200 síl í 2000, men einans 73 í 2022. Í Leynavatni var talið av sílum nakað hægri í 2022 (51 í 2000 og 67 í 2022), men talið av bleikjum var 138 í 2000 og 84 í 2000. Vónandi kunnu vit í hesari verkætlanini finna eina frágreiðing uppá hesar broytingar.





*Camille tekur upp gørn*



*Agnes og Bjarni í bátinum á Toftavatni*





*Janus savnar ryggleys djór av steinum*



*Viðgera fiskar*

Tú kanst finna FishFAR verkætlanina á heimasíðuni hjá Tjóðsavninum her (*QR kotan*):



*Í gráu puntunum vóru lundaholur í Mykinesi kannaðar fyri skvett*

# FUGLATELJINGAR Á RAMSAROYGGJUM

Í Føroyum eru tríggjar oyggjar, ið eru fevndar av Ramsarsáttmálanum um vátlendi við serligum týdningi fyri fugl. Hesar eru Nólsoy, Mykines og Skúvoy. Tær hýsa týdningarmiklum fuglastovnum

Jón Aldará, lívfrøðingur

**Eins og undanfarin** ár hava Tjóðsavnið og Havstovan talt fugl í hesum oyggjum vegna avvarandi ráð (Uttanríkis- og Vinnumálaráðið í 2022).

Tjóðsavnið hevur staðið fyri at telja lunda í Mykinesi og drunnhvíta í Nólsoy. Í 2022 varð drunnhvíti ikki taldur, men vit tóku ábyrgd av regluligu heiðafuglateljingini í Skúvoy, sum Havstovan hevur staðið fyri.

## LUNDI Í MYKINESI

**Í august vóru** lundaholur í Mykinesi kannaðar. Endamálið var at meta um,



hvussu nógvir ungar kundu koma undan. Í 2011, 2012 og 2013 var eingin livandi pisa at síggja í nakrari kannaðari holu. Í 2014 til 2020 sóust pisur í holunum, og í 2022 vóru pisur mettar at vera í einum triðingi av holunum.

## HEIÐAFUGLAR Í SKÚVOY

**Hóast Jón Aldará** og Leivur Janus Hansen á Tjóðsavninum áður hava luttikið í heiðafuglateljingunum í Skúvoy, so tók Tjóðsavnið í 2022 ábyrgd av hesum. Eitt endamál var at tryggja, at hetta bleiv gjørt meira skipað. Tískil var R250 fuglateljingarmannagongdin hjá Tjóðsavninum tikin í brúk har, umframt at tað eisini bleiv gingið og talt eins og undanfarin ár. Møguliga verður neyðugt at telja við báðum mannagongdum í nøkur ár.



*Holurnar í Mykinesi hava verið kannaðar í 12 ár. Bláir stabbar er talið á brúktum holum. Reyðir stabbar er talið á holum við pisu. Myndin vísir, at tey bestu árini hetta tíðarskeiðið eru ungar í umleið einum triðingi av holunum*




*Ein stórur fyrimunur við R250 mannagongdini er, at júst sama økið verður talt á sama hátt hvørja ferð*




| | Skúgvur | Kjógvi | Tjaldur | Spógvi | Mýrisnípa | Lógv | Steinstólpa | Grátitlingur | Summar-titlingur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Gonga | 50 | 34 | 38 | 19 | 30 | 13 | 71 | 58 | 4 |
| R250 | 56 | 20 | 26 | 8 | 5 | 6 | 24 | 28 | 0 |
| R250_calibrated | 108 | 44 | 63 | 22 | 9 | 15 | 70 | 92 | 0 |

*Tøl tilsamans av pørum av heiðafuglasløgunum í Skúvoy, sum vórðu tald í gonguteljingini (Gonga) og R250-teljingini í 2022*



Rita er vanlig á flogvøllinum um summarið

# Fuglaráðgeving í Vága Floghavn 2022

Síðan 2021 hevur Tjóðsavnið havt avtalu við Vága Floghavn um, at ein persónur á landdjóradeildini virkar sum villiniráðgevi (vildtkonsulent) – vanliga nevndur fuglaráðgevi – á flogvøllinum í Vágum. Fuglaráðgevin er góðkendur av Trafikstyrelsen undir danska Transportministeriet. Høvuðsuppgávan hjá fuglaráðgevanum er at ráðgeva viðkomandi arbeiðsfólki hjá Vága Floghavn við tí fyri eyga at minka um og í framtíðini at burturbeina vandan fyri bird strikes (fuglaárenningum)

Jón Aldará, lívfrøðingur

**Meira ítøkiliga eru** uppgávurnar hjá fuglaráðgevanum at vitja flogvøllin eina ferð um mánaðin og hava støðufund og flogbreytareftirlit saman við toymisleiðaranum, ið hevur ábyrgd av fuglatrygdarøkinum. Haraftrat ger fuglaráðgevin hvørt ár eina frágreiðing um mál, hendingar og vágameting í sambandi við fugl á flogvøllinum í farna árinum. Ársfrágreiðingin verður latin Trafikstyrelsen við freist 1. mars. Umframt hesar uppgávur syrgir fuglaráðgevin eisini fyri, at teir fuglar, sum verða skotnir ella árendir á flogvøllinum verða goymdir á savninum og eftirkannaðir. Haraftrat eru ymsar aðrar uppgávur í sambandi við vandan av fugli á flogvøllinum, sum fuglaráðgevin kann taka sær av, um tíð og umstøður eru til tess.

Tríggjar bird strikes vóru í 2022, tvær í august og ein í november. Hetta var sama tal sum í 2021. Í teimum fyrstu tveimum var talan um smáan vaðfugl, og gjørdi onnur álvarsligan skaða á motorin á flogfarinum. Hesi smáu vaðfuglasløgini eru trupul at sleppa undan, serliga orsakað av kvika flogmynstrinum. Tó verður farið at skjóta í 2023 fyri at sleppa undan hesum fuglum á flogbreytini. Hin síðsta fuglaárenningin var ein fransaterna, sum rakti skrokkin og ikki gjørdi skaða.

Tveir hálvárligir fundir eru í Fuglekollisionskommitteen, sum er samansett av fólki frá Trafikstyrelsen, umframt teimum ymsu flogvøllunum í danska kongaríkinum. Á hesum fundum verður tosað um hendingar á ymsu flogvøllunum við atliti til fuglafyribyrgingarvirksemi, og eisini samskifta ymisku partarnir um nýggjar mannagongdir, sum verða mentar, og royndir, sum eftirlitsfólk og villiniráðgevar gera sær. Á fundinum í november 2022 var ein nýggjur háttur til at meta um, hvørju fuglasløg elva til størsta váðan fyri bird strikes, lagdur fram.

Røkt av grasvøllinum um flogbreytina hevur stóran týdning fyri, hvussu nógvur fuglur og hvørji fuglasløg koma fyri í økinum. Vága Floghavn hevur avtalu við fyritøkuna RO|H um at sláa økið tríggjar ferðir í tíðarskeiðinum juni-oktober. Roynt hevur verið seinastu árini at sláa í minsta lagi í 10 cm hædd, og hetta tykist at minka um talið á fugli (serliga tjøldrum) eftir slátturin í mun til, tá grasið varð sligið tættari.

Sum heild gongur samstarvið millum Tjóðsavnið og Vága Floghavn um fugl á flogvøllinum avbera væl, og vónin er, at fyribyrgingin og skrásetingin av fugli kring flogvøllin verður so mikið dygdargóð, at málið um 0 bird strikes frameftir kann røkkast.








Markatalsbygdir (a) og kommunur (b) litaðar eftir tali av taldum grágásum

# GRÁGÁSATELJING

Tjóðsavnið hevur vegna Búnaðarstovuna átikið sær at kanna stovnsstødd og árliga undankomu hjá grágás (*Anser anser*) í Føroyum. Verkætlanin verður knýtt upp í altjóða teljingina av íslendska grágása- og íslandsgásastovnunum (*Anser brachyrhynchus*) – *Icelandic-breeding Goose Census* (IGC) – sum uttanfyri reiðring ferðast m.a. í Bretlandi og Føroyum

Leivur Janus Hansen, savnsvørður og Jón Aldará, lívfrøðingur

**IGC verður samskipað** av British Trust for Ornithology (BTO) og er partur av verkætlanini The Goose & Swan Monitoring Program (GSMP). Føroyska teljingararbeiðið verður tí skipað soleiðis, at øll vill gásasløg umframt svanur (*Cygnus cygnus*) verða tald, og at dáturnar harvið kunnu nýtast bæði til føroyska stovnsmeting og í GSMP-høpi. Hesar teljingarnar verða gjørdar útvaldar dagar á árinum, sum samsvara við reiðring og flyting hjá gásasløgunum.

Fyrsta teljingin fór fram 19. og 20. november í 2022, og samsvarar hetta tíðarskeiðið við flytitíðina hjá grágás. Ymisk støð í landinum vóru peikað út, sum skuldu vitjast. Hetta vóru í høvuðsheitum størri dyrkilendi. Trý toymi – hvørt við tveimum teljarum – koyrdu í bili og taldu í hvør sínum parti av landinum. Veðrið var als ikki gott, og tískil varð avgjørt ikki at royna at vitja Suðuroynna. Hóast vánaliga veðrið vísti tað seg, at umstøðurnar til at telja vóru góðar.



Tilsaman vórðu 1128 grágæs taldar í 50 markatalsbygdum og 19 kommunum á 7 oyggjum. Tá tað ikki var farandi til Suðuroyar, varð avgjørt at telja á fleiri økjum aðrastaðni. Sandur var tann markatalsbygdin, har flest grágæs vórðu taldar, og næst henni var Fuglafjørður. Av kommunum vóru tað Sands kommuna, Tórshavnar kommuna og Runavíkar kommuna, ið høvdu hægsta talið av grágás. Hóast grágæs vóru at síggja rættiliga javnt yvir oyggjarnar, so vóru grágæs bert at finna á Viðareiði í Norðuroyggjum, og í kommununum á eystursíðuni av Streymoynni (Kvívíkar og Vestmanna) vóru ongar gæs.

Afturat grágás vórðu fimm onnur gásasløg og svanur eisini tald. Heilt fitt av korngás (*Anser albifrons*) var at síggja – bæði av *flavirostris* (Grønlendsk korngás) og tí meira sjáldsama *albifrons* (Russisk korngás) undirslagnum – og nakrar fáar íslandsgæs og frostmýrigæs (*Anser serrirostris*) vóru spjaddar ymsastaðni. Ein einstøk brandgás (*Branta leucopsis*) var á Oyri, og á Viðareiði helt ein dimm helsigás (*Branta bernicla hrota*) til. Eisini vórðu 50 svanir taldir tilsamans; teir flestu í Sandoy.

Væntandi ber til at síggja stovnsgongdina, um somu øki verða vitjað ár eftir ár. Tó hevur tað stóran týdning at tryggja, at Suðuroy er fevnd av teljingini, tá hon er ein stórur partur av føroyska landøkinum og kann hava ein týðandi part av grágásastovninum. Fyrsta royndin at telja ungar grágæs, sum eru komnar undan føroyskum búfugli, verður væntandi gjørd á sumri 2023.



Kjógvapar við hvør sínum litbrigdi, Fugloy 2022



Floygd kjógvapisa í Svínoy; tann einasta, sum varð skrásett av Tjóðsavninum í 2022

Kjógvar 2022

# UNDANKOMAN TANN MINSTA HIGARTIL

Tjóðsavnið ger nógv arbeiði við kjógvum (*Stercorarius parasiticus*) kring landið. Høvuðsdentur verður lagdur á eftirlit við undankomu av pisum (framleiðslu), sum varð sett í verk í 2017. Hetta eftirlitið verður gjørt á hvørjum ári í Fugloy, Svínoy, Saksun og Akrabyrgi, har bæði stór og smá kjógvabøli eru

Jón Aldará, Lívfrøðingur

**Á øllum hesum** støðum verða fyrst eyðsýniliga upptikin reiðursøki tald (AOT = Apparently Occupied Territory), har tekin eru um, at eitt par heldur til. Hetta verður gjørt í fyrru helvt av juni, tá kjógvarnir vanliga hava vorpið. Síðani kemur teljarin aftur á somu øki í seinnu helvt av juli og telur pisur, sum annaðhvørt eru floygdar ella eru við at verða floygdar. Á tann hátt ber til at rokna, hvussu nógvar pisur koma á flog fyri hvørt búøki.

Talið á floygdum kjógvapisum síðani 2018 hevur sum heild verið nakað minkandi, meðan talið á eyðsýniliga upptiknum reiðursøkjum er støðugt. Í 2020 vóru fáar pisur floygdar í mun til undanfarin ár og árið eftir. Hetta lága talið kann fyri ein part vera ávirkað av, at tað ikki bar til at telja í Saksun orsakað av veðri, men fáar floygdar pisur vóru at síggja á øllum støðum. Í 2022 var undankoman tann vánaligasta higartil, og var ongin floygd pisa skrásett. Hetta styrkir ábendingina um minkandi undankomu hjá kjógva, men tað ber tó ikki til at síggja nakað ítøkiligt um gongdina, tí ár kunnu vera sera ýmisk, og enn skulu nøkur ár til aftrat, áðrenn ein greið mynd sæst.




*Samlað tal av eyðsýniliga upptiknum reiðursøkjum (AOT, grátt) og floygdum pisum (svart) á øllum økjum 2018-2021. Hædd skal takast fyri, at í 2018 bar ikki til at telja á einum av støðunum í Fugloy, og í 2020 bar ikki til at telja floygdar pisur í Saksun*




*Lutfalslig undankoma frá 2018-2022 av floygdum kjógvapisum fyri hvørt eyðsýniliga upptikið reiðursøki (AOT) í ymisku bølunum og tilsamans*

## LITRINGMERKTIR KJÓGVAR

**Síðani 2017 hevur** Tjóðsavnið staðið fyri litringmerking av kjógvapisum kring landið. Í 2022 var tó ongin ringmerking orsakað av, at fuglakrím var staðfest í m.a. skúgvi, og tí varð mett, at fuglurin á reiðursøkjum skuldi órógvast so lítið sum møguligt. Tó vórðu onkrir ringar á kjógvum lisnir, og serliga áhugavert var, at tvær av pisunum, sum vórðu merktar í 2017, sóust aftur í heimabølunum í ávikavist Akrabergi og Fugloy. Hetta merkir, at tað er eitt ávíst tal av pisum, sum livir til vaksnan aldur og kemur aftur til Føroya at nørast.





*Tveir kjógvar, sum upprunaliga vórðu merktir sum pisur, vórðu í 2022 skrásettir aftur á bølunum sum vaksnir. Frá vinstru: FC9 varð eygleiddur á Akrabergi og FA2 í Fugloy*


Krímsjúkur fiskimásaskuri


Floygd skúgvapisa úti við Bergið syðst í Skúvoy


Deyður skúgvur í Skúvoy

# FUGLAKRÍM

**Í september í 2021 boðaði Heilsufrøðiliga Starvsstovan frá, at sera sjúkuelvandi fuglakrímið H5N1 fyri fyrstu ferð var staðfest í Føroyum. Tey fuglasløgini, sum fyrst vórðu skrásett við sjúkuni, vóru skúgvur og, nakrar mánaðar seinni, svartbakur**

Jón Aldará, lívfrøðingur

**Hetta elvdi til** stúran hjá føroyskum fuglafrøðingum og teimum heilsufrøðiligu myndugleikunum. Tí valdu Tjóðsavnið, Umhvørvisstovan og Heilsufrøðiliga Starvsstovan at seta ein arbeiðsbólk á stovn, sum skuldi hava eftirlit við útbreiðsluni av fuglakrími í Føroyum. Leikluturin hjá Tjóðsavninum í hesum bólkinum er serliga at veita lívfrøðiliga ráðgeving og innsavna møguliga sjúkan fugl.

Síðani fyrstu tilburðirnar hava seks onnur fuglasløg fingið staðfest fuglakrím – súla, havhestur, fiskimási, kjógvi, ravnur og bládúgva – umframt hønur og heimagæs á einum garði í Havnadali. Fyri tey flestu av sløgunum eru ikki tøl um deyðsfall og stovnsárin, men tað er tó greitt, at serliga skúgva- og súlustovnarnir eru hart raktir. Saman við Sjúrði Hammer á Umhvørvisstovuni skrásetti Tjóðsavnið skúgvarov og taldi skúgvapør í Skúvoy, og hóast endaligu tølini ikki eru liðugt greinað, so er nógvur skúgvur deyður, og stovnurin á oynni er minkaður sera nógv. Tó eydnaðist tað nøkrum skúgvapisum at koma undan í Skúvoy.

Ætlanin er at hava framhaldandi eftirlit við skúgvabølunum í 2023 og møguliga gera eina roynd at minka um smittuvandan á bølunum, m.a. við at burturbeina sjúkan og deyðan fugl. Haraftrat er ætlanin at halda eyga við øðrum smittaðum fuglasløgum, sum halda saman í tøttum bølum, m.a. kjógva, dúgvu og havhesti.




Deyður fulkubbi, mynd av veingjafjaðrum innan


Kanning av deyðum fulkubba


Anne Ausems hevur fulkubba undir skurði

# FULKUBBAKANNING Á VETRI 2021-2022

Um veturin 2021-2022 komu óvanliga nógvar fráboðanir um deyðan og illa fyrikomnan fulkubba *(Alle alle)* um alt Føroyar

Jón Aldará, lívfrøðingur

**Á strondum sum** í gørðum funnu fólk hesar smáu álkufuglar. Hetta hendi beint eftir, at fuglakrím varð staðfest í villum fugli í Føroyum, og fyri at hava møguleikan at kanna hetta fyribrigdið nærri, gjørdi Tjóðsavnið tí eina roynd at innsavna so nógvan deyðan fulkubba sum møguligt.

Nógvir fuglar komu inn, og avgjørt var at fáa fuglafrøðingin Anne Ausems at kanna teir yvir eitt stutt tíðarskeið. Arbeiðið innibar at skera upp og máta eftir einum leisti hjá Kees Camphuysen, sum eisini hevur gjørt eitt oyðiblað til endamálið.

Kanningin vísti, at tað var alt ungfuglur frá undanfarna summarinum, sum var komin illa fyri í Føroyum. Kropsstøðan var sera vánalig, bringuvøddarnir vóru nógv svunnir, og sum heild var lítið í magunum. Enn er magainnihaldi sjálvt ikki greinað, og kann hetta saman við hinum dátunum um fuglarnar vera grundarlag fyri eini kanningarætlan seinni.

Fulkubbi reiðrast heilt norðarlaga í arktiskum økjum, og tað er mest uttanfyri bútíðina, at teir koma fyri í føroyskum sjóøki. Vanliga síggjast teir ikki undir landi, men úti á opnum havi. Mett verður, at orsøkin til hendingina við nógvum deyðum fulkubba, er illveðrið kring Føroyar, sum var rættiliga støðugt í desember 2021, og sum hevur ávirkað ferðing og føðileiting hjá fulkubbunum kring Føroyum so nógv, at teir eru vorðnir úthungraðir. Tað, at teir vóru ungfuglar og tískil høvdu avmarkaðar royndir við m.a. at leita eftir føði, hevur helst eisini gjørt støðuna verri. Einki fuglakrím varð staðfest í hesum fulkubbum.





*Tjaldursgrælingur*

# RINGMERKING Í FØROYUM 2022

Ringmerkingin í 2022 bar brá av, at fuglakrím kom til landið á heysti árið fyri. Sera lítið varð ringmerkt fyri at minka um órógvandi virksemi á reiðursøkjum; serliga hjá heiðafugli og sjófugli

Jón Aldará, lívfrøðingur

**Føroyski ringmerkjarabólkurin undir** Tjóðsavninum skrásetti 9 sløg og 1080 ringmerktar fuglar, og sum vant vóru flestu av ringmerktu fuglunum drunnhvítar. Tey seinastu nøgvu árini hevur talið á ringmerktum drunnhvítum ligið ímillum 1000-7000 fuglar um árið, og í ár vóru 1001 merktir. Hetta er væl minni enn undanfarna ár, tá ringmerkjarahópurin var størri, men samstundis væl meira enn í 2020, tá bert 283 vórðu merktir. Hetta vísir, at munir millum ár kunnu vera sera stórir, alt eftir hvørjar verkætlanir eru virknar, hvussu nøgv fólk ringmerkja og enntá, hvussu samfelagið er ávirkað, m.a. av fuglakrími og COVID-19.

Um drunnhvítar ikki verða tiknir við, so var talið á ringmerktum fuglum í 2022 bert 79, harav næstan allir skrápur og lundi, sum vórðu merktir í sambandi við áhaldandi verkætlanir ávikavist í Nólsoy og á Viðareiði. Bert 1 kjógvapisa varð merkt í Skúvoy, áðrenn valt var at avlýsa ringmerkingina hjá Tjóðsavninum, og í Koltri vóru 1 fiskimásapisa, 2 fransaternupisur og 1 tjaldursungi merkt. Mest serstøku ringmerkingarnar vóru av tveimum falkafuglum. Ein smyril var vilstur inn í eitt bóndahús í Fugloy og varð ringmerktur har, og haraftrat kom ein veiðifalkur til Kollafjarðar við fiskiskipinum Polar Nattoralik. Hann hevði sett seg útlúgvaður umborð, tá skipið lá norðanfyri Ísland, og manningin hevði síðani tikið hann inn og fóðrað hann. Teir umborð høvdu sett seg í samband við Dansk Ornitologisk Forening, sum viðmælti, at av tí at teir vóru ávegis til Føroya, skuldu teir taka veiðifalkin við sær og fáa Tjóðsavnið at ringmerkja hann. Hetta eydnaðist væl.



*Litringmerktur tjaldursgrælingur í Kaldbaksbotni*

Tað er altíð áhugavert, tá onkur finnur ringmerktan fugl í Føroyum, tí tað er lutfalsliga sjáldsamt. Umframt teir 200 drunnhvítarnir, sum vórðu endurfingnir í Nólsoy, komu bert 11 fráboðanir til føroyska ringmerkjarabólkin í 2022. Tvær tær mest óvanligu vóru av trøllont og tjaldursgrælingi. Trøllontin varð merkt omaná nevinum við einum sokallaðum “nasal saddle” í økinum við Lac de Grand-Lieu sunnanfyri Nantes í Vesturfraklandi í 2019. Tjaldursgrælingurin, sum varð sæddur í Kaldbaksbotni, kom úr oynni Schiermonnikoog út frá norðurendanum av Niðurlondum, har hann sum ungi í 2017 varð merktir við flaggi við áskriftini “CNM”.

**Tal av ringmerktum og fráboðaðum fuglum, sum føroyski ringmerkjarabólkurin hevur skrásett í 2022**

| | 2020 | | 2021 | | 2022 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Slag | Ringmerktir | Fráboðaðir | Ringmerktir | Fráboðaðir | Ringmerktir | Fráboðaðir |
| Drunnhvíti | 283 | 76 | 4520 | 297 | 1001 | 200 |
| Sýldur drunnhvíti | 0 | 0 | 3 | 0 | 0 | 0 |
| Skrápur | 76 | 4 | 72 | 3 | 48 | 1 |
| Havhestur | 26 | 2 | 20 | 2 | 0 | 0 |
| Súla | 0 | 2 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Skarvur | 0 | 0 | 4 | 0 | 0 | 0 |
| Kjógvi | 46 | 7 | 30 | 0 | 1 | 2 |
| Skúgvur | 1 | 6 | 0 | 0 | 0 | 2 |
| Lundi | 14 | 24 | 45 | 3 | 24 | 0 |
| Teisti | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Lomvigi | 0 | 7 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Fiskimási | 0 | 0 | 2 | 0 | 1 | 0 |
| Likka | 2 | 2 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Svartbakur | 1 | 0 | 3 | 0 | 0 | 1 |
| Fransamási | 0 | 0 | 0 | 0 | 2 | 0 |
| Rita | 7 | 22 | 4 | 16 | 0 | 0 |
| Terna | 0 | 0 | 59 | 0 | 0 | 0 |
| Tjaldur | 2 | 6 | 4 | 0 | 1 | 2 |
| Tjaldursgrælingur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| Mýrisnípa | 0 | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Trøllont | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| Æða | 5 | 6 | 5 | 11 | 0 | 0 |
| Villdunna | 0 | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Grágás | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Bládúgva | 24 | 5 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Smyril | 2 | 1 | 1 | 0 | 1 | 0 |
| Veiðifalkur | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 0 |
| Kráka | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Ravnur | 3 | 4 | 5 | 0 | 0 | 1 |
| Kvørkveggja | 0 | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Óðinshani | 0 | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Gráspurvur | 0 | 0 | 18 | 0 | 0 | 0 |
| Stari | 0 | 2 | 18 | 0 | 0 | 0 |
| Summartítlingur | 0 | 0 | 15 | 0 | 0 | 0 |
| Grátítlingur | 0 | 0 | 2 | 0 | 0 | 0 |
| Bringureyði | 0 | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Munkur | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Nilksljómari | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Samanlagt | 494 | 181 | 4835 | 332 | 1080 | 211 |

Tveir ringmerktir skúgvar vórðu funnir deyðir av fuglakrími í Skúvoy í juli mánað. Hesir vóru merktir við litringi í sambandi við verkætlan hjá Sjúrði Hammer í 2013. Eisini vóru 2 kjógvar frá litringmerkingarverkætlanini hjá Tjóðsavninum sæddir livandi. Teir vóru merktir sum ungar í 2017, og vórðu báðir sæddir aftur á føðistaðnum í ávíkavist Mykinesi og Fugloy. Ein svartbakur, sum varð ringmerktur sum pisa í Koltri á sumri 2021, varð skotin í Nólsoy eitt hálvt ár seinni, og eisini varð eitt ringmerkt tjaldur skotið á Vága Floghavn í sambandi við flogtrygd.

Eitt annað ringmerkt tjaldur, ið reiðraðist við Mjáuvøtn, varð avmyndað so frægt, at ringurin kundi lesast. Bæði tjøldrini vóru ringmerkt í Bretlandi.

Eisini varð ein ravnur fráboðaður av Strond við Haraldssund. Hann var deyður í hønsaneti og var upprunaliga ringmerktur í 2016 á Selatrað í sambandi við ravnaverkætlanina hjá Bergi og Abraham Mikladal.



*Veiðifalkur, ið varð ringmerktur og sleptur í Føroyum*



# RYGGLEYS DÝR Í KOLTRI

## – ein dagføring

Agnes savnar skordýr við Kolturshamar

Í 2019 byrjaði Tjóðsavnið at savna eitt yvirlit yvir lívfrøðiliga margfeldið í Koltri. Eftir at hava rannsakað oynna í fýra ár, byrjar yvirlitið yvir ryggleys dýr at síggja rættiliga flott út

Agnes-Katharina Kreiling, Ph.d. lívfrøðingur



Malaise fella við Leirrók



Skordýr verða savnað við glúpi







Kolturstoymið. Frá vinstru Kolbrún, Agnes, Janus, Bjørn og Jón



Fjallagrasmølur (Catoptria furcatellus) ein av teimum nýggju skrásetingunum í Koltri



Toke setur upp dustara myndatól (pollinator cameras)

**Beint fyri jól** í 2022 kom samlaði listin upp á 300 sløg (og er í skrivandi stund 315). Hetta eru øll sløg av plantum, fuglum og ryggleysum dýrum, sum eru skrásett, síðan virksemið byrjaði í 2019. 52 sløg av fuglum og 101 sløg av plantum eru skrásett síðani tá – men høvuðsparturin er eyðvitað skordýr og onnur ryggleys dýr. Í løtuni eru 162 sløg skrásett. Tað tekur sína tíð at arbeiða ígjøgnum nógvu sýnini, sum eru savnað hesi sumrini, men nærum hvørja viku verða nýggj sløg løgd afturat. Summi eru ikki einans nýggjar skrásetingar fyri Koltur, men eisini fyri Føroyar, eitt nú *Simulium aureum* (Svartmýggjaættin) og eitt slag í slektini *Phora* (Kúlufluguættin).

Summarið 2022 vóru nýggir savningarhættir tiknir í nýtslu í Koltri, umframt teir, sum vit hava nýtt frammanundan, t.d. fallfellur, glúping og tøðsýnir. Ein av nýggju háttunum var Malaise fellan, sum fangar flúgvandi skordýr og líkist einum tjaldi. Hon var sett upp ymsastaðni, eitt nú við byrjanina til Leirrók og við síðuna av Hamarsgarðstjørnini. Tað vísti seg, at hesi sýnini vóru serstakliga áhugaverd og høvdu fleiri nýggj sløg av tvíveingjum (Diptera) fyri oynna. Ein annar háttur, sum varð royndur, var ein ljósfella, sum skuldi fanga firvaldar (Lepidoptera), sum eru virknir um náttina. Tó, her var úrslitið ikki eins áhugavert. Sum nakað nýtt vóru



Birna savnar bjarnadýr úr mosa

Jan Sørensen og Herdis H. Jacobsen frá Sjódýradeildini og kannaðu tað, sum livir í fjøruni. Okkara verkætlanarstarvsfelagi frá lærda háskúlanum í Aarhus, Toke Thomas Hoye, gjørdi eina roynd við sonevndum dustara myndatólum (pollinator cameras). Hetta eru sjálvvirkandi myndatól, sum eru sett upp og sett at taka myndir av blómandi plantum við jøvnum millumbilum. Hetta kann vísa, hvørji skordýr vitja blómurnar í vakstrartíðini.

Árið, ið fór, gav okkum ikki einans nýggjar skrásetingar av skordýrum og nýggjar savningarhættir, men eisini nýggjar samstarvsfelagar. Birna Vár Trygvadóttir Fjallstein (Biofar) var saman við toyminum í nakrar dagar í juni fyri at savna og eyðmerkja bjarnadýr (Tardigrada) í Koltri, og eitt vikuskifti í august royndi Karl A. Thomsen at savna firvaldar í oynni. Áðurnevndi Toke var fyri fyrstu ferð (og avgjørt ikki síðstu ferð) í Koltri. Og í sambandi við Bachelor-ritgerðina hjá sær á Fróðskaparsetrinum savnaði Hans Meinhard í Eyðansstovu reyðmaðkar (Clitellata) í Koltri. Á heysti 2022 fingu vit eisini Arne Fjellberg úr Noregi við. Hann er serfrøðingur í hoppstertum (Collembola). Í tilfarinum, sum hann fekk úr Koltri, eyðmerkti hann ikki færri enn 45 ymisk sløg av hoppstertum. Og av teimum vóru níggju sløg, sum ikki hava verið skrásett áður í Føroyum.



Urtafluga á mýrisólju






Uppskot til gøtur og pallar eru teknað á myndina

# Landslagsarkitektar vitja í Koltri

**Í sambandi við stóru Koltursverkætlanina hjá Tjóðsavninum skal ein ætlan gerast fyri, hvussu vitjandi skulu ganga og ferðast í oynni – serliga uttangarðs. Ikki er ætlanin, at vitjandi skulu ganga, har teimum lystir, men at gera leiðir, har tey trygt kunnu ganga og fáa góðar náttúruupplivingar, men samstundis órógva náttúruna sum minst**

Herleif Hammer, stjóri

**Til at hjálpa** okkum at visualisera eitt uppskot til farleiðir fingu vit royndar arkitektar frá landslagsarkitektavirkinum Landmótum úr Íslandi. Landmótum hevur drúgvar royndir við slíkum arbeiði úr Íslandi og úr Norra. Talan er ikki um eina endaliga ætlan, men eina visualisering, so lættari er hjá Tjóðsavninum at greiða myndugleikum, íleggjarum og áhugaðum frá, hvussu ferðslan kann skipast á oynni.



*Við kirkjugarðin í Koltri. Frá vinstru: Tórhildur Tórhallsdóttir og Áslaug Traustadóttir frá Landmótum og Høgni Hansen frá SNA-Arkitektum*



*Fólk frá Tjóðsavninum saman við Toke Thomas Høje frá Aarhus Universitet. Frá vinstru: Bjørn Patursson, Tórálvur Weihe, Leivur Janus Hansen, Toke Thomas Høje og Agnes-Katharina Kreiling*





# FUGLAKANNINGAR Í KOLTRI 2022

Eins og undanfarin ár vórðu videoupptøkur stroymdar frá drunnhvítareiðrum, heiðafuglapisur vórðu ringmerktar, fuglateljingar vórðu gjørdar og fuglareiður skrásett við dronu

Leivur Janus Hansen, savnsvørður

**Drunnhvítarnir vóru stroymdir** beinleiðis og vístir á heimasíðuni hjá Tjóðsavninum. Filmarnir vórðu goymdir, og ein mynd frá hvørjum av teimum trimum myndatólunum var goymd fimta hvønn minutt. Samlað vóru tað nøgvir hundrað tímar av video og yvir 100.000 myndir.

Ringmerkingin í Koltri er løgd soleiðis til rættis, at ungar hjá sjó- og vaðfuglum verða merktir. Hesi sløg liva øll leingi og eru sera sjónlig, og ringarnir verða lutfalsliga ofta funnir aftur.

Ringmerkingin í 2022 varð tó í stóran mun darvað av fyrivarninum fyri fuglakrími, og tí vórðu bert 4 fuglar ringmerktir í Koltri: 1 tjaldursungi, 1 skurapisa hjá fiskimása og 2 fransamásapisur.

Jón Aldará taldi fugl eftir R250 mannagongdini tríggjar ferðir í búfíðini. Seks teljistøðir eru, men bara í fyrstu teljingini vórðu allar støðirnar taldar. Orsakað av veðri og trygdarfyrilitum kundu bert ávísar støðir teljast í seinnu teljingunum. Eisini taldi Jón drunnhvíta í øllum steinlaðingum og grótrúgvum frá syðra endanum av bøgarðinum omanfyri Skarvastein og norður í Gerðar; nakað av bøgarði umframt kirkjugarðurin restaði í.

## Koltur

# PLANTUKANNINGAR

Í ár vóru plantukanningar gjørdar tríggjar ferðir í summarhálvuni. Fyrstu ferð var síðst í mai, síðani síðst í juni og at enda fyrst í august. Mannagongdirnar fyri kanningarnar eru tær somu hvørja ferð, fyri at tað skal vera gjørligt at samanbera. Somuleiðis eru støðini, sum verða kannað, tey somu

Kolbrún í Haraldsstovu, savnsvørður

**Plantukanningar verða gjørdar** við einum ferningi úr stáli, við smáum ferningum í, sí mynd. Hann verður lagdur á lendið, og síðani vera plantusløgini skrásett og tald í hvørjum ferningi. Hetta gevur eina góða ábending um plantumargfeldið, og hvussu útbreitt hvørt plantuslag er.

Í ár høvdu vit góða vitjan av plantufrøðinginum Oliver Bechberger úr Týsklandi, sum var her eina viku í juli og gjørdi kanningar saman við Kolbrún í Haraldsstovu. Eisini kannaðu tey oynna fyri nýggjar skrásetingar, og fleiri plantusløg løgdust afturat plantulistanum.

Mathilde Juul kom úr Danmark til Føroya í starvslæru í 2 mánaðir í sambandi við hennara kandidatútbúgving. Hon var eisini við í Koltri sum hjálparfólk. Somuleiðis var Elsa Berg eisini hjálparfólk á Plantudeildini úti í Koltri í nakrar dagar. Tað hevur sostatt verið ein hópur av granskarum í Koltri í ár, og tað er at fegnast um.



*Oliver Bechberger, plantufrøðingur, kannar gróður, meðan Agnes-Katharina Kreiling og Leivur Janus Hansen hyggja eftir skordýrum*



*Hjálpirøtur koma undan mosanum á norðursíðuni á Koltri*



*Plantuliga margfeldið í rókunum á norðursíðuni á Koltri*



*Oliver Bechberger kannar gróður inni undir hamaranum*



*Kolbrún í Haraldsstovu og Mathilde Juul, praktikantur*





*Bjørn Patursson, fyristøðumaður í Koltri, greiðir frá*

# Aage V. Jensens Naturfonde í Føroyum

Aage V. Jensen grunnarnir vóru í fleiri førum og vitjaðu Koltur. Í fyrsta umfari vóru starvsfólk á danska grunninum Aage V. Jensens Naturfonde í Føroyum, har tey vitjaðu plantufrøðiliga urtagarðin og vóru úti í Koltri, har savnsvørðurin á plantudeildini, Kolbrún í Haraldsstovu, vísti teimum runt og greiddi teimum frá Koltursverkætlanini

Herleif Hammer, stjóri

**Seinni komu umboð** frá nevndini í stóra grunninum Aage V. Jensens Charity Foundation. Tey vitjaðu ymsastaðni í Føroyum fyri at síggja tær verkætlanir í Føroyum, sum grunnurin veitir stuðul til, og sostatt hvussu stuðulin verður nýttur. Vitjað varð hjá Edmundi Joensen í Sundalagnum, har ein viðalund verður plantað, og eisini varð vitjað hjá Føroya Fuglafrøðifelag.

Aage V. Jensen Fonde stuðla eisini verkætlanir, ið Tjóðsavnið hevur í Kalsoynni og úti í Koltri. Ikki lá fyri at fara út í Kalsoynna at vitja, tí var farið niðan á Hálsin niðanfyri Klakk á Borðoynni. Har sást yvir á hagan "Stóriryggur" á Kalsoynni, sum er karmurin um eina av verkætlanunum í Kalsoynni. Høvi var tó at vitja úti í Koltri. Í Koltri tók "Kolturstoymið"( te. lívfrøðingarnir, ið arbeiða við Koltursverkætlanini) og Bjørn Patursson, fyristøðumaður, ímóti teimum.

Bjørn og kolturstoymið vístu teimum vitjandi runt á oynni og greiddi teimum frá tí, ið var at síggja. Síðani var farið inn, har borðreitt var við øllum tí góða, sum oyggin kundi bjóða. Her helt Herleif Hammer, stjóri, framløgu um Koltursverkætlanina sum heild, meðan Leivur Janus Hansen, savnsvørður, greiddi frá tí lívfrøðiliga partinum av verkætlanini.



*Frammanfyri einari skordýrafellu, har Agnes-Katharina Kreiling, Ph.d. lívfrøðingur, greiðir frá lívfrøðiliga arbeiðinum*



*Leivur Janus Hansen, savnsvørður, og Leif Skov, formaður í Aage V. Jensen Fond*



Syðradalur, Kalsoy

# TRYGGJAR, ENDURBØTIR OG STYRKIR FØROYSKU NÁTTÚRUNA

Lendisbati er ein verkætlan hjá Tjóðsavninum, ið fremur endurbøtandi átøk í føroysku náttúruni. Høvuðsátøkini eru m.a. at fyribyrgja jarðrivi, bøta um lívmargfeldið og endurbøta vátlendi til frama fyri kolevnisupptøku

Elsa Berg, B.Sc í vistfrøði og Kolbrún í Haraldsstovu, savnsvørður

**Øll átøk verða** framd í samstarvi við jarðareigarar og –leigarar, sum sjálvboðnir leggja lendi til átøkini, kenna øki teirra best og í fleiri førum luttaka beinleiðis í arbeiðinum. Lendini, ið verða endurbøtt, eru kring alt landið. Tey eru ymisk í vavi og slagi. Hetta gevur møguleika fyri at menna vitan innan ymisk náttúruøki í Føroyum, so sum graslendi, vátlendi og heiðalendi.

Føroyska náttúran er viðbrekin. Leivdir av torvskurði síggjast sum sár í lendinum, og jarðriv eru vorðin ein vanlig sjón. Harðbalna veðurlagið ger somuleiðis, at lendið er undir áhaldandi trýsti. Hóast vit menniskju altíð hava verið tætt tongd at náttúruni, hava vit ikki altíð sýnt virðing og havt fyrilit fyri, hvat náttúrutilfeingið tolir. Djóralív og plantulív eru í vanda, tí menniskjaliga virksemið ofta ikki tekur atlit at náttúruni. Eisini eru veðurlagsbroytingar eitt varandi fyribrigdi, og trýstið á náttúruna hevur tí ongantíð verið størri, enn tað er nú.



*Upprunavøkstur av Klubbanum á Kunoynni*

Endamálið við átøkunum hjá Lendisbata er at bøta um hesi náttúruviðurskifti. Á tann hátt geva vit djóralívinum og plantulívinum ein tryggari grundvøll, samstundis sum vit betra um vælveruna hjá fólki. **Trívist náttúran, trívast vit øll.**



*Elsa Berg saman við Águstu og Íðunn frá Landgræðsluni*



### STUÐUL FRÁ NORÐURLENDSKA RÁÐHARRARÁÐNUM

**Í virkisætlanini fyri** Visjón 2030 hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum verður staðfest, at Norðurlond komandi árini fara at samstarva um at gerast burðardyggasta økið í heiminum. Náttúruloysnir eru ein natúrligur partur av at røkka hesum máli, og Norðurlendska ráðharraráðið hevur tí valt at lata stuðul til verkætlanir, sum seta í verk náttúruloysnir. Lendisbataverkætlanin er liður í hesari visjón, tí í januar fekk Lendisbati játtað stuðul frá Norðurlendska Ráðharraráðnum saman við seks øðrum verkætlanum úr Svøríki, Finnlandi, Álandi, Danmark og Íslandi. Stuðulin legði lunnar undir, at endurbøtingin av skriðuni Heiman Gjónna í Syðradali kundi fara í gongd.

### STUÐUL TIL MIÐLAFÓLK

**Seinasta heyst fekk** Lendisbati 100.000 kr. í stuðuli frá Aage V. Jensens Fonde. Hesin stuðulin fer til eitt miðlafólk at siga søguna hjá bóndunum, sum eru við í verkætlanini. Eisini hevur grunnurin játtað fígging til hegnið á hagapartinum Stóraryggi, sum er ein av verkætlanum, Lendisbati er farin í holt við.

### FRAMTÍÐIN VIÐ LENDISBATA

**Lendisbati vil granska** og uppbyggja vitan um føroysku náttúruna til tess at kunna verja og varðveita hana á bestan hátt. Í løtuni verður arbeitt við ætlanum um at endurbøta drenaði vátlendir, til tess at steðga kolevnisútláti og verja viðbrekna lívmargfeldið á vátlendisøkjum.

Tá gróðurin bøtist í haganum, hækkar lívfrøðiliga margfeldið, tí økini, har plantu- og fuglalív trívist, gerast fleiri. Somuleiðis gerst jørðildið sterkari, røturnar halda moldini fastari og forða fyri jarðrivi. Varðveita og endurbøta vit vátlendi, tryggja vit, at kolevni verður verandi í vátlendunum, somuleiðis sum kolevnisupptøkan byrjar spakuliga av nýggjum í endurbøttu lendunum. Soleiðis kann náttúran í Føroyum linna um avleiðingarnar av veðurlagsbroytingum og varðveita og økja um trívnaðin hjá djórum, plantum og menniskjum.



**VERKÆTLANIR**

## SKRIÐAN HEIMAN GJÓNNA

**Um aldarskiftið leyp** skriða í hagapartinum Heiman Gjónna omanfyri Syðradalsbygd á Kalsoynni. Hóast fleiri enn 20 ár eru liðin, síðan skriðan leyp, er lítil og eingin gróður at síggja í skriðuni. Skriðan er 100 metrar til longdar, 30 metrar breið og 1,7 metur djúp, og verður nú granskað og endurbøtt fyri at bøta um lívmargfeldið og sárið í lendinum. Í ár er skriðan hegnað av fyri seyði, og grundkanningararbeiðið av plantulívinum er byrjað. Komandi tvey árini verða ymiskir endurbótingarhættir, sum hóska til føroyska lendið, mentir og royndir. Komandi vár verða myndatól sett upp, sum saman við plantufrøðiligum kanningum skulu fylgja við, hvussu gróðurin kemur fyri seg, nú skriðan er hegnað inni fyri at halda seyði burtur.

Hetta arbeiðið verður gjørt í samstarvi við Landgræðsluna, sum eru íslendskir ráðgevar innan náttúruendurbøting, Miðnám í Vestmanna og Gróðurstøðina í Hoydølum.

## HAGIN STÓRI-RYGGUR

**Hagaparturin Stóriryggur á** Kalsoynni er um 500.000 fermetrar. Á heysti í 2020 varð seyðurin tikin av, og síðani hevur lendið fingið frið. Stóriryggur er nú eitt náttúrufriðlendi, har gróður sleppur at koma fyri seg uttan ávirkan frá menniskjaligum virksemi. Lendisbati fer at gera plantufrøðiligar kanningar og endurbøtandi átøk í haganum og fylgja við, hvussu hagin við tíðini mennist.

## VITJAN AV FÓLKI FRÁ HAGAPARTINUM STÓRIRYGGUR Á KALSOYNNI

**14. desember komu menn frá hagapartinum Stóriryggur á vitjan. Hagaparturin Stóriryggur er um 500.000 fermetrar. Kristin Vilhelmsen tók seyðin av á heysti 2020 og hevur síðani latið lendið fingið frið. Stóriryggur er nú eitt náttúrufriðlendi, har gróður sleppur at koma fyri seg uttan ávirkan frá menniskjaligum virksemi**

**Lendisbati fer at** gera vakstrarkanningar og endurbøtandi átøk í haganum og fylgja við, hvussu hagin við tíðini mennist.

Í hesum sambandi er 10 ára leigusáttmáli gjørdur við eigararnar, og var hesin sáttmálin undirskrivaður í 2021. Í 2022 var sáttmáli gjørdur um røkt, eftirlit og viðlíkahald. Í sambandi við vitjanina var hesin sáttmálin undirskrivaður.

Ætlanirnar við hagapartinum Stóriryggur eru partur av virkseminum hjá verkætlanini Lendisbati, sum Tjóðsavnið stendur fyri. Lendisbati hevur fingið dyggan stuðul fra Aage V. Jensens Fonde og Norðurlendska ráðharraráðnum til endamálið. Stuðulin fer millum annað til ráðgeving frá serfrøðingum uttanlands, hegn og røkt.

Herleif Hammer, stjóri



*Frá vinstru: Poul Juul Vilhelmsen, Andrias Eliasen, Kristin Vilhelmsen og Herleif Hammer*

### AÐRAR VERKÆTLANIR Á VEG

**Við tíðini vera** fleiri verkætlanir lagdar afturat virkseminum hjá Lendisbata. Aðrir jarðareigarar og -leigarar kring landið eru áhugaðir at samstarva við Lendisbata, og eru verkætlanir á veg í Fugloy, Nólsoy og í Suðurstreymoy. Verkætlanirnar fevna um ymsar vistskipanir, men í høvuðsheitum er talan um at endurbøta vátlendi og heiðalendi í hesum økjum. Hetta verður gjørt við jarðareigarunum og –leigarunum, sum kenna sítt øki best.



Urtagarðurin í Kúrdali. Roynitrøini vórðu skorðin, tí tey høvdu fingið skaða í nógva vindinum. Á myndini síggjast gartnarin á Tjóðsavninum, Annleyg Patursson, og Heini Joensen frá Vøxtur



Sámal Ravnsfjall frá Vøxtur leggur avskornu roynigreinarnar í ein avlangan dunga til lívd og stóra gleði hjá skordýrum og smáfugli



Urtagarðurin í Hoyvík víðkaður suðureftir. Her standa m.a. nógvar aliplantur og arktisku pílarnir, sum Landstýrið og Løgtingið góvu hennara hátign Margrethu drotningin í sambandi við hennara 50 ár á trónuni. Pílarnir skulu seinni plantast úti í Koltri

# URTAGARÐAR TJÓÐSAVNSINS

Herleif Hammer, stjóri

**Koronaárini 2020 og 2021 var nógv arbeiði lagt í at seta urtagarðarnar í Hoyvík og Kúrdali í stand, samstundis sum botaniski urtagarðurin á Debesartrøð varð fluttur niðan til Hoyvíkar**

**Skjótt var tó** greitt, at um pláss skuldi vera fyri at ala føroyskar plantur, so kravdist meira pláss. Tí var vaksið um urtagarðin niðri í Hoyvík í 2022.

Urtagarðurin í Kúrdali var ruddaður fyri sponsk hindber í 2020. Undan kom ein hugnaligur og vakur urtagarður við vøkrum trøum. Nøkur av hesum fórust í vindi um várið og vórðu tí skorin niður.

Ætlanin við urtagarðinum er at gera eitt stað, har fólk kunnu hugna sær, samstundis sum umhvørvið, sum var kring gomlu royndarstøðina, verður endurskapað.





Skipsdagbøkur hjá Japetus Steenstrup

# Á danska skjalasavninum (Rigsarkivet) at leita eftir gomlum skipsbókum

**Fyrst í undanfarnu øld var stórur áhugi fyri náttúru, og tey, sum varðaðu av í Dansk Naturhistorisk forening, settu sær fyri at kanna djóralívið í Føroyum betur. Í 1923 játtaði Carlsberggrunnurin at fíggja hesa stóru verkætlan, og í 1924 var so spakuliga farið í gongd við at savna inn tilfar**

Jan Sørensen, savnsvørður

**Savnað varð bæði** á sjógvi, á landi og í áum og vøtnum, men tað var ikki fyrr enn í 1926 og 1927 at savnað varð við báti. Á vári í 1926 var verjuskipið *Beskytteren* brúkt til hesar kanningar, og seinni sama ár og árið eftir varð savnað við havrannsóknarskipinum *Dana*.

Úrslitini av hesum arbeiði vóru givin út í bókaverkinum “The Zoology of the Faroes” (Djóralívið í Føroyum). Hetta er ein bókarøð við allari tøkari vitan um djóralív í Føroyum fyri hundrað árum síðan. Í dag er hetta framvegis tað mest týðandi bókaverk um ryggleys dýr í Føroyum.

Í arbeiðinum at skrásetta dýralívið á havbotninum í Føroyum er týdningarmikið at vita neyvt, hvaðani dýrini stava, og tað var í hesum høpi at farið varð á skjalasavnið í Keypmannahavn at leita eftir gomlum skipsdagbókum. Tað, sum hevði serligan áhuga, var, um tað bar til at finna upplýsingar um sýnistøkustøðirnar í Føroyum, hetta fyri at kunna staðseta, hvar tey ymisku dýrini vóru funnin.



*Beskytteren*



*Havrannsóknarskipið Dana*

Úrslitið var heldur skuffandi. Sjálvt um tað bar til at finna skipsdagbøkur og røttu persónarnar, so var onki at finna um Føroyar.

Vónirnar at finna skipsdagbøkurnar liva tó enn, og um alt gongst eftir ætlan ber til at skráseta gomlu støðirnar í sjódjóradátugrunnin um ikki so langa tíð.



Gamalt glas við havsoppi



Tunna við smágløsum



Flokkað sýn

# 70 TUNNUR AV DJÓRATILFARI

## Seint á heysti 2021 komu 70 tunnur av djóratilfari til Kaldbaks. Hetta var tilfar frá Zoologisk Museum í Keypmannahavn

Jan Sørensen, savnsvørður

**Hetta hevur samband** við, at alt náttúrufrøðiliga økið í Keypmannahavn skal umskipast, og at nýggir bygningar skulu gerast til søvnini. Sum skilst verður ikki pláss fyri øllum, og tí var spurt, um Tjóðsavnið vildi hava ein part av føroyska tilfarinum aftur til Føroya.

Avtalað var gjørd um hetta í 2019, og arbeitt hevur verið við at pakka og tryggja tilfarið, áðrenn tað bleiv sent til Føroya, higar tað kom síðst í 2021.

Av trygdarávum var allur konserveringsløgur tikin burtur úr gløsunum, og tí var umráðandi at fylla spritt á aftur so skjótt sum gjørligt. Hetta arbeiðið byrjaði beint eftir nýggjár 2021/22 og var liðugt á heysti 2022. Tilfarið er nú flokkað og partvís sett uppá pláss. Eftir er at skráseta og at seta navngreindu dýrini á rætta stað.

Tilfarið er ein blandingur av ógvuliga gomlum og so meiri nýggjum. Einstøk gløs eru meira enn hundrað ára gomul. Hetta eru dýr, sum donsk embætisfólk hava sent til Danmarkar, tá tey hava verið í Føroyum í sambandi við teirra yrki.

Tað mesta av tilfarinum er frá nógv umrøddu Biofar verkætlanini, har savnað var inn í árunum 1988-1999.

Tilfarið fevnir um øll sløg av sjódýrum, men nógv tað mesta er soppar (*porifera*). Hetta eru lutfalsliga stór dýr, og tey krevja nógv pláss. Av tí at dýrini eru so stór, so eru tey ofta í teimum vælkendu museumsgløsunum, sum nú eisini eru sera sjáldsom at fáa hendur á. Svampatilfarið er so ríkt, at tað kundi verið brúkt til serritgerð, Ph.d. ella post-doc.

Butsmaðkarnir (*polychaeta*) eru oftast ikki so stórir í vavi, men teir eru stórir í tali, og tí fylla teir eisini nógv.

Tindadýrini, hetta er igulker, krossfiskar, slangukrossfiskar og trælsrassar, eru eisini dýr, sum eru lutfalsliga stór, og tí fylla tey eisini nógv í samlaða tilfarinum.

Tilfarið er so rúgvismikið, at roknast má við, at rúm tíð gongur, áðrenn alt er fingið uppá pláss.







Sandurin í Koltri



Sandurin farin út á lónna at liggja

Skeljapetti funnin á sandinum, sum verða brúkt til at geva eina mynd av, hví sandurin er so ljósur





Sandur undir sjóneyku støddarøktur umleið 100 ferðir. Fremst á myndini sæst eitt slag av mosadýri (bryozoa), hesi liva í hópi

# HVÍTI SANDURIN Í KOLTRI

## Koltur er soleiðis háttað, at strandarlinjan fyri tað mesta er klettur og høgt uppfyri. Nakað norðanvert gamla býlingin "Heimi í húsi" er tó eitt undantak; har er ein so vakur sandur. Hetta er ikki nakar stórur sandur, men frábera vakur, tí hann sýnist so nógv hvítari enn aðrastaðni í Føroyum

Jan Sørensen, savnsvørður

**Sandur hevur lit** eftir, hvørjum tilfari sandurin er komin av. Tá sandurin í Koltri er so ljósur, kundi hetta bent á, at skeljar eru blandaðar uppí. Flestu kenna heitið skeljasandur, sum er sandur av knústum skeljum, og tí vóru eisini góðar orsøkir til at halda, hetta eisini mundi vera galdandi her.

Á sumri í 2022 savnaði sjódjóradeildin tilfar av sandinum til nærri kanningar. Gingið var á sandinum, har øll tey størstu pettini vóru hentað og tikin við til Kaldbaks, har tey síðani vórðu kannað undir sjóneyku.

Tað kann vera ógvuliga torført at siga við vissu, hvørji sløg talan er um, tá skeljarnar eru í smáum pettum. Tess størri pettini eru, lættari er at síggja, hvaðani tey stava, kortini er altíð ein ávís óvissa í slíkum arbeiði.

Úrslitið var eitt sindur óvæntað. Tað vísti seg, at flestu pettini vóru tvískeljapetti (og so at siga ongi gággu- ella kúvingapetti). Har vóru petti av fligu, gjari (krabbadýr), øðu, og okkurt einstakt petti av kúskel. Mest var tó av einum slagi, líkt jákupskel, sum tó ikki hevur nakað føroyskt navn (genus: *anomia*). Hetta slagið heftir aðra skelina á hart undirlendi, sum ger niðaru skelina avskeplaða í mun til tað ovaru. Hetta er ein lítil skel, okkurt um 1-2 sentimetrar.

Skeljapettini benda tí á, at sandurin í Koltri fær sítt ljósa eyðkenni av skeljum, sum sita á kletti og havbotnsgróti útfyri og í økinum við sandin. Tað eru sostatt ikki skeljar, sum liva í sandinum, sum gera sandin hvítan. Hetta passar væl við, hvussu sandurin háttar sær, tí av og á fer sandurin út á lónna at liggja, og tá sæst ongin sandur og bert malargrót.

Sandurin er tí ikki hóskandi hjá skeljum at liva í, tí ov mikil rørsla er í sandinum. Hugsandi er eisini, at malargrótið knúsar alt, sum er bleytari enn grót; fliður, gjar og annað verður malið til sand, sum so gevur sandinum tað ljósa dæmið.

# FØROYSK SKORDÝRA-FRØÐI Í HEIMSHØPI

Hóast gerandisdagurin er um at vera tann sami aftur síðan Covid-19 sóttina, so tykjast vísindaligar ráðstevnur og samskifti verandi broytt

Agnes-Katharina Kreiling, Ph.D. lívfrøðingur

**Nógvar ráðstevnur eru** nú online ella sum sonevndar hybridráðstevnur, har fólk savnast á einum stað og onnur luttaka online. Tað er avgjørt týdningarmikið at hitta fólk andlit til andlits, og hóast hetta ikki ber til á onlineráðstevnum, so er tað ein fyrimunur at kunnu luttaka á fundum, skeiðum og ráðstevnum uttan at brúka tíð og pening upp á at ferðast til fjarskotin støð.

Í sambandi við skordýrafrøði hevur deildin fyri djór á landi notið gott av hesum. Í 2022 hava vit lært nýggjar arbeiðshættir, knýtt sambond við skordýrafrøðingar runt heimin og, ikki minst, kunnað um okkara gransking og okkara skordýrasavn á ymsum online tiltøkum.

Tíðliga í 2022 luttók Agnes-Katharina Kreiling á einum online skeiði í eyðmerking av æðraveingjum. Hetta var fyriskipað av granskarum á Penn State University og øðrum stovnum. Skeiðið vardi í sjey dagar og fevndi um fyrilestrar, sum serfrøðingar í ymsum vespuættum hildu, umframt verkligar verkstovur í at eyðmerkja. Skeiðið koyrdi eftir amerikanskari klokku, so hjá okkum byrjaði tað seinnapartin og endaði ikki fyrr enn væl eftir midnátt, men onkuntíð er tað neyðugt at ofra seg eitt sindur fyri at læra frá serfrøðingum. At halda seg vaknan hálva náttina er ikki ringt, tá hugsað verður um møguleikan at kunna eyðmerkja elalítlar vespur, sum eru savnaðar í Koltri.

Tann 21. altjóða vísindaliga ráðstevnan um dansimýggj (21st International Symposium on Chironomidae) var 4. til 7. juli 2022 í Japan. Tó, í Japan vóru avmarkingarnar í sambandi við Covid-19 somikið strangar, at ráðstevnan var einans online hesa ferð. Hesa ferð var neyðugt at fara upp sera tíðliga, tí henda ráðstevna koyrdi eftir japanskari klokku. Tað hevur minni týdning, tá tú fært høvi at hitta kenningar á økinum, umframt fólk, sum nýliga hava stigið inn um gáttina til dansimýggjaheimin.







Tjóðsavnið hevði eina framløgu og eitt veggjaspjaldur. Framløgan hjá Agnes-Katharina Kreiling var nevnd "New Chironomidae records for the North Atlantic islands based on pupal exuviae". Hon kunnaði um fleiri nýggj sløg fyri Ísland og Føroyar, sum hon hevur skrásett síðstu árini. Veggjaspjaldrið "Seasonal variation in chironomid communities in two Faroese streams" hjá Leivuri Janus Hansen og Agnes-Katharinu Kreiling vísti eina dagføring av eini verkætlan um skordýr í áum í Føroyum.

Árliga ráðstevnan hjá netverkinum fyri skordýrasøvn (Entomological Collections Network) var eitt vikuskifti um miðjan november. Hendan var skipað sum ein hybrid-ráðstevna í Vancouver, Kanada. Agnes-Katharina Kreiling og Leivur Janus Hansen luttóku online fyri at kunna seg um nýggjastu altjóða menningina hjá skordýrasøvnum. Flestu luttakarar vóru frá náttúrugripasøvnum og stovnum í Norður- og Suðuramerika, men fólk frá søvnum um allan heim luttóku, m.a. í Stórabretlandi og Týsklandi. Stóru átøkini í løtuni er talgilding av gripum í bæði stórum og smáum søvnum, og tað er gott at síggja, hvørjar snávingarsteinar onnur hava rent seg í, so vit kunnu vera væl fyrireikað, tá søvnini á Tjóðsavninum skulu talgildast.




*Henrik Gregor Knudsen, leiðari fyri fjølmiðlagranskingini hjá Danmarks Radio, hevði eitt upplegg um, hvat vit kunnu brúka brúkarakanningar til*

## ODM FORMIDLINGS-SEMINAR 2022

**Formidlingsseminar ella ráðstevnan um miðling hjá felagnum fyri donsku søvnini (Organisationen Danske Museer) var í 2022 hildin á Hotel Svendborg í Svendborg á Fjóni í døgunum 7. til 8. mars. Heitið á seminarinum var Museum Skills. Tað snúði seg í stuttum um teir førleikar, sum fara at gerast eitt krav til savnslærarar í framtíðini. At vit skulu rista posan eitt sindur og ikki altíð gera tað, sum vit eru von at gera**

Tórarinn N. á Rípuni, savnslærari

**Krøvini til savnslæraran** eru økt nógv, hann skal nærum vera ein høgguslokkur og hava armarnar allastaðni – hann skal ikki bara hava rundvísingar og undirvísing, men skal eisini marknaðarføra, savna pening og ymiskt annað. Hetta er tó kanska mest galdandi í Danmark, har tað er umráðandi hjá søvnunum at fáa pening uttanífrá.

Tann fyrra dagin vóru nógv innsløg á skránni. Ikki bert frá savnsfólkum, men eisini frá fólkum, ið arbeiða við øðrum evnum. Har vóru bæði sjónleikarar, listafólk, rithøvundar og onnur. Tað mesta snúði seg um at broyta gamlar vanar og at hugsa øðrvísi, tí framtíðin fer at krevja nakað annað av søvnunum, enn tað, sum verður kravt nú.

Seinna dagin varð vitjað á Forsorgarsavninum í Svendborg, sum er best varðveitti fátækragarðurin í Norðurlondum. Av tí at so nógv fólk vitjaðu í senn, vóru tey vitjandi býtt upp í fýra bólkar. Hvør bólkur fekk sín rundvísara. Men rundvísararnir vóru sera ymiskir – stjórin var ein teirra, ein var søgufrøðingur, og ein var fyrrverandi búfólk á fátækragarði, og ein hevði verið heimleysur. Aftaná, tá ið komið var aftur á hotellið, og prátað var um alt, sum fólk høvdu hoyrt og sæð, var greitt, at upplivingarnar av rundvísingunum høvdu verið sera ymiskar og treytaðar av, hvør rundvísarin hevði verið.

Fyri Tjóðsavnið luttóku Palli Askham og Tórarinn N. á Rípuni.







*Thomas Lütken arbeiðir við nýskapan. Hann arbeiðir við, hvussu vit bróta vanar og ikki altíð gera tað, sum vit eru von at gera*



Nýliga endurbøtt vátlendi



Endurbøtt vátlendi, har vátlendisplantur eru komnar aftur og eru farnar at trívast



Náttúrliga vatnrenslið er byrjað aftur í endurbøtta vátlendinum



Heiðabláber og loðpílur á einum náttúruøki í Hítadali, Íslandi

# Plantudeildin vitjar Landgræðsluna í Íslandi

**Í sambandi við, at Tjóðsavnið hevur gjørt eina samstarvsavtalu við íslendska granskingarstovnin Landgræðslan (Soil Conservation Service of Iceland), fór Kolbrún í Haraldsstovu, savnsvørður á Plantudeildini, eina forvitnisliga ferð til Íslands í juni at heilsa uppá starvsfólkini og fáa betri innlit í teirra virksemi**

Kolbrún í Haraldsstovu, savnsvørður

**Landgræðslan hevur í** meira enn 100 ár arbeitt við at granska og endurbøta lendi í Íslandi. Ísland hevur stórar avbjóðingar við svarðloysi orsakað av fornum landbúnaði og avveitan av vátlendum, og er hetta eitt av høvuðsviðurskiftunum, sum Landgræðslan tekst við. Landgræðslan skal komandi árini virka sum ráðgevandi stovnur í Lendisbataverkætlanini hjá Tjóðsavninum og hevur longu verið við sum ráðgevi í teimum verkætlanum, sum Lendisbati arbeiðir við.

Kolbrún ferðaðist runt á norðursíðuni á Íslandi og vitjaði ymisk náttúruøkir, har endurbøting fer ella er farin fram. Víst bleiv m.a., hvussu tey bøta berlig lendir, sum søguliga hava verið gróðurrík, fyri at forða, at meira gróður verður máaður burtur av vindi. Hættirnir, sum vera brúktir, eru eitt nú at sáða uppruna grasfræ í lendini, leggja hoyggi á, taða við høsnatøðum ella bert avbyrgja økið fyri seyði. Tað kann seta gongd í vøkstur, sum annars ikki hevði klárað at fótað sær, tryggja lívmargfeldinum betri umstøður og sum heild styrkja lendið mótvegis sliti. Tað var ótrúliga áhugavert at eygleiða, hvussu gróðurin spakuliga kom fyri seg, tá økini fingu røttu umstøðurnar.

Eisini vístu starvsfólkini á Landgræðsluni fram nøkur av teimum vátlendisøkjunum, sum tey arbeiða við, bæði nýliga, men eisini eldri endurbøtt vátlendi. Nógv vátlendi hava verið avveitt til eitt nú landbúnað, men seinastu árini er týdningurin av vátlendum blivin meira sjónligur, eitt nú í samspælinum við veðurlagsbroytingar. Avveitt vátlendi hava við sær stórt útlát av vakstrarhúsgassum og verða roknað sum partur av samlaða útlátinum í Íslandi. Tí er eisini stórur áhugi fyri at endurbøta vátlendi, soleiðis at útlátið heldur uppat. Tað er ein ótrúliga skjót broyting, sum hendir, tá vátlendir vera endurbøtt. Fuglurin kemur beint aftur at skvatla í uppfyltu veitunum, vátlendisplantusløgini koma fyri seg, og spakuliga byrjar náttúruliga vatnrenslið at skapa smáar áarløkar, sum við tíðini finna veg oman í megináirnar og út á sjógv. Til dømis er tríblaðað bukkablað (*Menyanthes trifoliata*) vanlig vátlendisplanta í Íslandi, men í Føroyum er hon sera sjáldsom. Hví man so vera?

Hóast Ísland landafrøðiliga er nógv yngri enn Føroyar, so líkjast londini nógv í landslagi, gróðri og fuglalívi annars. Vit hava nógv plantu- og fuglasløg til felags, og landbúnaðarsøgan er eisini rættiliga lík í báðum londunum. Hesi viðurskiftini geva ein gyltan møguleika at arbeiða saman og at læra av hvørjum øðrum.








Eitt av áhugaverdu og læruríku skeltunum í Vildmosecentret




Verkætlanin Lille Vildmose varð fíggjað av fleiri en 10 ymiskum grunnum. Nakrir teirra standa niðast á avmyndaða skeltinum

# VITJAN Í LILLE VILDMOSE Í NORÐURJYLLANDI

**Í sambandi við arbeiði savnsins við føroysku náttúruni og miðlan av henni, verður oftani hugt eftir, hvussu onnur gera fyri at fáa hugskot og íblástur. Ein slík vitjan var gjørd í Lille Vildmose í juni**

Herleif Hammer, stjóri

**Lille Vildmose er** eitt stórt náttúruøki uppá 7.600 hektarar. Størsti parturin av økinum er í dag "vill" náttúra, sum mann hevur endurbøtt, ein partur er landbrúksjørð, og smærri partar eru sokallað "urnáttúra". Mitt á økinum stendur "Lille Vildmosecentret", ið er ein stórur vitjanardepil. Í Lille Vildmose kunnu fólk uppliva villa náttúru og tað ríka djóralív, sum nú er komið. Til ber at ganga á gøtum í ymiskum lendum sum mosa, strond, skógi og ong. Í Vildmosecentret er ymiskt bæði til børn og vaksin, nógv djór eru at síggja, ein náttúruskúli, har skúlaflokkar vitja, og tiltøk eru um summarið fyri børnum.

Lille Vildmose var sera viðkomandi, tí Tjóðsavnið arbeiðir í løtuni við stórari verkætlan í Koltri, har náttúruupplivingar eru ein týdningarmikil partur. Harafturat er verkætlanin "Lendisbati" veruliga farin í gongd, har endurbøting av náttúrini er í miðdeplinum.



Náttúruskúlin hevur góð og stór høli



Kolbrún greiðir starvsfeløgunum frá arbeiði sínum í Koltri



Á veg niðan á Oynna. Kirkjubønes, Hestur og Sandoyggin síggjast í bakgrundini



Uppi á toppinum njóta fólk útsýnið vestur- og norðureftir

# STARVSFÓLKA-ÚTFERÐ Í KOLTRI

Tíðliga í juni vóru starvsfólk á Tjóðsavninum útferð úti í Koltri. Lívfrøðingarnir, sum gera feltarbeiðið í Koltri, høvdu tikið stig til at fáa starvsfelagarnar á "fastlandinum" út í lítlu oynna at síggja og at hoyra, hvat arbeiðið, teir gera í Koltri, snúði seg um

Herleif Hammer, stjóri

**Hesin summardagurin var** sjáldsama góður við lýkku, sól og ongum vindi. Helst var talan um ein av bestu døgunum í 2022. Siglt var av Gomlurætt. Tá komið var út, skiftust lívfrøðingarnir at greiða hinum frá feltarbeiðinum. Síðani var farið ein gongutúr. Tey, sum hættaðu sær, gingu niðan á hægsta staðið "Uppi á Oyggj", sum við sínum 477 metrum er hægra fjallið á oynni. Hini gingu niðan á "Fjallið", sum við sínum 101 metrum er lægra fjallið í Koltri og samstundis Føroya lægsta fjall.



Áðrenn farið var innaftur, var grillhugni "Heimi í Húsi"



Bjørn Patursson, oyggjarvørður, greiðir frá arbeiði sínum í haganum og øðrum áhugaverdum, ið er at síggja



# SKEIÐ Í VIÐLÍKAHALDI AV MÚRVERKI

Varðveitingararbeiðini á múrverkið í Múrinum og Líkhúsið í Kirkjubø eru nú framd. Fyri at tryggja varðveitingina í framtíðini er neyðugt við einari viðlíkahaldskipan

Helgi Dahl Michelsen, savnsvørður

**Síðst í juni** í 2022 var Hans Chr. Frederiksen, konservator, og helt skeið í viðlíkahaldsarbeiði av múrverki. Hans Chr. hevur ráðgivið og lagt lag á øll árini undir varðveitingararbeiðunum í Kirkjubø, um eitt nú, hvussu fugurnar skulu gerast, og hvussu rætta mørtilsamansetingin skal blandast.

Starvsfólk frá Tjóðsavninum og frá múrararfyritøkuni Spf/Krossteig, ið hevur havt múrararaarbeiðið um hendur undir varðveitingararbeiðinum av Múrinum, vóru við á skeiðinum. Viðlíkahaldsarbeiðið inniber m.a. at eygleiða og steðga vøkstri, tí røturnar kunnu gera skaða á múrverkið, at halda eyga við vatnlekum og -lummum, har vandi er fyri, at frost og máan gera skaðar á múrverkið og at gera neyðugu ábøturnar. Sambært serfrøðini er hetta serliga umráðandi fyrstu tíðina eftir, at varðveitingararbeiðini eru liðug. Tí er umráðandi at fáa eina viðlíkahaldsskipan í lag sum skjótast.

Vitjað var eisini á Skansanum í Havn, har ymiskar loysnir uppá varðveiting av múrverkinum har vórðu umrøddar.





*Loftsmynd av bygdini í Svínoy. Omanfyri dráttin er serliga neystaumhvørvið. Myndin er tikin í august, og hon vísir, at grivið er út fyri bátasavninum*
MYND: BOGI OLSEN PHOTOGRAPHY

# VITJAN Í SVÍNOY Í SAMBANDI VIÐ BÁTASAVN

Felagið Bjarnafossur í Svínoy hevur í nøkur havt ætlanir um at gera eitt bátasavn í Svínoy. Í Svínoy eru umleið 40 føroyskir bátar, ið eiga verða varðveittir. Flestir teirra eru smíðaðir í oynni, og eru hesir bátar eitt serstakt dømi um føroyskan mentanararv. Bátarnir standa í løtuni í fleiri av neystunum í Svínoy nærhendis lendingini á Víkini. Her er eitt serstakt neystaumhvørvi, sum fáastaðni í Føroyum

Herleif Hammer, stjóri

**Ætlanin við bátasavninum** er at savna batarnar í niðaru hæddini, hava framsýning og skipa fyri tiltøkum. Húsið, ið ynskt var at byggja, skal vera í tveimum hæddum. Hvat skal verða í ovaru hæddini, var ikki endalig støða tikin til, men talan var um bygdarhús. Felagið hevði nú fígging til at fáa grivið stykkið út og stoypa grundina. Ætlanin var fyribils at inniloka niðara partin, so hann kundi takast í nýtslu. Klaksvíkar kommuna hevði givið byggiloyvi út frá skitsum gjørdar av byggifyritøku. Nú ætlanin var at fara í gongd, var avgjørt, at avvarðandi myndugleikar saman við ráðgevum skuldu hava ástaðarfund saman við umboðum fyri felagið. Fundurin var ásettur at vera 23. juni. Endamálið við ástaðarfundinum var at umrøða verkætlanina við nevndina og at síggja økið. Tað var Undirvísingar- og Mentamálaráðið (UMMR), ið hevði biðið um fundin, og ráðið hevði biðið umboð fyri Landsverk og Tjóðsavnið, sum eru ráðgevar hjá ráðnum, um at koma við á fundin.



*Á grundini, Bjarnafossur hevði fingið til endamálið, stóð enn grundin til eitt gamalt tarvafjós*

Umboðini hjá UMMR, Tjóðsavninum og Landsverk høvdu frammanundan gjøgnumgingið tilfarið, og vóru samd um, at tekningarnar, sum fingnar vóru til vega, ikki vóru nøktandi, og at tann bygningurin, sum teknaður var, ikki hóskaði inn í økið. Somu umboð vóru tó á einum máli um, at eitt bátasavn og møguliga ein bátasmiðja í hesum umhvørvinum egnaði seg væl sum miðdepilin fyri framsýning og miðlan av bátunum og neystaumhvørvinum. Hetta kundi verið til gagns fyri fólk í oynni og verða við til at menna ferðavinnuna í Svínoy. Mælt var til, at nøkur av neystunum gjørdust ein partur av bátasavninum og framsýningini, tí í neystunum vóru bátarnir best varðveittir, og vóru neystini tað náttúrliga umhvørvið hjá bátunum.

Á fundinum legði umboðið fyri Tjóðsavnið dent á, at sera týdningarmikið var, at bygningurin hóskaði til umhvørvið fyri ikki at oyðileggja útsjóndina og upplivilsið av sermerkta neystaumhvørvinum. Mælt var til at heita á ein arkitekt at tekna eitt hús, sum tók støði í umhvørvinum. Hetta vóru tey í nevndini í Bjarnafossi eitt sindur í iva um, tí tey mettu, at hetta fór at kosta eyka og fór at taka langa tíð. Hjá teimum var umráðandi at fáa grivið út og stoypt grundina nú, tí í løtuni vóru maskinur og fólk til taks í oynni.

Umboð fyri UMMR var Armgarð Weihe, fyri Landsverk Bárður í Baianstovu og fyri Tjóðsavnið Herleif Hammer, Tórálvur Weihe og Kristina Djurhuus Christiansen.



Føroyska UNESCO nevndin. Frá vinstru: Margretha Jacobsen, Herleif Hammer, Armgarð Weihe (skrivari), Elsebeth Heðinsdóttir Christiansen, Annika Smith og Eilif Gaard. Annika Sølvará situr eisini í nevndini, men var ikki við á ferðini

# NORÐURLENDSKU UNESCO TJÓÐARNEVNDIRNAR HITTAST Á ÁLANDI

**UNESCO tjóðarnevndirnar í Norðurlondum hittast til fundar einaferð um árið. Norðurlondini skiftast um at hava fundirnar. Í 2022 átti Finnland tørn, men av tí at Áland júst hevði fingið atlimaskap, eins og Føroyar hava, var fundurin lagdur í Álandi, og deildust Áland og Finnland sostatt um vertsskapin. Fundurin var hildin í Mariehamn 6. til 8. septembur. Tó hittust ungdómsumboðini longu mánadagin við egnari dagsskrá**

Herleif Hammer, stjóri

**Fundurin er deildur** upp í tvey spor, har annað er felags við fyrilestrum, uppleggum og plenum, meðan hitt er smærri arbeiðsbólkar býttir eftir evni. Yvirskipaðu evnini hesa ferð vóru mannarættindi og kyn. Hesi evni vóru viðgjørd í felag og í bólkunum. Tó høvdu bólkarnir eisini egin evni. Bólkarnir vóru innan økini vísindi, samskifti, útbúgving, umsiting og mentan.

Tjóðsavnið var umboðað í mentanarbólkinum. Umframt tey fyrrnevndu yvirskipaðu evnini var eisini arbeitt við øðrum evnum, m.a. spurninginum, hvussu vit verja mentanararv, tá kríggj er. Hetta var sjálvandi sera aktuelt, nú kríggj herjar í Eystureuropa. Eitt annað viðkomandi evni var, hvussu vit verja frælsi hjá listafólkum at skapa. Hetta evnið hava vit eisini havt frammi í Føroyum seinastu árini. Listafólk og tíðindafólk hava nógvastaðni trong kor at skapa og siga sína hugsan.

Í sambandi við fundin varð eisini skipað fyri útferð. Vitjað var á miðaldarslottinum *Kastelholm* og á risastóra skansanum *Bomarsund*, sum russar bygdu í árunum 1832-1854. Skansin gjørdist ongantíð liðugur, tí undir Krimkrígnum taptu russar og mistu Finnland og sostatt eisini Áland. Bretar og fraklendingar tóku tá skansan og løgdu hann í oyði.



*Í eystari havnini í Mariehamn er sokallaða Sjøkvarteret. Hetta er eitt sera virkið og hugnaligt bátaumhvørvi, har álendingar hava bátar, neyst, dráttir, handlar, søvn og matstøð*



*Føroyska nevndin hevði sína egnu dagsskrá mánadagin fyri fundin. Her vitjar hon Ålands Maritime Museum*



*Í juni 2022 læt eitt nýtt savn og vitjanardepil upp í sambandi við Bomarsundskansan. Á myndini síggja vit eitt modell yvir Bomersund, sum stendur í savninum. Skansaøkið var uml. 870 hektarar ella 8,7 km2 til støddar. Hetta var so nógv meira enn bert ein skansi, men heldur eitt víggirt russiskt samfelag við fleiri túsund hermonnum, handlum og smiðjum*



*Norðurlendski stýrisbólkurin*

## UNESCO STÝRISBÓLKURIN Í ROSKILDE

**Norðurlendski stýrisbólkurin fyri UNESCO-innskrivingina av bátinum hittist á Vikingeskibsmuseet í Roskilde**

Kristina Djurhuus Christiansen, savnsvørður

**Norðurlendski stýrisbólkurin nýtti** høvið at hittast á Vikingeskibsmuseet í Roskilde, tá ið rekonstruktiónin av 1000 ára gamla víkingaskipinum, *Skuldelev 3*, varð flotað. Skipið bleiv doypt *Estrid Byrding*, sum var dóttir Svend Tveskæg. Hon búði í Roskilde, tá *Skuldelev 3* varð smíðað.

Evnini á fundinum vóru, hvat var hent í londunum síðan innskrivingina um norðurlendska samstarvið framyvir og menning av einari felags norðurlendskari verjustrategi fyri súðubygda bátin. Hetta er eitt stórt og langskygt arbeiði, men av alstórum týdningi til tess at tryggja lívføri fyri norrønu bátasiðunum fyri komandi ættarlið. Ein týðandi varði verður ein norðurlendsk bátaráðstevna í Roskilde og Holbæk í september 2023.



*UNESCO stýrisbólkurin rør út við víkingaskipinum í føroyska róðrarbátinum Geirfuglen*



*Víkingaskipið fer út á sína jómfrúferð*



*Hog-back gravsteinar*



*Gosforth Cross*



*Tórur á fiskaveiðu*



*Luttakarar á Viking Congress*

# RÁÐSTEVNAN VIKING CONGRESS

Í juli 2022 var ráðstevnan Viking Congress, sum var tann nítjanda í røðini, hildin í Liverpool í Onglandi. Ráðstevnan er skipað á tann hátt, at triðja til fjórða hvørt ár skiftast limalondini at vera vertur fyri ráðstevnuna

Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús, Ph.D. fornfrøðingur

**Sum heitið á** ráðstevnuni ber boð um, snýr ráðstevnan seg einamest um víkingatíð, har dentur verður lagdur á tvørfakligheit. Málið við ráðstevnuni er at hava ein felags pall, har nýggj gransking og ástøði innan ymisk fakøki verða umrødd. Høvuðsfakøkini eru fornfrøði, søga, myntfrøði, málfrøði, navnagransking og rúnafrøði. Umframt ta fakligu og vísindaligu áherðsluna, er ein týðandi partur av ráðstevnuni hjá vertinum at vísa luttakarunum mentanina í vertslandinum. Tessvegna eru útferðir til søvn og serlig mentanarlig støð ein týðandi partur av ráðstevnuni. Fyrstu ferð, ráðstevnan varð hildin, var í Lerwick í Hetlandi í 1950, og síðstu ferð ráðstevnan var í Føroyum, var í 2001.

Nógv fólk luttóku á Viking Congress, og nógvir spennandi fyrilestrar og útferðir vóru á skránni. Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús og Helgi Dahl Michelsen luttóku á ráðstevnuni sum umboð fyri Tjóðsavnið við einum fyrilestri um tað arbeiðið, ið seinastu árini hevur verið gjørt heima á Sandi.

Partur av ráðstevnuni er ein felags ráðstevnudøgurði. Hesa ferð var døgurðin í hotellinum Adelphi, har møguleikin var at hitta fólk. Sum partur av døgurðanum er siðvenja at minnast fólk, ið høvdu tilknýti til ráðstevnuna, við minningarorðum. Í hesum sambandi hevði Helgi minningarorð um Símun V. Arge, fornfrøðing, og Ann Sølvia hevði minningarorð um Anfinn Johansen, lektara í málfrøði. Bæði Símun og Anfinn høvdu sitið í ráðnum fyri Viking Congress. Av tí sama skuldu tveir nýggir nevndarlimir umboða Føroyar í nevndini ella ráðnum fyri Viking Congress. Avgjørt varð, at Helgi og Ann Sølvia eru nýggju umboðini fyri Føroyar í nevndini.

Tað var ein ógvuliga góð og lærurík ráðstevna, har møguleiki, serliga á útferðunum, var at hitta fólk og práta um ymisk evni innan fornfrøði.



*Helgi og Ann Sølvia á ráðstevnudøgurðanum*





*Mynd yvir Røros tikin úr kirkjutorninum. Til høgru á myndini kemur eitt tól undan, sum skrásetir hita í býnum. Hetta verður nýtt til at tryggja ímóti eldi. So gott sum øll húsini eru úr viði og standa tætt saman*



*Luttakarnir á ríkisantikvarfundinum. Vinstrumegin á myndini er gamla koparsmeltaríið, sum í dag er savn. Høgrumegin sæst miðdepilin fyri gamalt handverk*



*Gomul træhús verða umvæld, hetta var ein sera vanlig sjón í býnum. Til høgru á myndini sæst svenski ríkisantikvarurin, Joakim Malmström*



*Lærlingar smíða naglar í jarnsmiðjuni*



*Á snikkaraverkstaðnum var ein úthurð frá 18. øld umvæld*

## Norðurlendskur ríkisantikvarfundur 2022

Norðurlendskur ríkisantikvarfundur er vanliga eina ferð um árið. Vertsskapurin gongur uppá skift, og í 2022 var Norra vertur. Norra skuldi vera vertur í 2020, men orsakað av koronufarsóttini bar hetta ikki til fyrr enn í 2022. Í staðin vóru digitalir fundir hildnir tvey ár á rað

Herleif Hammer, stjóri

**Norra hevði valt** Røros sum karm um fundin, sum var 24. og 25. august. Røros, ið liggur í Trøndalagnum tætt við svenska markið, er á listanum hjá UNESCO yvir heimsarv. Røros er ein sera væl varðveittur minubýur, sum var settur á stovn miðskeiðis í 17. øld. Serliga koparminuvirksemi hevur verið á staðnum. Stórir partar av býarmittuni eru nú friðaðir, og stórt arbeiði verður lagt í at halda bygningarnar og umhvørvið so upprunaligt sum til ber.

Nøkur yvirskipað evni seta vanliga dagsskránna á fundinum, umframt at luttakandi londini velja eina verkætlan, sum arbeitt verður við, at leggja fram fyri hini. Føroyska framløgan snúði seg um arbeiðið við Stokkastovuni í Tinganesi, og um samstarvið millum myndugleikar í Føroyum, norska ríkisantikvarin og serfrøðingar frá universitetinum í Góteborg.

Tey yvirskipaðu evnini vóru altjóða samstarv og tilbúgving í sambandi við óvæntaðar hóttanir móti mentanararvi. Norðurlond eru sera virkin og ganga á odda í mongum altjóða felagsskapum m.a. í ST- og ES-høpi. Norðurlendski fundurin verður nýttur til at kunna hini londini um arbeiðið og til at fáa íblástur til arbeiðið framyvir.

Sera ymiskt er, hvat lond gera við tilbúgving, um mentanararvur verður hóttur. Sviar gera kanska mest av Norðurlondunum, meðan føroyingar og íslendingar gera minst. Sviar vístu á eina áhugaverda royndarætlan úr Gotlandi í sambandi við søvnini á oynni. Har var staðfest, at tørvur var á tryggum goymslum og tryggum flutningi, um tað í kreppustøðu var neyðugt at flyta gripir. Harafturat var ein manualur gjørdur í sambandi við kreppustøðu, og "Blue Shield-emblemir" sett upp við goymslur og søvn.

Ikki allir luttakararnir hildu, at Blue Shield skeltini vóru ein góð loysn, heldur tvørturímóti, tí nú var skeltað við, hvar bumbumálini vóru t.d. í sambandi við kríggj.

Sera nógv áhugavert var at síggja í Røros, og nógv arbeiði var í gongd í sambandi við endurbøting av bygningum. Umfram fleiri søvn var sera áhugavert at síggja stóra depilin, har verkstøð við siðbundnum handverki vóru savnað. Her var jarnsmiðja, træsmiðja, múraraverkstaður, snikkaraverkstaður og verkstaður, har máling var framleidd. Her komu smiðir og lærlingar úr øllum økinum at læra siðbundið handverk. Í Røros kommunu búgva sløk 38.000 fólk, kortini arbeiða her yvir 200 fólk við mentanararvi burturav.

*Blue Shield merkið, sum kann setast við mentanararv, kom í sambandi við Haag-sáttmálan frá 1954 um verju av mentanararvi í sambandi við vápnað stríð*



*Nøkur av eyðkendu húsunum í Røros*



Ólavur Rasmussen, leiðari, greiðir frá virkseminum í SALT



Jón Aldará og Leivur Janus Hansen granska stóra og áhugaverda fuglasavnið hjá Sumbiar Sóknar Bygdarsavni. Tað var Aksal Poulsen, sum savnaði fuglarnar og lat bygdasavninum teir



Inni í gomlu og væl varðveittu Krambúðini í Sandvík frá 1877. Abbi Súsonnu Joensen (í miðjuni á myndini) Michel Nielsen, hevði handilin frá 1926 – 1961. Handilin lat aftur fyrst í 1990-unum



Í Fámjins kirkju. Serfrøðingar okkara kanna støðuna hjá fyrsta "Merkinum"



Lívfrøðingarnir fylgja væl við fuglalívinum. Her verður kikað oman á grasplenuna hjá Royn í Hvalba



Afturgjørdi seksæringurin "Norðlýsan" í afturgjørda neystinum í Sandvík

# Starvsfólkadagar í Suðuroy

Starvsfólk Tjóðsavnsins hava arbeiðsstað á 5 ymiskum støðum í Havn, Hoyvík, Kaldbak og Koltri. Hetta er avbjóðandi, tá hugsað verður um samanhald og samstarv millum ymisku starvsbólkarnar. M.a. tí hevur verið skipað fyri starvsfólkadøgum, har starvsfólkini ferðast kring oyggjarnar og fáa fakligan íblástur saman við sosialari samveru

Herleif Hammer, stjóri

**26. og 27.** oktober vóru starvsfólkadagar fyri starvsfólk Tjóðsavnsins. Hesa ferð gekk leiðin til Suðuroyar. Suðuroyggin hevur sera nógv spennandi at bjóða innan mentan, náttúru, skúla og vinnu, og tí var tað ein avbjóðing at velja burturúr.

Í Suðuroy eru heili 6 bygdarsøvn, og tí var sjálvandi náttúrligt at vitja nøkur av hesum. Valið fall á tað syðsta og tað norðasta á oynni, nevnliga Sumbiar Sóknar Bygdarsavn og Hvalbiar Sóknar Bygdar- og Kolasavn. Savnið í Sumba heldur til í Akrabyrgi í bygninginum, sum fyrr var nýttur til gamla millumbylgjusendaran. Vitjað var eisini á lokala bryggjarínum Biskupskelda í Vági og í gomlu handilshúsunum á Gørðum, sum í dag eisini virkar sum savn. Í Salt tók leiðarin, Ólavur Rasmussen, ímóti og umframt at vitja í kirkjuni í Famjin, var eisini vitjað hjá Sp/f Tari, har slóðbrótandi arbeiði verður gjørt við taraaling. Eisini var vitjað í Sandvík. Ætlandi skuldi Tvøroyrar Skjalasavn eisini vitjast, men tann vitjanin varð avlýst orsakað av koronasmittu á skjalasavninum.



Felagsmynd av ferðalagnum í kirkjuni í Sandvík. Tað var Rannveig Hovgaard, sum tók ímóti og greiddi frá



Formaður í Hvalbiar Sóknar Bygdar- og Kolasavninum er Manne Næs. Alt ferðalagið var bjóðað til døgurða hjá Manna, har borðreitt var við døglingakjøti. Á myndini síggjast f.v. Maud Næs, Manne Næs og Ann Sølvia S. Purkhús







Medicinsk Museion í Keypmannahavn



Besættelsesmuseet í Århus

# KUNNINGARFUNDUR OG KVEIKINGARFERÐ Í DANMARK

**Á hvørjum ári skipar ODM (Organisationen Danske Museer) fyri felags kunningarfundi í Vejle. Í ár bleiv fundurin hildin í døgunum 14.-15. november. Fundurin er serliga ætlaður teimum, ið starvast innan savnsheimin**

Rannvá Winkler, savnsvørður

**Í ár luttóku** seks starvsfólk av Tjóðsavninum á fundinum. Tey vóru Súsanna Joensen, Guðrið R. Poulsen, Julianna Mørkøre Dalbø, Tórarinn Niclasen á Rípuni, Elsuba Olsen og Rannvá Winkler – og umboðaðu tey hvør sítt fakøki á fundinum.

Súsanna Joensen, ið starvast sum konservator á Tjóðsavninum, hevði eina framløgu, har hon greiddi frá starvi sínum, hvørjar avbjóðingar eru, og hvussu konservatorstarvið hevur ment seg ígjøgnum árini.

Endamálið við ODM kunningarfundunum er, at starvsfólk innan savnsheimin fáa ein felags pall at hittast á til fakliga sparring, prát og kjak – umframt kunning um alt tað, ið rørir seg innan altjóða savnsheimin. Eitt yvirskipað høvuðsevni er hvørt ár, og er evnið ofta tongt at alheimsráki, og hvørja ávirkan hetta rák hevur á savnsøkið. Í ár var evnið "Den svære fortælling og de farlige historier" – tað vil siga, hvussu søvn miðla tær søgur, ið eru tabu, torførar og viðkvæmar at sýna fram. Eisini varð serliga arbeitt við, hvussu ein burðardygg leið kann síggja út fyri søvn við nýggju loyvisgóðkenningini "Green Attraction", og hvat "green-washing" er.

Eyðkennismerkið hjá Green Attraction loyvisgóðkenningini

Eftir fundirnar í Vejle varð vitjað á søvnum, ið dagliga arbeiða við evnum, ið eru mett sum tabu – millum annað kyn, rasisma og deyði.

Í Jútlandi vitjaðu vit nýmótans savnið, Moesgaard, ið hevur lagt eina grøna kós fyri framtíðina, KØN, ið lýsir og sýnir fram evnið "kyn" á lutleysan hátt, og á Besættelsesmuseet, ið hevur valt at siga frá søguni um hersetingina av Aarhus undir seinna veraldarbardaga uttan at "pakka nakað inn".

Á Medicinsk Museion vóru vit til fakliga sparring og fingu eina rundvísing og innlit í dagliga arbeiðið á einum savni, ið fæst við viðkvom og umstrídd evnir, ið krevja eina etiska eftirmeting og støðutakan.



*Prestagarðurin og kirkjan ein kaldan vetrardag*



*Arbeiðskamarið hjá presti, áðrenn møblar komu inn. Ferniseraða gólvið og litirnir á veggjunum standa væl saman* MYND: BÁRÐUR Í BAIANSSTOVU



*Snotuliga spísistovan í Ónagerði*

# VITJAN Í PRESTAGARÐINUM Í ÓNAGERÐI

## 2018-2020 var stórt umvælingararbeiði gjørt í vælkenda prestagarðinum í Ónagerði á Viðareiði

Herleif Hammer, stjóri

**Á vári 2021** kundu so prestahjúnini, Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús og Jóannes Purkhús, flyta innaftur í snotuliga og søguliga prestagarðin. Tað var Landsverk við arkitektinum Bárði í Baiansstovu, sum hevði lagt arbeiðið til rættis. Sera nógvir handverkarar og onnur vóru við í hesi stóru verkætlan; nevnast kunnu Símin Johansen, sum stóð fyri timburarbeiðinum, og André Matras, ið stóð fyri málaraarbeiðinum.

Í desember bjóðaði Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús, sum starvast á Tjóðsavninum, starvsfeløgunum norður at síggja lidna arbeiðið og at síggja, hvussu hon og maðurin húsast á hesum søguliga staði.



*Borðreitt var til ein drekkamunn í gomlu, men rúmligu roykstovuni*





*Nógu fólk møttu til ársfundin, sum varð hildin í hugnaligum og rúmligum hølum*



*Ymsar fellur vórðu sýndar fram og royndar*



*Jógvan Thomsen selur bókina "The Faroe Islands' European Storm Petrel"*





*Ein fiskimási kom í eina klappfellu og royndi ringmerkjarin, Kjeld Tommy Pedersen, vísti hann fram fyri luttakarunum*

# ÁRSFUNDUR FYRI RINGMERKJARAR Í DANMARK

## Tjóðsavnið umsitir Færøsk Ringmærkergruppe (Føroyski ringmerkjarabólkurin), sum er skrásettur hjá Ringmærkningscentralen á Statens Naturhistoriske Museum í Keypmannahavn

Jón Aldará, lívfrøðingur

**Ringmerkjarabólkurin samskipar ringmerking** av fugli í Føroyum og samskiftir við Ringmærkningscentralen um viðurskifti, sum hava við ringmerkingarvirksemi í Føroyum at gera. Bæði føroyski ringmerkjarabólkurin og Ringmærkningscentralen samstarva við Danmarks Ringmærkerforening (DRF), sum umboðar ringmerkjarar í danska kongaríkinum.

Saman við DRF skipar Ringmærkningscentralen hvørt ár fyri einum tiltaki, ið kallast Årsmøde for Ringmærkere, har allir danskir ringmerkjarar og ringmerkingaráhugað savnast, samansjóðast og kunna hvønn annan um ymiskt viðkomandi virksemi.

Í 2022 luttók Jón Aldará fyri Tjóðsavnið á hesum tiltaki, sum varð hildið á vakra Dalum Landbrugsskole í Odense, og eisini var Jógvan Thomsen við sum føroyskur luttakari. Jón hevði framløgu um ringmerkingarsøguna og virksemið í Føroyum fyrr og nú, meðan Jógvan legði fram og seldi bókina "The Faroe Islands' European Storm Petrel", sum hann og Jens-Kjeld Jensen stóðu fyri, og har Jón Aldará hevur skrivað ein kapittul í fyri Tjóðsavnið.

Lagt varð eisini fram um ymsar aðrar verkætlanir við m.a. havørn, og Ringmærkningscentralen greiddi frá um framtíðar ringmerkingarætlanina fyri Danmark. Umframt prát og framløgur vórðu eisini net og fellur sett upp uttanfyri, so tað bar til at vísa fram ringmerking av fugli í nærumhvørvinum, og Danmarks Ringmærkerforening og ringmerkjarar seldu ymsa útgerð. Onkur mási og nakað av smáfugli varð fangað og ringmerkt til fragd fyri tey luttakandi. Sum heild var tiltakið væl vitjað, nógv sambond og kunning kom burturúr, umframt at luttøkan og framløgan hjá Tjóðsavninum vórðu sera væl móttiknar.



*Ein av smáfuglunum, sum komu í netið uttanfyri fundarhølið, var músabróður*

# MIÐLAN 2022

10.01.2022 **Kristina Djurhuus Christiansen**. Netborna framløgu um livandi mentan í Føroyum fyri studentaskúlanæmingum í Morsø Gymnasium

26.03.2022 Saman við starvsfólkum á Løgmansskrivstovuni skipaðu starvsfólk á Tjóðsavninum fyri stuðulstiltaki til frama fyri neyðstødd í Ukraina í Stokkastovui í Tinganesi. Framløgur um útgrevsturin og søguna í Stokkastovuni, **Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús og Helgi Dahl Michelsen**. Framvísing av lutum frá útgrevstrinum, **Rannvá Winkler, Rannvá Næs Hoydal og Andras á Lofti**

30.03.2022 **Kolbrún í Haraldsstovu**. Framløga um føroysku náttúruna fyri Betri Banka

02.04.2022 **Kristina Djurhuus Christiansen**. Framløga um grind á skránni Livandi mentan. Aðalfundurin hjá Grindamannafelagnum við Áir

05.04.2022 Rundvísing í framsýningini í Brekkutúni fyri biskupinum Czeslaw Kozon, prestinum Peter Fleetwoord og diakoninum Christian Gabrielsen, við **Ann Sølviu Selmarsdóttir Purkhús, Tórarinn N. á Rípuni og Hákun Andreasen**

21.04.2022 **Agnes-Katharina Kreiling og Kolbrún í Haraldsstovu**. Framløgur um landslag í broyting á Listasavni Føroya

02.05.2022 Ymiskar framløgur um útgrevstararbeiði fyri bólkum og vitjandi í Stokkastovuni fyriskipað av **Ann Sølviu Selmarsdóttir Purkhús, Helga Dahl Michelsen, Rannvá Næs Hoydal, Andrasi á Lofti og Petur Hansen**

04.05.2022 **Herleif Hammer**. Framløga: Koltursætlanin. Mentanarnevnd Løgtingsins

12.05.2022 **Kristina Djurhuus Christiansen**. Framløga um ull sum livandi mentan og burðardygt tilfeingi. Á Búnaðarstovuni

21.05.2022 **Helgi Dahl Michelsen.** Rundvísing á Reyni og Tinganesi fyri uttaríkistænastuni í sambandi við vitjan av sendifólkum i Íslandi

03.06.2022 **Jan Sørenen.** Savnandi Savnsdagar, Útvarpshøllin. Framløga: Nyttan av djórasøvnum lýst við dømi í koronukanningartøkni

06.06.2022 **Kristina Djurhuus Christiansen**. Framløga um ullarvirkan í Føroyum í sambandi við LIVIND verkætlanina. Finnish Heritage Agency í Helsinki

07.06.2022 **Helgi Dahl Michelsen.** Rundvísing á Tinganesi og í Stokkastovuni fyri konu løgmans og manninum hjá danska forsætisráðharranum við fylgi

09.06.2022 **Herleif Hammer**. Rundvísing og frágreiðing um Hoyvíksgarð. Ríkisfundur Føroyar, Grønland og Danmark

11.06.2022 **Helgi Dahl Michelsen.** Rundvísing í Kirkjubø fyri eysturíkarum við áhuga fyri íslendska halgimenninum Torlakki

18.06.2022 **Helgi Dahl Michelsen.** Fyrilestur um fornfrøði í framsýningini í Brekkutúni fyri amerikanskum serfrøðingaferðalagi

15.07.2022 **Agnes-Katharina Kreiling, Jón Aldará og Kolbrún í Haraldsstovu**. Fyrilestrar um Koltur, náttúrugransking, lendisbata og skordýr á G! Festivalinum

15.07.2022 **Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús**. Framløga: Færøske fortidsminder í sambandi við Havleik 2022 í Føroyum, tiltak á Tjóðsavninum í Brekkutúni

15.08.2022 **Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús**. Framløga: Fornminni fram við sjóvarmálan í sambandi við Sjómannadagar í Klaksvík, tiltak í nýggja skúlanum í Klaksvík

19.08.2002 **Tórarinn N. á Rípuni**. Framløga um gomul kort við og um Føroyar á 20 ára hátíðarhaldi hjá Vikmar

23.08.2022 **Herleif Hammer**. Framløga um arbeiðið við Stokkastovuni á Tinganesi. Norðurlendskur ríkisantikvarfundur í Røros í Norra

07.09.2022 **Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús**. Undirvísing í fornfrøði í Føroyum í sambandi við ferðaleiðaraskeið

25.09.2022 **Kristina Djurhuus Christiansen**. Rundvísing og frágreiðing um ull og ullarvirkan í Føroyum fyri einum norðurlendskum verkætlanarbólki, sum arbeiðir við ullarferðavinnu. Tjóðsavnið, Brekkutún

26.09.2022 **Herleif Hammer**. Framløga: Koltursætlanin. Leiðslan í Betri samtakinum

28.09.2022 **Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús**. Framløga og rundvísing í Kirkjubø í sambandi við ferðaleiðarskeið

10.10.2022 **Jan Sørensen.** Framløga: Hví er piss gult? Framløga til savnsfagnaðin. Tjóðsavnið, Brekkutún

12.10.2022 **Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús**. Framløga: Finna fornfrøðingar piss? Framløga til savnsfagnaðin. Tjóðsavnið, Brekkutún

13.10.2022 **Kristina Djurhuus Christiansen**. Framløga: Fyrr bleiv vaskað í landi. Framløga til savnsfagnaðin. Tjóðsavnið, Brekkutún

25.10.2022 **Elsa Berg og Kolbrún í Haraldsstovu**. Framløga um Lendisbata fyri Burðardygt Vinnulív samtakinum

06.11.2022 **Kolbrún í Haraldsstovu**. Framløga um Náttúrunnar fjølbroytni. Ráðstevnan "Hvat er náttúra? Føroysk náttúrufatan í nútíð, fortíð og framtíð". Sjóvinnuhúsið

10.11.2022 **Kristina Djurhuus Christiansen**. Rundvísing og frágreiðing um føroysk klæðir og ull fyri Føroya Húsarhaldsskúla. Tjóðsavnið, Brekkutún

15.11.2022 **Súsanna Joensen**. Framløga: Konservering på Færøerne. Organisationen Danske Museers orienteringsmøde, Den konserveringsfaglige gruppe. Munkebjerg hotel, Vejle

17.11.2022 **Herleif Hammer**. Framløga um átøk fyri at verja føroyska bátin. Tjóðsavnið, Brekkutún

## ÚTGÁVUR


**Hansen, L. J., & Kreiling, A.-K. (2022)**. Small Islands, Small Ponds, Small Communities—Water Beetles and Water Boatmen in the Faroe Islands. *Insects*, *13*(10), 923

**Kreiling, A.-K., Govoni, D. P., Pálsson, S., Ólafsson, J. S., & Kristjánsson, B. K. (2022)**. Invertebrate communities in springs across a gradient in thermal regimes. *PLOS ONE*, *17*(5), e0264501


## RÁÐSTEVNUFRAMLØGUR OG VEGGJASPJALDUR


**Kreiling, A.-L. & Ólafsson, J. 04.07.2022**. New Chironomidae records for the North Atlantic islands based on pupal exuviae. *21st International Symposium on Chironomidae* [Framløga]

**Kreiling, A.-K.& Hansen, L. J. 05.-06.07.2022**. Seasonal variation in chironomid communities in two Faroese streams. *21st International Symposium on Chironomidae* [Veggjaspjaldur]

**Purkhús, A.S.S. & Michelsen, H. 27.07.2022**. Sandur Archaeology – The Church Site and the Buried Archaeological Viking Environment. *19th Viking Congress* [Framløga]

**Purkhús, A.S.S. 19.09.2022**. Arbeiðsháttir innan fornfrøði – fyrr og nú. *Vísindavøka á ferð 2022. Miðnámsskúlin í Hovi fyri næmingum* [Framløga]

**Purkhús, A.S.S. 19.09.2022**. Arbeiðsháttir innan fornfrøði – fyrr og nú. *Vísindavøka á ferð 2022. Miðnámsskúlin í Hovi alment* [Framløga]




# TJÓÐSAVNIÐ Í MIÐLUNUM 2022

20.01.2022 **Vitan.** Tórálvur Weihe og Helgi Dahl Michelsen um arbeiðið í Stokkastovuni á Tinganesi

24.01.2022 **Norðlýsið.** Um gávuna til drotningina í sambandi við hennara 50 ár sum drotning

04.03.2022 **Dagur og Vika,** Kári Sólstein, 160 ára gomul vindeygu sum fyrsta dagin, Bíggjar kirkja

29.03.2022 **Youtube,** Tjóðsavnið. Útgrevstur í Stokkastovuni. Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús og Helgi Dahl Michelsen greiða frá

13.04.2022 **Sosialurin nr. 18.** Kristina Djurhuus Christiansen um grind á skránna Livandi mentan

25.04.2022 **Sosialurin.** Um Depilsgarð

28.04.2022 **Dagur og Vika.** Leivur Janus Hansen og Agnes-Katharina Kreiling um LifePlan verkætlanina

03.05.2022 **Kvf.fo:** Koltursætlanin

06.05.2022 **Dimma.** Óluvá Zachariasen um Koltursætlanina

06.05.2022 **Breddin. KVF.** Bjørn Patursson og Herleif Hammer um Koltursætlanina

27.05.2022 **Portal.fo.** Tjóðsavnið og mentanarnáttin

20.05.2022 **Kvf 3-2** "Ein heiður og ein ábyrgd": Kristina Djurhuus Christiansen um føroyska bátin, kappróður og UNESCO innskrivingina

09.06.2022 **Kvf.fo** Um "Savnandi savnsdagin"

10.06.2022 **Góðan morgun Føroyar.** Helgi Dahl Michelsen um fornminni

08.08.2022 **Kvf.fo:** Kolbrún í Haraldsstovu um arbeiðið við skriðuna omanfyri Syðradal á Kalsoynni

09.08.2022 **Dagur og Vika.** Agnes-Katharina Kreiling um FishFAR verkætlanina

16.08.2022 **Norðlýsið.** Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús um fornar búsetingar

20.08.2022 **Arte.tv.** Agnes-Katharina Kreiling, Jón Aldará og Leivur Janus Hansen um granskingina í Koltri

20.09.2022 **Góðan morgun Føroyar.** Kolbrún í Haraldsstovu um Lendisbataverkætlanina, skriðan omanfyri Syðradal á Kalsoynni

26.09.2022 **ZDF.** Agnes-Katharina Kreiling, Jón Aldará og Leivur Janus Hansen um Koltur

13.10.2022 **Góðan morgun Føroyar.** Tórarinn N. á Rípuni um gomlu kortini hjá Vikmar

16.10.2022 **Útvarpstíðindi.** Jón Aldará um fuglakrím

17.11.2022 **Góðan morgun Føroyar.** Kristina Djurhuus Christiansen um bátatiltak á Tjóðsavninum

18.11.2022 **Norðlýsið.** Um bátatiltak á Tjóðsavninum

19.11.2022 **FRANCE 5,** Echappées belles – Spéciale: Féroé, l'archipel spectaculaire. Jón Aldará um Koltur

21.11.2022 **Nordisk Ministerråd.** Filmsbrot um Lendisbata verkætlanina

28.11.2022 **Tv5Monde,** AL-TERRE-NATIVE Voyages. Kolbrún í Haraldsstovu um Lendisbata verkætlanina

30.11.2022 **Ihr Nordlandführer:** "Das färöische Boot": Kristina Djurhuus Christiansen um føroyska bátin

14.12.2022 **Dagbladet Information.** Grein: "Klimaaktivist: »Jeg er ked af at sige det, men også på klimafronten er Færøerne bagud«". Kolbrún í Haraldsstovu um náttúru- og veðurlagsbroytingar

22.12.2022 **Frihedsbrevet.fo.** "Frímælt" poddvarpsending: Kolbrún í Haraldsstovu um Lendisbata og skriðurnar í Klaksvík





Pat sker út

Pat liðug við eitt av sínum flottu fruktføtum

# Pat gandar frukt til listaverk

Patcharee Areesaman, ella Pat, sum hon verður kallað, flutti til Føroya í 2011 og hevur síðani mars 2022 verið reingerðarfólk á Tjóðsavninum. Umframt reingerðararbeiðið hevur Pat eisini stovnað fyritøkuna FruktArt, har hon listarliga gandar við fruktum

**Til hátíðarhaldið í** november fyri Jóannesi Stephansson, tá hann fór frá fyri aldur, hevði Pat gjørt eitt flott fruktfat, sum er at síggja aðrastaðni í ársritinum.

Pat, sum er uppvaksin í Bangkok í Thailandi, kom til Føroya í 2011. Hon hugsaði ikki tá um kynstrið at gera fruktføt – hetta kom ikki í lag, fyrr enn hon og ein vinkona skipaðu fyri einum Thai-festivali í Føroyum. Í sambandi við Thai-festivalin heittu tær á thailendingar at vísa fram ella gera okkurt til festivalin, sum tey dugdu serliga væl. Tá kom Pat at hugsa um fruktskeringina, sum hon hevði lært sum barn.

Tá Pat var smágenta, var tað at skera frukt ein lærugrein í Thailandi. Tá børnini komu í 'highschool' 10 ára gomul, var fruktskering ein føst lærugrein á tímatalvuni í tvey ár – hvørja viku. Nógv varð gjørt burturúr, og kynstrið varð eisini eggjað við kappingum millum skúlarnar. Einaferð gjørdust hon og vinkonan nummar 2 í kappingini millum allar skúlarnar í Bangkok.

Knívurin, sum Pat nýtir, hevur sína serligu søgu, tí pápi hennara gjørdi henni knívin, tá hon var smágenta, og er tað enn júst henda knívin, hon brúkar í dag.

Siðvenjan at skera frukt er elligomul í Thailandi, og verða fruktføtini brúkt at prýða borðini við til serlig høvi. Áður vórðu fruktirnar skornar sum blómur ella í serlig mynstur, men í dag verða fruktirnar eisini skornar sum myndir, t.d. eftir persóninum, sum fruktfatið er ætlað, eina hetju hjá børnum ella serliga høvið, sum talan er um, og var hetta eisini tað, sum varð gjørt til hátíðarhaldið hjá Jóannesi.

Sanna Hansen, fíggjar- og fyrisitingarleiðari



# VITJANDI Á FRAMSÝNINGUNUM 2022

Vitjandi í Brekkutúni 2022:




## BREKKUTÚN

**Innan ferðavinnuna varð** mett, at 2022 fór at gerast metár í Føroyum, tá talan var um ferðafólk, sum komu til landið. Á Tjóðsavninum var í øllum førum talan um eitt metár, bæði tá talan er um vitjandi úr útlandinum, men eisini talið á føroyingum, sum løgdu sær leiðina framvið framsýningina í Brekkutúni – íalt 19.408 fólk.

## SAVNSFAGNAÐUR

**Í 2022 vóru** 2.269 fólk á árliga savnsfagnaðinum í heystfrítíðini. Størsti parturin vóru børn – 56%. Eins og tvey tey undanfarnu árini varð dagurin býttur í tvey, har opið var frá 11-13 og frá 14-16. Av tí at avmarkingar – tó ikki eins fá og undir korona – vóru fyri, hvussu nógv vitjandi kundu vera inni í senn, ber illa til at gera samanberingar við árini frammanundan, har ongar avmarkingar vóru. Samlaða talið á vitjandi var 2.269 fólk frá mánadegi til fríggjadag, og eins og undanfarin ár vaks vitjanartalið gjøgnum vikuna, so fríggjadagurin var tann mest vitjaði.

## HOYVÍKSGARÐUR

**Vitjanartølini í Hoyvíksgarði** vaksa hvørt ár. Ein orsøk er sjálvsagt, at ferðafólkatalið í Føroyum er vaksandi, men tað er eisini komið nógv áhugavert afturat í Kúrdali, sum er eina vitjan vert. Eisini eru savnsvaktirnar í Brekkutúni raskar at vísa teimum vitjandi á útisavnið, sum er í Kúrdali bæði við Hoyvíksgarði og úthúsum umframt plantufrøðiliga urtagarðin.

Vitjandi í Hoyvíksgarði 2022:




## HVALASTØÐIN VIÐ ÁIR

**Hvalastøðin var opin** fyri almenninginum leygar- og sunnudag frá hálvum juni til hálvan august frá 10-17 eins og í fjør við møguleika fyri rundvísingum. Í vanligu upplatingartíðunum vitjaðu 292 fólk, harav størsti parturin vóru útlendingar. Harumframt vóru skúlar, dagstovnar, arbeiðspláss og feløg og vitjaðu eftir avtalu, og vóru hesi fleiri í tali enn tey, sum vitjaðu í vanligu upplatingartíðini, nevniliga 416 fólk. Íalt vóru sostatt 708 vitjandi á Hvalastøðini við Áir í mun til 524 í fjør.

Sanna Hansen, fíggjar- og fyrisitingarleiðari



Vinnuháskúlin vitjar



Tórarinn greiðir frá um føroyska bátin



Skúlin á Argjahamri

# SKÚLAVITJANIR Í 2022

2022 líktist nógv 2021. Talið av rundvísingum var á leið tað sama; tvær fleiri. Hóast talið er næstan tað sama, so eru tó nakrar skjótingar í. Fólkaskúlavitjanirnar úr Havn eru nakað fækkaðar, meðan nærum alt annað er vaksið eitt sindur. Í 2022 eru tó eisini fleiri skúlavitjanir úr Havn enn av bygd, tó at munurin ikki er so stórur

Tórarinn N. á Rípuni, savnslærari

**Í 2021 vóru** fleiri fólkaskúlar á vitjan enn tað vóru miðnámsskúlar. Men í 2022 var tað so at siga javnt býtt, tó áttu miðnámsskúlarnir munin. Eins og undanfarin ár, so hevði Glasir nógv tær flestu vitjanirnar, men tað er heldur ikki so undarligt; tað er jú nógv tann størsti skúlin í landinum. Tó hevur miðnámsskúlin á Kamsdali meira enn tvífaldað sítt vitjanartal.

Hvørji ynskini til rundvísingarnar eru, er ymiskt. Barnagarðar og frítíðarskúlar hava ofta ikki nakað beinleiðis, sum tey vilja hoyra um, men vilja heldur hava eina stuttliga uppliving. Tá fáa tey oftast eina stutta frágreiðing um eitthvørt, og síðani kunnu tey sjálv ganga runt og loysa ymsar uppgávur, um áhugi er fyri tí. Hjá øðrum skúlum er øðrvísi. Tá er næstan altíð ein ávís ætlan við rundvísingini. Og í ár hevur nýggja framsýningin við føroysku klæðunum verið sera væl umtókt.

Nakað, sum er blivið ein afturvendandi táttur, eru rundvísingarnar fyri komandi ferðaleiðarum. Í ár var einki undantak. Teir fingu rundvísingar í Hoyvíksgarði, í Brekkutúni og á Hvalastøðini við Áir. Hesar rundvísingarnar eru sera drúgvar, tí farast skal um so gott sum alt. Spurt verður um alt ímillum himmal og jørð, og tað ger rundvísingarnar mangan sera stuttligar.

Talið á vitjanum frá skúlum uttan úr heimi var áleið tað sama sum í 2021.

Í 2022 vitjaði ein skúli, sum ikki var úr Danmark, og tað hava vit ikki havt, síðani korona legði alt lamið. Fróðskaparsetrið í Helsinki kom á vitjan. Afturvendandi gestir vóru eisini í 2022, tá Rønde skole kom á vitjan, tey vitja á hvørjum ári.

## VITJANIR 2022

**Skúlar í Havn**

| | |
|---|---|
| Skúlin á Fløtum | 7 |
| Skúlin á Argjahamri | 3 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 1 |
| Eysturskúlin | 1 |
| Lítli skúli | 1 |
| Fráskúlin í Havn | 1 |
| | **14** |

**Frítíðarskúlar í Havn**

| | |
|---|---|
| Frítíðarskúlin Sankta Frans | 3 |
| Frítíðarskúlin á Argjahamri | 1 |
| Frítíðarskúlin við Løgmannabreyt | 1 |
| | **5** |

**Dagstovnar í Havn**

| | |
|---|---|
| Birkilund | 2 |
| Býlingshúsið undir Fjalli | 2 |
| Ónevndur | 1 |
| Dagstovnurin við Løgmannabreyt | 1 |
| | **6** |

**Miðnámsskúlar**

| | |
|---|---|
| Glasir | 19 |
| Miðnám á Kambsdali | 9 |
| Miðnám í Vestmanna | 1 |
| Miðnám í Suðuroy | 1 |
| | **30** |

**Aðrir skúlar í Føroyum**

| | |
|---|---|
| Føroya Fólkaháskúli | 2 |
| Kvøldskúlin í Havn | 1 |
| Dugni | 1 |
| Føroya Eftirskúli | 1 |
| | **5** |

**Vitjanir úr útlondum**

| | |
|---|---|
| Københavns Universitet | 3 |
| Herning Gymnasium | 1 |
| Det Arnamagnæiske Institut | 1 |
| Helsinki Universitet | 1 |
| Rønde skole | 1 |
| | **7** |

**Skúlar uttan fyri Havnina**

| | |
|---|---|
| Sørvágs skúli | 3 |
| Tvøroyrar skúli | 2 |
| Skúlin við Streymin | 1 |
| Stranda skúli | 1 |
| Eiðis skúli | 1 |
| Vágs skúli | 1 |
| Sandoyar meginskúli | 1 |
| Tofta skúli | 1 |
| | **11** |

**Dagstovnar uttan fyri Havnina**

| | |
|---|---|
| Útibarnagarðurin í Trongisvági | 1 |
| Barnagarðurin í Runavík | 1 |
| | **2** |

**Annað** **6**





Føroya Eftirskúli vitjar á Tjóðsavninum

# SAVNSLÆRARIN

Tað eru sera nógvir ymiskir skúlar, dagstovnar og onnur, ið brúka savnið

**Til ber at bíleggja sær eina rundvísing við at venda sær til savnslæraran á torarinn@savn.fo Helst má hetta gerast í hampiliga góðari tíð, fyri at savnslærarin skal hava ein líkinda møguleika at fyrireika seg**

**Tað ber til** at biðja um rundvísing ella undirvísing í øllum møguligum. Alt frá jarðfrøði, skipasøgu til fornfrøði og søgu. Eitt tilboð, sum kanska fá vita av, er, at tað eisini ber til at vitja Hoyvíksgarð og Hvalastøðina við Áir.

Barnagarðar og dagstovnar hava ikki altíð eitt ávíst endamál við vitjanunum, men kundu hugsað sær at hoyrt um okkurt spennandi. Tá ið børnini eru so lítil, orka tey ikki altíð at lurta eftir longum frágreiðingum. Tí er rundvísingin oftast stutt, og so kunnu børnini sjálv fara á rannsóknarferð á savninum aftaná. Bókstavaveiða og aðrar uppgávur eru væl umtóktar.

Flokkar úr fólkaskúlanum og úr miðnámsskúlum hava aloftast eina ætlan við vitjanini. Rundvísingin skal snúgva seg um tað, sum tey arbeiða við ella fara at arbeiða við. Tá er gott, um bíleggingin er gjørd í góðari tí, so at til ber at fyrireika seg sum best.

Stovnar og skúlar sleppa altíð inn á savnið, um aðrar avtalur ikki forða tí. Tað er ikki neyðugt sum so at hyggja eftir upplatingartíðunum. Eru ynski um at fáa eina rundvísing klokkan 8 á morgni, ja, so er tað eingin trupulleiki. Í vetrarhálvuni er savnið bert opið fýra dagar um vikuna, men skúlar sleppa eisini inn teir dagar, sum savnið ikki hevur opið.

Tórarinn N. á Rípuni, savnslærari









*Hátíðarhald*

# Fráfaringarhald fyri Jóannesi Stephansson

Jóannes Stephansson, savnsteknikari á Bygningadeildini, gjørdist sjeyti í november 2022, og helt hann, at tíðin var komin at takka fyri seg. Jóannes hevur arbeitt á savninum í 32 ár. Upprunaliga varð Jóannes settur á Fornminnissavninum, sum síðani bleiv til Søvn Landsins og nú Tjóðsavnið

**Sanna Hansen, fíggjar- og fyrisitingarleiðari**

**Í sambandi við** at Jóannes fór frá, var hátíðarhald hildið fyri honum tann 24. november. Eftir ynski Jóannesar var talan um eitt innanhýsis tiltak, men gjørdi hetta ikki løtuna minni hugnaliga, og nógv fólk møttu.

Nakrir av starvsfeløgunum hildu, at Jóannes skuldi heintast við manér heima við hús og fóru við fleiri bilum eftir honum. Tískil var tað ein bilrøð, sum koyrdi oman aftur í Kúrdal henda dagin, har Jóannes eisini á fyrsta sinni royndi seg sum bilførari í einum el-bili.

Oddvør Skarðhamar var biðin at borðreiða við nógvum góðum, og eisini hevði FruktArt gjørt eitt so flott fruktfat, sum mynd eisini er av.



*Jóannes Stephansson 1993*

Stjórin helt røðu, umframt Tórálvur Weihe, deildarleiðari hjá Jóannesi seinastu 17 árini. Starvsfelagin gjøgnum nógv ár, Súsanna Joensen, konservator, segði eisini nøkur orð. Ólavur á Váli kom og spældi nøkur av hansara egnu og øðrum løgum.

Nú tað stundaði til jóla, varð prýtt við ymsum jólaligum, men harumframt høvdu starvsfelagar eisini samansett eina myndarøð av Jóannesi og starvsfeløgum, bæði í arbeiði og til gamans. Eisini høvdu tey leitað fram eina vakra troyggju úr goymslu savnsins, sum mamma Jóannesar hevði bundið honum, tá hann var smádrongur.



# STARVSFÓLK 2022

*Yvirlit:*



Herleif Hammer
**STJÓRI**



Kim J. Clementsen
**HÚSAVØRÐUR**



Hákun Andreasen
**SAVNSTEKNIKARI**



Jóannes Stephansson
**SAVNSTEKNIKARI**



Súsanna Joensen
**KONSERVATOR**



Tórarinn N. á Rípuni
**SAVNSLÆRARI**



Rannvá D. Djurhuus
**SKRIVSTOVUFÓLK**



Helgi D. Michelsen
**SAVNSVØRÐUR, FORNFRØÐIDEILD**



Leivur Janus Hansen
**SAVNSV., LANDDJÓRADEILD**



Tórálvur Weihe
**SAVNSARKITEKTUR, BYGNINGSD.**



Jón Aldará
**LÍVFRØÐINGUR**



Sanna Hansen
**FÍGGJAR- OG FYRISITINGARLEIÐARI**



Herdis H. Jacobsen
**SAVNSHJÁLPARI**



Bjørn Patursson
**FYRISTØÐUMAÐUR, KOLTUR**



Josefina D. Haraldsen
**JOURNAL**



Erland V. Joensen, Ph.D.
**SAVNSVØRÐUR, FÓLKALÍVSDEILD**



Palli Askham
**SAVNSLÆRARI/KT-VØRÐUR**



Rannvá Winkler
**SAVNSVØRÐUR**



Elsuba Olsen
**BÓKHALD**



Jan Sørensen
**SAVNSVØRÐUR, SJÓDJÓRADEILD**



Ann Sølvia S. Purkhús
**PH.D. FORNFRØÐINGUR**



Agnes-Katharina Kreiling
**PH.D. LÍVFRØÐINGUR**



Sune Strøm
**SAVNSHANDVERKARI**



Anna Maria Bengtson
**REINGERÐ**



Kristina D. Christiansen
**SAVNSV., FÓLKALÍVSDEILD**



Kolbrún í Haraldsstovu
**SAVNSVØRÐUR, PLANTUDEILD**



Guðrið R. Poulsen
**SAVNSTEKNIKARI**



Patcharee Areesaman
**VASKIFÓLK**



Edla Petersen
**SKRIVSTOVUFÓLK**



Áki Vang
**LÍVFRØÐINGUR**



Margretha Nónklett
**SAVNSVØRÐUR, FÓLKALÍVSDEILD**



Julianna M. Dalbø
**GOYMSLUVØRÐUR**



Meduna Dalsgaard
**ARKITEKTUR**



Elsa Berg
**B.SC Í VISTFRØÐI**

# STARVSFÓLK, SUM ERU BYRJAÐ ELLA GIVIN Í 2022

**Meduna Dalsgaard** byrjaði í starvi á bygningadeildini á Tjóðsavninum 1. februar. Meduna er arkitektur frá Kunstakademiets Arkitektskole í 2004 og hevur síðani tá arbeitt á teknistovu og øðrum stovnum. Høvuðsarbeiðsøkið hjá nýsetta arkitektinum er at taka sær av málum í sambandi við friðaðu kirkjurnar og kirkjurnar, sum eru eldri enn 100 ár.

Eftir at **Anna Maria Bengtson** hevði verið í farloyvi í eitt hálvt ár frá starvinum sum reingerðarfólk í Kúrdali, segði hon seg úr starvinum tann 1. mars 2022. Anna Maria hevði verið á savninum síðani á sumri 2020. Avloysarin hjá Annu Mariu er **Patcharee (Pat) Areesaman,** sum vit hava skrivað ein stuttan stubba um aðrastaðni í ársritinum.

**Rannvá Dahl Djurhuus**, sum hevur verið í starvi sum skrivstovufólk síðani 2016, segði seg úr starvinum 1. mai í 2022. Í hennara sess varð **Edla Petersen** sett. Edla hevur drúgvar royndir frá øðrum skrivstovustørvum og hevur seinnu árini arbeitt á Vørn.

Tann 1. oktober byrjaði **Áki Vang** sum lívfrøðingur á sjódjóradeidini. Áki hevur eina MSc í lívfrøði frá Keypmannahavnar Universiteti í 2015 og hevur seinastu árini arbeitt hjá Biofar, sum eisini heldur til í Kaldbak í hølum Tjóðsavnsins.

**Erland Viberg Joensen**, savnsvørður á fólkalívsdeildini, fór í farloyvi frá Tjóðsavninum tann 31. oktober, og **Margretha Nónklett** varð sett í farloyvisstarvið. Margretha er Cand.mag. í europæiskari etnologi frá Keypmannahavnar Universiteti í 2003 og hevur seinastu árini verið Býarsavnsvørður á Tórshavnar býarsavni.

Tann 1. desembur varð **Julianna Mørkøre Dalbø** sett í starv sum goymsluvørður. Julianna er fornfrøðingur frá Aarhus Universiteti í 2020. Julianna hevur áður verið knýtt at savninum við ymsum uppgávum, herundir at gera framsýning, skjala- og gripaskráseting, grevstrarbeiði umframt við goymsluarbeiði.

**Jóannes Stephansson**, savnsteknikari á bygningadeildini, segði seg úr starvi tann 30. november, nú hann gjørdist sjeyti. Jóannes hevur arbeitt á savninum í 32 ár og varð upprunaliga settur á Fornminnissavninum. Ein stuttur stubbi um Jóannes er aðrastaðni í ársritinum.

**Elsa Berg**, B.Sc í vistfrøði, verkætlanarsett í sambandi við Lendisbata.




Arne á arbeiðsferð í Íslandi, maðurin til vinstru ókendur fremmandamaður



Arne heldur røðu, tá framsýningin í Brekkutúni lat upp 18. juni 1996. Til høgru Jens Kristian Vang, myndamaður

# MINNINGARORÐ UM ARNE EDMUND THORSTEINSSON

10.11.1938 – 07.03.2022

Arne Thorsteinsson var føddur í Trongisvági, har hann eisini vaks upp. Eftir lokið málsligt studentsprógv frá Føroya Studentaskúla í 1956 fór hann undir at lesa miðaldarfornfrøði í Aarhus, og varð hann mag.art í fornfrøði í 1968.

Sum vanligt hjá fornfrøðilesandi luttók Arne í mongum fornfrøðigrevstrum í lestrartíðini, bæði í Føroyum og í so fjarskotnum staði sum Abu-Dhabi í Sameindu Arabisku Emiratunum. Hesum seinna staðnum dámdi Arna so sera væl at siga frá, og hvat hann har hevði upplivað.

Eftir loknan lesnað arbeiddi Arne á Moesgaard Museum. Í 1970 kom Arne í starv sum fornfrøðingur á Føroya Fornminnissavni. Í 1972 var Arne settur í sjúkrafarloyvisstarv fyri Sverra Dahl, landsantikvar, og var settur landsantikvarur til 1980, tá hann var settur í fast starv. Tíðliga í síni starvssetan fór Arne undir at víðka um fakøkini og starvsfólkahópin á Fornminnissavninum. Savnið skuldi mennast og virka sum eitt tjóðsavn, og tí var neyðugt við savnslærara, fólkalívsfrøðingi, fornfrøðingi, arkitekti, fotografi, konservatori, umsiting við skrivstovufólkum og at útbúgva savnsteknikarar og skrivstovulærling. Hetta varð veruleiki eftir 7-8 árum.



Umvæling í Quillinsgarði 1990, Arne greiðir frá um stavlag og stólpar

Eisini arbeiddi hann fyri at fáa bygt nýggj savnshús, eitt tjóðsavn, og í 1988 var eitt ítøkiligt uppskot alment víst fram, ið Árni Winther hevði gjørt saman við starvsfólkum á Fornminnissavninum. – Hetta varð ikki framt í verki, men aðrar ávegis loysnir vórðu funnar, sum betraðu hølisviðurskiftini so dánt.

Í 1975 fór savnið undir at geva Mondul út. Ætlanin við Mondli var at fáa eitt betri samband millum fólk kring landið og Føroya Fornminnissavn, og tí var fyrsta blaðið sent í hvørt hús. Henda ætlan eydnaðist væl, og at áhugin var stórur, vísir eitt haldaratal um 1200. Í innihaldsyvirlitunum yvir 14 árgangir sæst, hvussu nógv ymist Arne hevði áhuga í og skrivaði um.



Í Eystrum í Porkeri, august 1984, Arne situr á einum songarstokki, meðan húsini vera avmyndaði og skrásett innan

Umframt greinar í føroyskum tíðaritum, so skrivaði hann í útlendskum tíðaritum – ikki bara um føroyska fornfrøði, men um jarðarviðurskifti, byggisøgu v.m. Eisini hevði Arne gott samstarv við nógv ymisk útlendsk fakfólk. Hetta gagnaði stovninum í fleiri førum, m.a. tá farast skuldi undir varðveitingararbeiðið av Múrinum í Kirkjubø.

Fakligi áhugi hansara rakk ógvuliga víða innan fornfrøði og mentanarsøgu sum heild, eisini eldri lógir, ja, løgfrøði sum heild, hevði hansara stóra áhuga. Ógvuliga innaliga var hann í arbeiðsmarknaðarmálum/sáttmálaviðurskiftum, og vóru ivamál ella spurningar, so fingu vit altíð greitt svar frá honum.

Málburður var nakað, ið hann gekk høgt uppí – bæði í skrift og talu: einki við at lata nakað skriv av húsinum við stavi- ella kommafeili í, nei, so skuldi rættast. Áðrenn rættiband var í skrivimaskinum, og teldurnar vóru komnar, so var at skriva, klippa tað rætta, seta arkið uppá vindeygarútin, klistra tað rætta upp á pláss og so fotokopiera tað til nýggjan original at senda.



Umvæling av tekjuni í Koytu í 1977

Tað er mangan, at yngru starvsfólkini hava á munni, at tað er "eitt fornøjilsi" at lesa tað, ið Arne hevur skrivað av føroyskum tekstum – málið er so gott og greitt.

Tá telefonin varð tikin, var einki við bara at siga halló, nei: "*Góðan dag, tað er fornminnissavnið*". Varð telefonin stillað út til onkran annan enn kontórið, so skuldu vit siga, hvørji vit vóru afturat.

Arne setti gongd á mangt, og illa ber til at fáa alt við her. Í 2001 ynskti Arne at fara úr starvi sum landsantikvarur. Hann helt fram sum savnsvørður eftir serligu skipanini sambært starvsfólkapolitikki landsins ætlað eldri starvsfólkum.

Í sambandi við arbeiðið at fáa lutir, ið latnir vóru inn á Nationalmuseet í Keypmannahavn, heim aftur til Føroya, gjøgnumgekk Arne tað føroyska gripatilfarið og stóð annars á odda fyri føroyska arbeiðsbólkinum. Endin av hesum arbeiði var ein framsýning, *Úr útlegd*, ið fyrst varð sett upp á Nationalmuseet og síðani í Føroyum í 2002.

Umframt at vera savnsmaður, so var Arne eisini hugfarsligur og lættur at vera saman við.

*Ærað veri minnið um okkara fyrrverandi stjóra.*

**Elsuba, Josefina og Súsanna**

# SUMMARY IN ENGLISH

**2022 was a** busy year at the National Museum. Even though the previous two years were much affected by the Corona situation, there was quite a lot on the program during this period. Still, it was good to get things back to normal at the Museum in 2022. Due to the Corona situation, we had to catch up on many events that had been postponed, e.g. international conferences, meetings and visits.

**At the National** Museum we saw the effect of the tourists returning to the Faroe Islands as the number of visitors was record high in 2022. First and foremost the number of foreign tourists increased significantly but the number of Faroese visitors also increased.

**There is still** quite a lot of building activity going on around the Faroe Islands, and this meant that our archeologists were called out to conduct research and register in connection with road construction, harbour extensions, tunnelling work, development of building land and other building activities.

**The extensive study** on biodiversity that has been going on in Koltur in the recent years continues. The comprehensive biological cataloguing of all flora and fauna on the island has now been going on for three years and is expected to be finished next year. At the same time, other projects in Koltur have now begun, among others Lifeplan.

**The project Lendisbati** is also beginning to take shape. The project concerns repairing damaged landscapes e.g. wetlands and landslides and to pave the way for nature reserves in the Faroe Islands. Several projects were initiated in 2022, among others a nature reserve in Kalsoy and the work of restoring the land after a landslide, also in Kalsoy.

**In 2022 the** National Museum opened a new permanent exhibition at Brekkutún. The exhibition shows the Faroese national costume and the traditional handicraft that lies behind it. Two years ago, a new exhibition about wool and sheep-farming was set up. These two exhibitions are placed right next to each other and seem to support each other well. A special temporary exhibition was set up in 2022 which showed artefacts found in the excavation of the basement of Stokkastovan. Stokkastovan is a 17th century log house, which is being repaired. The exhibition, which was outdoors, was also a fund-raising event for refugees from the Ukraine.

**We have several** new faces at the National Museum. This is partly due to natural replacement but we have also experienced a need to increase our staff as the tasks become larger and the number of projects increases.



tjodsavnid.fo

**FRAMSÝNING**
Brekkutún 6
Hoyvík

**FYRISITING**
Kúrdalsvegur 15
Hoyvík
+298 340 500
tjodsavnid@savn.fo